# EXIT RUSSLAND?

## Hvat vendir upp og niður í fiskiveiðuavtaluni

JAVNAÐARFLOKKURIN
á Fólkatingi

# INNIHALDSYVIRLIT

**FORMÆLI:**

Avgerðin um samstarvið við Russland kann ikki takast í duldum .... 4

**1. PARTUR:**

**Eitt umstrítt samstarv .... 11**

Russar fáa áhuga fyri føroyska svartkjaftinum .... 12

Sáttmálin verður undirskrivaður .... 15

Heimskendur kristin leiðari til Føroya at tala ímóti samvinnuni við Sovjetsamveldið .... 18

Togtogan millum andstøðu og samgongu .... 18

Pauli Ellefsen mátti velja síðu .... 20

Tá fiskiveiðuavtalan skuldi leingjast 1987 .... 21

Njósning og mannarættindabrot .... 23

Búskaparligu argumentini vunnu .... 23

Atli Dam heiðraður av russum fyri sín leiklut í samstarvinum .... 26

Føroyskir sjómenn tiknir .... 26

Tilgongdin til fiskiveiðusamstarvið fyri 2023 .... 28

Samanumtøka .... 35

**CASE: VIT SÍGGJA IKKI VIRÐIÐ Í OKKARA EGNA .... 36**

**2. PARTUR:**

**Hvør kundi inntøkan verið av uppsjóvarkvotuni? .... 41**

Inngangur .... 41

Árið er 2021 .... 41

Veruligi fiskiskapurin og ásettu kvoturnar .... 41

Nettoinntøka til føroyska samfelagið .... 42

Útrokningar fyri Barentshavið og uppsjóvarkvoturnar .... 42

Útrokningar fyri botnfiskakvoturnar .... 42

399 milliónir í undirskot .... 43

**Inntøkur úr Barentshavinum og møguligar inntøkur av uppsjóvar- og botnfiskiskapinum (1) .... 45**

Bygnaður (1.1) .... 45

Avreiðingarvirðið (1.2) .... 45

Barentshavið og uppsjóvarfiskurin – hvat gevur meira? (1.3) .... 47

Bruttoúrslit til reiðarí (1.3.1) .... 47

Skattur og hýrur (1.3.2) .... 48

Tilfeingisgjald (1.3.3) .... 49

Virðisøking á landi (1.3.4) .... 50

Nettoinntøka til føroyska samfelagið frá uppsjóvarfiskinum 1.3.5 .... 51

Botnfiskiskapurin og russisk hjáveiða (1.4) .52
Mett yvirskot til reiðarí (1.4.1) .52
Hýrur (1.4.2) .53
Virðisøking (1.4.3) .53
Inntøkur til føroyska samfelagið frá botnfiskiskapinum (1.4.4) .53
Niðurstøða .54

**CASE: HAVIÐ ER OKKARA MINA OG SVARTKJAFTURIN ER DIAMANTURIN .56**

Paralellur til svartkjaftin .57
Forðingar .58

**3. PARTUR:**

**Søgan um revsitiltøk og ein umstríddan handilsfelaga .61**

Frá liberalari vón til strategiskan geopolitikk og hybridkríggj .61
Faktaboks: Russiskt hybridkríggj .63
Kríggj við øðrum tólum: Geobúskaparliga aftursvarið úr vesturheiminum .63
Vesturlendsk revsitiltøk móti Russland: too little, too late? .64
Vesturlendsk avmarkandi tiltøk móti Russlandi .64
Faktaboks: Endamál við revsitiltøkum .65
ES-revsitiltøk móti Russlandi .66
Rigga revsitiltøkini? .66
Føroysk tiltøk móti Russlandi: altjóða politikkur og moralur .67
"Føroyar eru partur av vesturheiminum" .68
Moralsk skylda at revsa Russland .69
Nøkur mótargument .69
Niðurstøða .70

**4. SAMANUMTØKA:**

Er tíðin komin at skiljast? .73

**NOTUR**

Nota 1 .75
Nota 2 .76
Nota 3 – pakningur .78
Nota 4 .78
Nota 5: Miðal kiloprísur fyri Barentshavið .79
Nota 6 .81

**KELDULISTI .84**

# FORMÆLI

## Avgerðin um samstarvið við Russland kann ikki takast í duldum

Bæði moralskt og fíggjarliga er fiskiveiðuavtalan við Russland størsta og týdningarmesta politiska mál í Føroyum í løtuni. Hon snýr seg um ørandi mongdir av fiski, um nógv arbeiðspláss, nógvar pengar og grundleggjandi prinsipp. Kortini verða avgerðir um hana tiknar í duldum. Tað ber ikki til.

Við tí óprovokeraða álopinum á Ukraina er russiska stýrið farið longur, enn demokratiski heimurin kann góðtaka.

Russland hevur ikki bara broytt seg innlendis frá at vera eitt spírandi demokrati eftir at múrurin fall, til eitt reindyrkað diktatur, har bæði talu- og savningarfrælsið eru avtikin. Hesin diktaturstatur er eisini blivin hættisligur fyri síni grannalond. Og við stórálopinum á Ukraina tann 24. februar 2022, har ætlanin var at taka sjálvan høvuðsstaðin og leggja landið undir seg, fór Putin so langt, at øll demokratiskt sinnað lond og fólk máttu taka støðu. Tí hetta var ikki bara eitt álop á Ukraina og tess fólk, men á alla ta heimsskipan, sum síðani 1945 hevur tryggjað, at viðurskiftini landanna millum í Evropa hava verið skipað sambært lógum og reglum.

Føroyar eiga fult og heilt eiga at standa á síðuni hjá Ukraina. Hjá Vesturheiminum. Hjá ES-londunum. Hjá NATO-londunum. Ikki bara í orði, men eisini í verki eiga vit at verja tey virði, vit byggja á.

"Frælsi" er ikki eitt abstrakt hugtak. Tann, sum vitjar í einaræðislondum sær skjótt, at tað er púra ítøkiligt. At vera frælsur er at kunna tala frítt, savnast frítt, fara hvar mann vil, velja sínar leiðarar. Tann, sum hevur roynt nakað annað, veit, hvat frælsi merkir. Tað merkir nakað, sum fyri eitthvørt hugsandi menniskja ikki bara er heilt ófatiliga virðismikið, men púra avgerandi.

Vit eru heppin at vera fødd í einum frælsum landi í tí frælsi heiminum. Men hesin heimur er lítil og viðbrekin. Hann má standa saman - og vit mugu standa saman við honum. Vissi vit nýta "Smyril siglir kortini"-hugsanina, hví skulu onnur so ikki eisini tað?

Tað er í hesum høpinum, vit skulu síggja okkara samstarv við russiska diktaturið.

Tað gera tey allar flestu eisini. Føroyar hava tikið støðu við greiðum samtyktum í Løgtinginum, við at senda hjálp til Ukraina, við at taka ukrainsk flóttafólk og við at boða frá, at vit vilja vera partur av teimum tiltøkum móti Russlandi, sum ES setir í verk.

Útflutningurin til Russlands er eisini minkaður munandi, hóast hann ikki er brot á hesi tiltøk.

Eftir stendur fiskiveiðusamstarvið Russland – og fyrrverandi Sovjetsamveldið – ið vit hava havt síðani 1977, og sum gevur okkum rætt at fiska fyrst og fremst tosk, men eisini hýsu, rækjur og flatfisk í Barentshavinum, og gevur Russlandi rætt at fiska fyrst og fremst svartkjaft, men eisini makrel, sild og annað hjá okkum.



Í politisku skipanini er ymiskar meiningar um, hvørt tað politiskt og moralskt sæð er rætt at halda fram við hesum samstarvi ella at kvetta tað. Men greitt er, at allir samgonguflokkarnir undan valinum hildu mest tala fyri at steðga tí. Orsøkin til, at teir kortini tóku undir við at leingja avtaluna fyri 2023, var, at eingin fyrireiking var gjørd til umlegging av hesi vinnu.

Nú hava vit so eitt lítið ár til at fyrireika eina umlegging um tað er tað, vit vilja. Men taka vit ikki eina avgerð skjótt, verður støðan í heyst tann sama sum í fjør heyst.

Nøkur tala um, at tað politiskt er rætt at halda fram við samstarvinum, tí tað er við til at tryggja burðardygga veiðu og kann tryggja, at okkurt er at byggja á, ta friður einaferð aftur valdar. Russland fer jú ongan veg, og so ella so mugu vit samstarva í framtíðini.

Men nógv tann sterkasta grundgevingin fyri at halda fram, er búskaparlig. Tað snýr seg um inntøkur og arbeiðspláss.

Hetta er sostatt ein klassisk tvístøða. Skulu vit gera tað, sum er moralskt / politiskt er rætt – ella tað, sum búskaparliga gevur mest.

Vit kunnu siga, at hetta er ein vágskál, har moralur er øðrumegin og inntøkur hinumegin. Tí er einki óvanligt í. Bæði sum einstaklingar og sum lond viga vit konstant hesi hvørt móti øðrum, og eingin velur altíð moralin fram um. Og sum søguliga lýsingin av málinum í hesi frágreiðing vísir, so hevur hetta frá byrjan merkt orðaskifti um sáttmálan við Sovjet / Russland.

Endamálið við hesum riti er at geva eitt íkast til kjakið um, hvat tað er, sum liggur í teimum báðum skálunum.

Hví er tað moralskt skeivt at samstarva við Russland – um tað yvirhøvur er skeivt? Hvørjum gagnar tað at boykotta eitt land – um tað gagnar nøkrum? Hvønn rakar tað?

Og hinumegin: Hvussu sær fíggjarliga roknistykki av fiskivinnuavtaluni við Russland út? Hvussu nógv lata vit, hvussu nógv er tað vert við verandi prísum, og hvussu stór virði høvdu vit sjálv kunna skapt burturúr tí?

Í heyst, áðrenn avtalan fyri 2023 varð gjørd, lat táverandi landsstýrið gera eina útrokning, sum vísti, at avtalan við Russland fíggjarliga stendur upp og niður. Men eingin fekk innlit í hetta roknistykki, eingir faktorar blivu lagdir fram, og einki vinnulívsfólk bleiv spurt, hvørjir møguleikar kunnu vera fyri føroyskari virðisøking av tí fiski, vit lata Russlandi.

Formaðurin í Búskaparráðnum tosaði eisini greitt til fyrimunar fyri avtaluna, men legði ikki nógv fakta fram.

Tað er ikki ov nógv sagt, at fólk blivu hildin uttanfyri. Mín illgruni var – og er – at hetta varð gjørt fyri at forða fyri einum opnum orðaskifti um hetta sera stóra og avgerandi mál. Og tað kann als ikki góðtakast. Bæði politikarar og journalistar skuldu sett fram krøv um at fáa alt fram – men tað bleiv ikki gjørt.

Tað, sum hendi, fekk meg at hugsa um sonevnda "makrelstríðið" fyri 10 árum síðani. Áðrenn tað fóru ávísir persónar at tosa um, at vit fingu alt ov lítlan part av samlaðu makrelkvotuni í okkara part. Mælt var til, at seta krav um nógv størri part og at fara úr avtaluni, um hetta krav ikki varð eftirlíkað.

Eg sat á tingi, tá hetta byrjaði, og upplivdi tá hvussu tey reiðarí, ið livdu væl av táverandi avtalu, arbeiddu ímóti

hesi ætlan. Gjøgnum avtaluna fingu tey m.a. rætt at fiska aðrastaðni enn í føroyskum sjógvi, nógv bleiv selt í Norra, og úrslitini hjá hesum reiðaríum vóru frálík.

Tey ávarðaðu tá staðiliga politisku skipanina ímóti at gera nakað, sum kundi seta avtaluna í vanda, tí eitt var vist, søgdu tey: Bleiv endin, at vit endaðu uttan fyri avtaluna, sluppu vit ikki at fiska aðrastaðni – og at fiska makrel bara í føroyskum sjógvi var vitleyst. Tað var ov lítið til av makreli í Føroyum, tá hann var her var hann ov bleytur, og tað fór ikki at bera til at fáa líkinda prís fyri hann.

Men kampurin bleiv tikin, og vit endaðu uttanfyri avtaluna. Innibyrgd í egnum øki. Og tað bleiv ikki nøkur vanlukka. Her var nógv til, og prísurin bleiv betri og betri, so hvørt føroyskar fyritøkur gjørdu íløgur í egin virki. Tað er ikki ov nógv sagt, at tann trúgv uppá tað, sum var í okkara egna øki, hevur slóðað fyri einum stórum parti av tí búskapar- og fólkavøkstri, vit hava upplivað síðani.

Er støðan tann sama nú? Skulu vit tora at trúgva uppá, at tann uppsjóvarfiskur, vit lata Russlandi, kann skapa størri framburð í Føroyum, enn tann toskur, vit afturfyri sleppa at fiska í Barentshavinum?

Persónliga haldi nógv benda á tað.

Men latið okkum fáa eitt opið kjak um tað. Latið okkum fáa tingini fram í ljósið.

Millum tað, sum myndugleikar, vinnulív og onnur skulu taka støðu til, er hetta:

1. Í 1977, tá fyrsta avtalan við Sovjetsamveldið varð gjørd, hevði svartkjaftur lítið og einki virði. Hann varð umrøddur sum ″ónyttufiskur″, ″havsins rotta″ og sum ″sildaforskrekkjari″, tí hann órógvaði annan fiskiskap. Tí gav grundhugsanin í avtaluni meining: Bílig protein til russar, dýrur toskur, hýsa og seinni eisini rækjur til føroyingar. At russar fingu nógv størri nøgdir, gjørdi einki. Men síðani eru hesar fortreytir púra broyttar. Hvussu er búskaparliga javnvágin í dag millum tað, vit lata, og tað, vit fáa?
2. Landsbúskaparliga er tað skilabest at skapa virði og fáa virði til høldar so bíliga sum gjørligt og við so lítlari arbeiðsmegi sum gjørligt. Okkara ″virði″ í hesum sambandi, er fiskurin í okkara egna sjógvi, sum vit veksla við tosk í Barentshavinum. Fáa vit hetta virði – altso virðið á okkara egna uppsjóvarfiski – til høldar á bíligasta hátt við verandi skipan?
3. Sum er nýta vit ikki tann svartkjaft, vit sjálv fiska, til matna, og avreiðingarprísurin fyri hvørt kilo er lágur. Tað eru í Føroyum gjørdar stórar, drúgvar og dýrar royndir at virka svartkjaftin til eina dýra vøru – bæði á sjógvi og landi. Men tað hevur ikki eydnast serliga væl. Hví gekk tað ikki sum vónað? Og hvørjir møguleikar eru í dag fyri at nýta svartkjaftin á ein hátt, sum gevur betri prís, arbeiði á landi og størri inntøkur til samfelagið?
4. Hvørjar eru útreiðslurnar til olju, hýrur og annað í sambandi við fiskiskapin í Barentshavinum í mun til hvørjar hesar útreiðslur høvdu verið, um vit í staðin sjálv fiskaðu tann uppsjóvarfisk, vit lata?
5. Hvussu nógv virði skapa føroyskar fyritøkur, sum selja russarum vørur og tænastur, og hvussu nógv rinda russisk skip í havnagjaldi?
6. Almennir stovnar hava sjálvir sagt, at eftirlitið við russisku skipunum als ikki er nøktandi, og nógv verður tosað um, at hjáveiðan hjá teimum mongu russisku skipunum kanska er stór. Hvat skal til fyri at eftirlitið kann koma í rættlag? Og hvussu nógv kostar tað?
7. Í 2009 varð Skálaberg tikin av russiskum myndugleikum, og hildin í havnini í Murmansk í fleiri vikur. Tað var í friðartíð. Hvør er vandin fyri, at tað sama kann henda í eini krígstíð, har vestanlond hava lagt hald á nógvar russiskar ognir - millum annað skip?



8. Tað er ikki óhugsandi, at Russland sjálvt sigur upp fiskivinnuavtaluna við Føroyar. Føroya løgting hevur jú greitt fordømt Russland fyri álopið á Ukraina. Eiga vit at fyrireika okkum uppá, at hetta kann henda?

9. Kunnu russisku fiskiskipini brúkast til nakað ella hýsa onkrum, sum ikki hevur at gera við fiskiskap, men snýr seg um stríðið millum Vesturheimin og Russland?

10. Ið hvussu er tvey av reiðaríunum / samtøkunum, sum fáa okkara kvotu í Barentshavinum tillutaða, hava lutvíst útlendskar eigarar. Fer nakar partur av inntøkunum til hesi útlendsku feløg?

11. Føroyar hava sum mál at minka útlátið av CO2, og ”stuttflutt” varð ársins orð í fjørð, tí tað ræður um at flyta (mat)vørur so stutt sum gjørligt. Er tað, sæð í mun til ta málið, gagnligt at hava eina skipan, har russisk skip sigla til Føroya at fiska, meðan vit sigla upp í Barentshavi at fiska?

12. Okkara avtala við Russland gevur teimum loyvi at fiska í altjóða sjógvi norðanfyri Bretland, har hetta skapar ónøgd. Kann tað skaða okkara viðurskifti við Bretland?

13. Vit samanbera okkum ofta við Norra og siga, at vit umsita fiskin í Norðuratlantshavi saman við Russlandi. Siga vit avtaluna upp, kann tað tí ganga út yvir stovnarnar. Men er tað rætt? Norra umsitur Barentshavið saman við Russlandi. Sami fiskur svimur báðu megin markið. Heilt bókstaviliga. Hann er – sambært Norra – í mongum førum lítil, tá hann er russisku megin, og stórur, tá hann er norsku megin. Tí gevur tað meining fyri stovnsrøktina, at russar sleppa at fiska ”sín” fisk norskumegin. Hinvegin eru fleiri daga sigling úr Føroyum upp í Barentshavi – og vit og russar fiska hvør síni fiskasløg. Er samanberingin við Norra røtt?

14. Einaferð endar kríggið. Og Russland fer ongan veg. Vit skulu aftur hava samstarv við Russland í framtíðini, um tann alneyðuga felags umsitingin av Arktiska økinum yvirhøvur skal bera til. Tá alt samstarv er kvett, og nýggjar skipanir, við ongum samstarvi, komnar í staðin, verður trupult aftur at fáa í lag bindandi samstarv. Er tað, sæð í tí ljósinum, kanska í longdini politiskt skilagott, at vit varðveita okkara avtalu?

Henda lítla lýsing svarar als ikki øllum hesum spurningum. Ógvuliga langt frá tí. Men her verður ið hvussu er givið eitt boð uppá svar til nakrar av teimum.

Vónin er, at tað kann fáa ymist fram í ljósið, sum nú er dult. Tí samstarvið við Russland hevur sera stóran politiskan og búskaparligan týdning. Tað ber snøgt sagt ikki til, at avgerðir um hetta samstarv verða tiknar í blindum.

Nøgdirnar av uppsjóvarfiski, sum vit lata Russland fiska í føroyskum sjógvi, eru øgiligar. Tí er eisini neyðugt at vit seta fokus á, um hetta møguliga kann virðisøkjast av okkum sjálvum. Ikki minst tá tað eru vinnulívsfólk í landinum, sum siga júst tað: Loyv okkum at keypa rávøruna, so skulu vit skapa virðini!

Eg eri greiður um, at henda frágreiðing fer at vera kritiserað, so lat meg bara svara onkrum av tí væntaða kritikkinum beinanvegin:

Nøkur fara at siga, at eg sum fólkatingsmaður skal halda fingrarnar frá hesum, tí tað er eitt innlendis føroyskt mál, sum eg ikki skal blanda meg uppí.

Svarið er í fyrsta lagi, at vit liva í einum opnum, demokratiskum samfelag, har ein og hvør hevur fullan rætt til at blanda seg upp í øll tey samfelagsmál, hann hevur hug til. Feilurin er, at undanfarna landsstýrið gjørdi eina niðurstøðu uttan at leggja fram, hvussu alt hetta veruliga hongur saman – ikki at eg komi við einum íkasti.

Í øðrum lagi er svarið, at hetta ikki bara er eitt innlendis



føroyskt mál. Tað snýr seg um eina avtalu við Russland, sum tað er púra legitimur altjóða áhugi fyri, nú Russland hevur lagt á eitt annað land. Vit mugu kunnu siga fyri umheiminum hví vit gera, sum vit gera, eins og onnur lond t.d. mugu verja, hví tey halda fram at keypa gass úr Russlandi. Eg havi ikki sjálvur tikið okkara samstarv við Russland upp á fólkatingi ella í útlendskum miðlum, men eg verði spurdur um tað konstant. Tí er tað sum politiskt mál viðkomandi fyri meg í mínum starvi.

Tað fer eisini at verða sagt, at hetta rit er ov einsíðugt. At sjónarhornini hjá teimum reiðaríum, sum fiska í Barentshavinum, og teimum fyritøkum, sum selja russiskum skipum vørur og tænastur, manglar. At yvirlit yvir havnagjøld frá russisku skipunum manglar. At einki yvirlit er yvir tær inntøkur og tey arbeiðspláss, sum fiskurin úr Barentshavinum skapar á landi. At her sum heild eingin djúptøkin meting er av øllum tí virksemi, ið avtalan við Russland skapar, og sum breiðir seg sum ringar í vatni í føroyska búskapinum.

Svarið er – at tað er rætt! Men orsøkin er, at tað eru hesi viðurskifti, sum hava fylt nærum alt kjakið, ið verið hevur um avtaluna við Russland. Og tað eru hesi viðurskifti, sum eina og aleina hava stýrt teimum politisku avgerðum, sum eru tiknar. Vit hava bara fokuserað uppá tað, vit fáa. Vit hava næstan ikki gáa um tað, sum vit lata, og teir møguleikar, sum liggja í tí.

Tað er hetta, sum hevur manglað í kjakinum – og tað er orsøkin til, at eg taki okkurt av tí fram her. Endamálið er at fáa eina betri javnvág í.

Tað, vit eiga at spyrja okkum – umframt teir politisku og moralsku spurningarnar – er hetta: Um vit onga avtalu høvdu við Russland, og skuldu valt millum at gera eina ella lata vera – hvat hevði so verið búskaparliga skilabest? At lata tað, vit lata, fyri at fáa tað, vit fáa – ella at sjálv at fiska og virka tað, vit lata?

---

Frágreiðingin byrjar við eini lýsing av søguni um fiskivinnusamstarvið við Russland. Hon hevur týdning, tí tað er hon, sum uppá gott og ónt hevur ført okkum í ta støðu, vit nú eru í. Uttan at seta okkum inn í hana, skilja vit einki.

Síðani eru metingar av meira yvirskipaðum politiskum og filosofiskum slag um okkara ábyrgd í sambandi við kríggið í Ukraina, um sanktiónir sum amboð og tílíkt.

Tað berandi í frágreiðingini eru hagtøl. Fyrst eru nøkur, sum lýsa fiskiskapin hjá okkum og Russlandi, og sum vit hava fingið frá Vørn og Hagstovuni. Tað er tilskilað, hvørji tøl koma frá hvørjum.

Men almennu, generellu tølini siga ikki alla søguna, og tí er harumframt tilfar frá Árna Dam á Norðskála, ið á privatum grundarlag í mong ár hevur savnað saman hagtøl um fiskivinnuna. Eg havi vent mær til hann, tí hann var tann einasti, ið alment setti spurnartekin við tær útrokningar, landsstýrið bygdi á, tá avgerðin um at leingja avtaluna við Russland varð tikin í heyst. Tað er tilskilað hvørji tøl í hesi lýsing eru úr Árnasa privata savni av hagtølum. Eg havi ikki eftirkannað, um tey eru røtt. Men tey stava øll frá almennum keldum, og heldur onkur, at tey eru skeiv



ella brúkt á skeivan hátt, so eru viðmerkingar og rættingar meira enn vælkomnar. Endamálið er at fáa eina rætta mynd fram.

Vinnuligir møguleikar kunnu ikki gerast upp í statistikki, tølum og grafum. Vit akademikarar og politikarar skapa absolutt einki. Skulu virði og arbeiðspláss skapast, krevur tað íverksetarar, sum hava hugskot, síggja møguleikar, hava dirvi og árræði, og sum duga at sannføra onnur – ikki minst fíggingarstovnar – um at trúgva upp á seg.

Tí havi eg eisini tosað við ein mann, sum í verki hevur víst, at hann hevur hesar eginleikar: Eirikur a Húsamørk. Hann hevur við Høvdavirkinum í Leirvík skapt stór virði burtur úr nøkrum, sum onnur lítið ella einki virði sóu í: Høvd og ryggir á fiski. Hann hevur eisini funnið ein nýggjan marknað til hesa vøru: Nigeria.

Spurningurin, eg setti honum var ógvuliga einfaldur: Heldur tú, við støði í tínum royndum, at vit kunnu skapa líka stór ella størri virði úr tí uppsjóvarfiski, vit lata Russlandi, sum vit skapa úr tí toski, vit í dag fáa atgongd til við at lata russum henda uppsjóvarfisk.

Eg haldi, at sjónarhornið hjá Eiriki púra hevur manglað í orðaskiftinum higartil. Og eg skal leggja dent á, at eg havi tosað við onnur vinnulívsfólk, sum eisini síggja stórar møguleikar í okkara egna uppsjóvarfiski.

Til endans – og einaferð enn – kann onkur prógva, at tað er skeivt, sum stendur her, so kom við tí rætta!

Eg havi latið frágreiðingina gera, tí eg bleiv so provokeraður av, at føroyskir myndugleikar í heyst tóku eina sera, sera týðandi avgerð handan stongdar dyr og uttan at leggja nakað fram yvirhøvur.

Soleiðis kann mann ikki arbeiða í einum fólkaræði. Sum tað stendur á forsíðuni á Washington Post: Democracy Dies in Darkness.

Henda frágreiðing er mín ábyrgd, men hesi hava verið við til at gera hana: Ragnar Sjúrðarson hevur staðið fyri lýsingini av søguni um samstarvið við Russland, og Rebekka Manuela Behrens hevur eisini funnið fram hetta tilfar. Tór Marni Weihe hevur staðið fyri teirri yvirskipaðu politisku lýsingini av spurninginum um samstarv við Russland, og sett føroyska málið inn í altjóða høpi. Pætur Jákupsson hevur viðgjørt tølini og statistikkin og sett grafar og talvur upp í samstarvi við viðkomandi partar. Samrøðurnar við Árna Dam og Eirik á Húsamørk havi eg sjálvur gjørt. Uppsetingin er okkara ábyrgd – tølini hava vit fingið frá øðrum.

Samskipað verkætlanina við rættlestri, prenting, framløgu osv. hevur Jóan Pauli Dahl Jakobsen.

Sjúrður Skaale,
*fólkatingsmaður fyri Javnaðarflokkin*



# 1. PARTUR

# Eitt umstrítt samstarv

**Tá avtalan við Sovjetsamveldið varð gjørd í 1977, vóru partar av høgravonginum, sum hildu hana vera politiskt og moralskt forkastiliga. Vinstrivongurin vardi hana við búskaparligum argumentum. Í dag tykist vera øvut. Her eru nøkur kut úr søguni um eitt samstarv, har politikkur, moralur, trygd og religión frá byrjan hava verið sett upp ímóti fíggjarligum vinningi.**

Í gomlum døgum var fiskiskapurin í øllum heiminum fríur. Tað snúði seg um at fara út í heim at fiska – og fiska nógv. Lítlar og ongar avmarkingar vóru fyri, hvussu fiskiskapur kundi fara fram, uttan tær, ið náttúran setti.

Sum frá leið máttu fleiri og fleiri lond ásanna, at neyðugt var at avmarka fiskiskapin. Fiskimørkini eru stigvíst flutt út, og meginparturin av fiskileiðunum eru komnar undir yvirvaldsrætt hjá strandarlondum. Tað kravdi avtalur at fiska inni hjá hvør øðrum, og millumlanda fiskiveiðufelagsskapir, so sum NEAFC og NAFO, fóru at stýra fiskiskapinum í altjóða sjógvi.

Í 1977 kom ein nýggjur, altjóða havrættarsáttmálið í gildið fyri londini í Norðuratlantshavi, og Føroyar fingu egið fiskimark á 200 fjórðingar tann 21. desember 1976.



Føroysk fiskivinna hevði, síðan havfiskiskapurin av álvara tók dik á seg um ár 1900, dúvað nógv uppá fjarleiðir. Vit høvdu fiskað víða um í Norðuratlantshavinum, og søgan um føroyskan fiskiskap í Barentshavinum gongur eisini meira enn 100 ár aftur.

Tí var hetta ein kollveltandi broyting.

19. februar 1977 hevði Atli P. Dam, táverandi løgmaður, eina grein í Sosialinum, sum lýsir støðuna væl. Har segði hann m.a. soleiðis:

> **"Tað er ikki longur frítt at fara, og tað er ikki longur frítt at veiða óavmarkaðar nøgdir. Veiðuøkini, vit áttu saman við øðrum, eiga einstakir nú burturav, meðan okkara sjógv, sum aðrir troyttu í nógvar mannsaldrar, eiga vit burturav. Skal so fiskiveiða skipast so, at hvør bert roynir á sínum øki? Hetta vildi elvt til so kollveltandi broytingar at valla nakað land politiskt kann loyva sær burturav at útihýsa øðrum." (Dam, 1977)**

Atli Dam skrivaði víðari, at Føroyar, í tí øldini, bert høvdu veitt umleið 15% av veiðunøgdini – svarandi til 25-30% í virði – á egnum grunnum.


Støðan í fiskiveiðumøguleikum føroyinga

*Í lesarabrævinum hugleiðir Atli Dam eisini um framtíðarmøguleikarnar hjá føroysku fiskivinnuni, sum allir høvdu sínar vansar.*

Norra hevði áhuga fyri línu og garnaveiðu við Føroyar men ikki trolveiðu. Fiskasløgini teir veiddu, høvdu ikki alstóran áhuga fyri føroyingar, men hjá teimum eins stórt virði, sum toskaveiðan við Norðurnoreg og kraftblokka- og ídnaðarveiðan í Norðsjónum hevði fyri okkum.

Verri var við felagsmarknaðinum, sum tá var. Tey londini veiddu virðismiklan fisk undir Føroyum og vit ídnaðarfisk og sild og makrel til matna í Norðsjónum. Men londini í felagsmarknaðinum vóru ósamd innanhýsis, og fyrr enn greitt var, hvat vit sluppu at veiða hjá teimum og hvørjar nøgdir, bar illa til at fylla nakran karm í møguligum sáttmála.

Tað smakkaði føroyingum illa at lata tosk og hýsu, og semja var um, at vit skuldu lata sum minst av hesum fiskasløgum fyri at sleppa undan at avmarka veiðuna hjá teimum føroyingum, sum tá royndu teir stovnarnar. Men skuldu t.d. bretar inn í myndina, var ongin møguleiki uttan um at lata júst tosk og hýsu.

### RUSSAR FÁA ÁHUGA FYRI FØROYSKA SVARTKJAFTINUM

Ynskistøðan hjá táverandi stjórn var tí ein fiskiveiðusáttmáli við Sovjetsamveldið. Føroyingar høvdu longu í fleiri áratíggju áðrenn londini fingu egið fiskimark fiskað í sovjetskum sjógvi og kendu væl til virðismikla tilfeingið, sum har var. Russar høvdu somuleiðis fiskað í føroyskum sjógvi áðrenn avtalan kom í lag. Í Sovjet bleiv svartkjaftur brúkur til mannaføði, og fiskaðu russar í 1976 6.500 tons

av svartkjafti í føroyskum sjógvi. (Sosialurin, 1977). Atli Dam skrivaði soleiðis í sama sosiali 19. februar 1977:

> **"Russar hava sýnt áhuga fyri at veiða svartkjaft, langasporl og møguliga kongafisk undir Føroyum. Kunna teir lata nøkur túsund tons av toski í Barentshavinum, eiga vit at fáa sáttmála í lag við teir."**

Á sumri 1977 fóru samráðingar, eftir innbjóðing frá russum, í gongd millum Sovjetsamveldið og Føroyar. Hetta var somuleiðis ein tann fyrsta almenna innbjóðingin at vitja í einum stórum ríki, ið Føroyar sum land fingu.

Í august 1977 fór føroyska sendinevndin til tingingar við sovjetska fiskimálaráðharran, Alexander Ishkov og aðrar sovjetskar myndugleikar. Føroyska sendinevndin var mannað við Atla Dam, løgmanni, Peturi Reinert, landsstýrismanni, Einari Kallsberg, skrivstovustjóra, og André Niclasen, sum var tulkur á ferðini.

Tað var ikki eiti á blíðskapur, sum varð vístur frá russiskari síðu á russlandsferðini. Fyrst var føroyska sendinevndin í Moskva har hugt varð at býnum. So var nevndin í Murmansk í tveir dagar, áðrenn hildið varð fram til táverandi Leningrad, har uppihaldið vardi eitt samdøgur, áðrenn leiðin aftur gekk til Moskva.

Samráðingarnar hildu fram í Keypmannahavn í september og eftir fyrsta fundin var málið frá báðum pørtum, at sáttmáli skuldi skrivast undir í Havn í oktober mánað.

Føroyska sendinevndin heimafturkomin av Russlandsferð:

## Russar leggja stóran dent á at gera sáttmála við Føroyar

**Landsstýrið hevur gjørt greitt, at tað vil bíða við at gera ein sáttmála, fyrrenn tað liggur heilt greitt, hvat hann kemur at merkja í praktiskum fiskiskapi og fiskimøguleikum hjá báðum pørtum**



**Samráðingar i Moskva millum føroyskar og russiskar myndugleikar um fiskivinnuspurningar. Samráðingarnar halda fram i Keypmannahavn i september og i Føroyum i oktober, tá væntandi ein endaligur fiskivinnu sáttmáli verður gjørdur millum londini**

Atli Dam sigur i samrøðu við Sosialin, at ferðin var ógvuliga væleydnað og áhugaverd. Russar gjørdu nógv burturúr og sýndu føroysku sendinevndini stóran blíðskap. Vitjað varð fyrst i Moskva, har fyrst vóru fyribils samrøður við fiskivinnuráðharran Ishkov. Har varð avtalað, hvussu langt kann røkkast i hesi syftu viðvíkjandi avtalu um ein varandi sáttmála.

### Endaligur sáttmáli i oktober

Atli Dam sigur viðari, at undir hesum samrøðum varð greitt, at russar leggja ógvuliga stóran dent á, at sáttmálin kemur i lag. Hinvegin varð frá føroyskari síðu gjørt greitt, at tað liggur ikki væl fyri at gera ein sáttmála fyrrenn tað liggur greitt, hvat hann kemur at merkja i praktiskum fiskiskapi og fiskimøguleikum hjá báðum pørtum. Russar høvdu kanska vætnað, at sáttmálin fór at koma undir land i hesi syftu, men góðtóku, at ein tíðarætlan varð løgd fyri framhaldandi samráðingum og at miðað verður ímóti, at i oktober verður komið so langt við arbeiðinum, at ein endaligur sáttmáli kann gerast.

### Hittu umboð fyri fiskiidnaðin

Síðani varð hugt at býnum, Moskva, áðrenn um kvøldið varð farið til Murmansk. Har varð steðgað i tveir dagar, áðrenn hildið varð fram til Leningrad, har uppihaldið vardi eitt samdøgur. Seinasti dagurin á ferðini varð nýttur i Moskva, har meginparturin av degnum fór til samrøður við Ishkov, og ferðin endaði so við einum døgurða, sum Ishkov beyð føroysku sendinevndini til.

I Murmansk og Leningrad var høvi til at hitta umboð fyri fiskiidnaðin i hesum býum, og var serliga i Murmansk høvi til at gera seg kunnugan við framstigini, sum eru hend innan fyri sovjettiska fiskivinnu. Vitjað varð i havini i Murmansk, umborð á skipum av ymiskum slag og á ymiskum fiskavirkjum, saltingarvirkjum, flakavirkjum, hermertikkvirkum og embalasjuvirki til hermetikkiðdnaðin.

Eisini varð ein rættiliga drúgvur fundur hildin á fiskirannsóknarstovuni i Murmansk, har høvi var til at spyrja sovjettiskar visindamenn.

### Russar nýta allan fisk til mannaføði

Atli Dam sigur, at hesar vitjanir vóru sera áhugaverdar og sýndu, at russar á summum økjum eru ógvuliga frammarliga.

Tað, sum Atli Dam helt hevði størsta áhuga, var at siggja at russar til mannaføði nýta so gott sum allan fisk tei veiða, og at ein i fiskahandlum har kundi siggja fiskasløg, sum i vesturheiminum einans verður nýtt til mjølframleiðslu, leskiliga tilgjørd til mannaførði. Og tað forvitnisliga var annars tað, at ein stórur partur av hesum fiskasløgum er veiddur á djúpum vatni, so tað er eyðsæð, at russar her hava skip og teknikk, sum ger slíka veiðu møguliga, og at teir i hesum eru fremri enn føroyingar.

— — —

Annars hava vit i næsta blað meira um ferðina hjá føroysku sendinevndini, sum er ein tann fyrsta officiella innbjóðing Føroyar sum land hava fingið til at vitja i einum stórum ríki.

## Fundur um rækjukvotuna

Á fundi i Keypmannahavn seinasta friggjadag millum umboð fyri grønlendska landsráðið, Grønlandsmálaráðið, danska fiskimálaráðið, umboð fyri donsku fiskivinnuna og Føroya landsstýri varð støðan i rækjuveiðuni undir Grønlandi viðgjørd. Har kom fram, at veiðan i einum av teimum fýra veiðuøkjunum við Vestur-Grønland hevur verið so stór, at kvotan, sum var ásett á ICANF-fundinum á Tenerifa i desember 1976, er nærum uppfiskað. Tað er hitt sokallaða øki 3, sum liggur um Holsteinsborgleiðina, ið talan er um.

Talan var um at minka hesa veiðu soleiðis, at ovfisking ikki verður og ti tryggja, at fiskiskapurin fer meira fram á øki 1, 2 og 4 i staðin fyri, sum eru tey norðastu økini og tað syðsta. Fundur var i gjár við felagið fyri føroysku rækjuskipunum, men enn er einki frætt frá hesum fundi.

Russar løgdu sera stóran dent á at fáa sáttmálan í lag sum skjótast, meðan føroyingar vóru eitt sindur varnari og vildu fyrst hava greiðu á, hvat ein sáttmáli fór at merkja í praktiskum fiskiskapi og møguleikum, áðrenn avtalan skuldi undirskrivast. Russar góðtóku, at ein tíðarætlan varð løgd fyri framhaldandi samráðingum, har miðað varð ímóti at endaliga undirskriva sáttmála í oktober.




*Føroyska sendinevndin á Reyða torginum í Moskva. Sosialurin 27. august 1977.*

Í 1977 bóru sovjetsku fiskiskipini, eins og í dag, orð fyri ikki at fylgja reglunum um kvotuásetanir og veiða nógv meir enn teimum varð loyvt. Í sosialinum 27. august 1977 bleiv Atli Dam spurdur, um hetta var orsøkin til, at føroyingar vóru meira afturhaldandi enn russar, tá tað kom til at fáa sáttmálan skjótt í lag. Atli svaraði soleiðis:

> **“Nei, tað haldi eg ikki, og eg leggi ikki í at gera mær hugsan um, hvussu russar hava veitt fyrr á hesum økjum, men tað skuldi verið greitt, at innanfyri okkara lítla øki skuldi tað verið møguligt at fylgt við veiðuni hjá einum avmarkaðum tali av skipum.”**

Avmarkaða talið av sovjetskum skipum í føroyska sjóøkinum, sum Atli Dam her vísti til, var enn ikki alment, tí avtalan ikki bleiv skrivað undir fyrrenn tríggjar mánaðar seinni. Tá varð staðfest, at 12 sovjetsk skip fingu loyvið at fiska svartkjaft í føroyskum øki, og fimm skip sluppu at gera royndarfiskiskap uttanfyri 700 metra dýpdarlinjuna. (Sosialurin, 1977)

Áhugavert er, at tað í kjakinum í Føroyum í dag framvegis verður sáddur ivi um, hvørt russar fylgja kvotuásetingum. Munurin er, at hóast skipini í dag eru munandi effektivari enn tey vóru fyri 45 árum síðani, so er talið av russiskum skipum, sum hava loyvi at fiska í føroyskum øki, hækkað úr 12 upp í 30 skip, sambært Vørn. Tá vit í Spyr.fo kanning fyri kortum settu 700 føroyingum spurningin, um tey vistu, hvussu nógv russisk skip hava loyvi at fiska í føroyskum sjógvi, vóru tað einans 15% av teimum spurdu, ið svaraðu 26-30 skip.

Føroyingar vóru ovfarnir av, at russar vóru so altráir eftir at fáa svartkjaft, tí hugsanin var, at hann einans var nýtiligur til mjølframleiðslu. Atli Dam helt tað vera givið, at

vit kundu læra okkurt um viðgerð av svartkjafti av samstarvinum, men ivamál var, um tað yvirhøvur kundi løna seg fyri Føroyar at gera nakað við svartkjaft. Hann segði soleiðis við Sosialin tann 27. august 1977:

> **"Ivaleyst verður viðgerðin av fleiri av hesum fiskasløgum so dýr, at føroyingar ikki kunnu fara undir hetta. Arbeiðslønirnar eru sum kunnugt rættiliga høgar her hjá okkum, og marknaðurin fyri slíkum vørum er ógvuliga avmarkaður. Har eru russar í eini heilt aðrari støðu, (...) við tað, at teir hava ein marknað, sum telur 250 mió. menniskju. Men so smátt mugu vit kortini royna at fara handan vegin, og har hava vit nýtt nakað av peningi til at kanna møguleikarnar fyri at viðgera svartkjaft til mannaføði."**

Hetta er eisini áhugavert, sæð við dagsins brillum, tí frá 1977 til dagin í dag hava vit ikki ment okkum nógv tá tað um viðgerð av svartkjafti ræður. Royndir eru gjørdar, men tað hevur ikki eydnast okkum at fáa lønsemi í framleiðslu av svartkjafti til matna. Tann svartkjaftur, vit fiska, fer í størstan mun til mjøl, og tá kjakast verður um, hvørt vit eiga ella ikki eiga at samstarva við russar er langt ímillum at nevnt verður, at vit sjálv kundu fiskað tað, vit lata russum. Í staðin verður sagt, at um samstarvið við Russland verður steðgað, mugu vit fáa í lag fiskiveiðuavtalu við onnur lond, sum kunnu lata okkum tosk í býti fyri svartkjaftin hjá okkum.

### SÁTTMÁLIN VERÐUR UNDIRSKRIVAÐUR

Níggju mánaðir eftir lesarabrævið hjá Atla Dam í Sosialinum, varð ynski hansara útint, og Føroyar gjørdust fyrsta landið í Vesturheiminum, sum fór undir slíkt samstarv við Sovjet.



sosialurin Nr. 83 — 30. november 1977

**Føroyingar sleppa at gera fiskiroyndir í Barentshavinum**

**Rammusáttmáli um sínámillum fiskiveiðurættindi millum Føroyar og Russland undirskrivaður sunnudagin**

**Rammusáttmáli**

**Framtíðar-samvinna**

**Fiskað ov lítið í ár**

**Polarfrost millum bestu flakavirki í heiminum**

Avtalan varð gjørd í november 1977. Talan var tá um ein rammusáttmála, sum skuldi vera galdandi í 10 ár, og um avtalan ikki varð uppsøgd tá av øðrum ella báðum pørtum, so bleiv hon longd í seks ár afturat. (Sosialurin, 1977)

Avtalan frá 1977 loyvdi føroyingum í 1978 at veiða 8.000 tons av toski og 2.000 tons av flatfiski í Barentshavinum umframt 25.000-30.000 tons av lodnu.

Afturfyri kundu russar við 12 skipum veiða 50.000-60.000 tons av svartkjafti í føroyskum sjógvi.

Sáttmálin heimilaði eisini fimm russiskum skipum at gera royndarfiskiskap uttanfyri 700 metra dýpdarlinjuna, og føroyingar sluppu at gera royndir í Barentshavinum við fimm skipum. Hetta fekk týdning, tí rækja var eisini at fáa í Barentshavinum.

Sovjetski fiskivinnumálaráðharrin, Alexander A. Ishkov, segði avtaluna ikki bert snúgva seg um fisk, "men eisini um sál og hjarta fólksins." (Sosialurin, 1977)

Atli Dam segði "at hetta at sáttmálin er fyri 10 ár, prógvar, at partarnir síggja eina framtíð í samvinnuni."



SPURNINGURIN er, um vit við teimum 50 til 60.000 tonsunum av svartkjafti, hava goldið ov dýrt fyri tonsini í Barentshavinum. Men tað meta vit ikki. Hjá okkum er svartkjafturin ónyttufiskur, meðan toskurin og flatfiskurin eru virðismikil fiskasløg, sum geva lutfalsliga nógv meir í peningi.

EISINI ER at hava í huga, at vit í løtuni ikki eru so væl fyri, at vit sjálvir kunnu veiða tær heilt stóru nøgdirnar av svartkjafti. Her verður neyðugt við umfatandi og nágreiniligum royndarfiskiskapi fyrst. Í løtuni hava vit heldur ikki møguleika fyri at virka svartkjaftin til matna.

SAMANUMTIKIÐ má haldast, at úrslitið av fiskiveiðusamráðingunum millum Russland og Føroyar, er frálíkt.

EFTIR samráðingarnar segði løgmaður, at talan var um ein sáttmála við perspektivi í. Hesum kunnu vit av fullum huga taka undir við.

*Sosialurin – sum var málgagn Javnaðarfloksins – stuðlaði fult tí, sum formaður floksins hevði gjørt: Nevniliga at vinna føroyingum rætt at fiska tosk og flatfisk afturfyri at lata russum svartkjaft, sum blaðið kallaði "ónyttufisk". (Sosialurin, 1977)*

Men í 1977 vóru eisini atfinningar í móti fiskiveiðusamstarvinum við Sovjet. Bæði heima í Føroyum og úti í heimi varð funnist at avtaluni. Útlendskir miðlar hartaðu Føroyar og tosaðu um vantandi føroyskan loyalitet mótvegis felagsmarknaðinum.

Tann 29. november 1977 gjørdu Atli Dam, løgmaður, og Vilhelm Johannesen, blaðstjóri á Sosialinum, eina samrøðu við danska blaðið Information. Information spurdi, um landsstýrið hevði roynt at seta Evropeiska Felagsmarknaðin (EF) upp ímóti Sovjet fyri at vevja trygdarpolitikk uppí spurningin um veiðuna við Føroyar. Felagsmarknaðurin var marknaðarsamgongan í tí sum í dag eitur ES. Føroyar vórðu ikki innlimaðar saman við Danmark, og skuldu tí sjálvar royna at gera eina fiskivinnu- og eina handilsavtalu við EF. Atfinningarsami spurningurin kom í sambandi við tær tingingar, sum fóru fram í Føroyum fyrst í september millum felagsmarknaðin og Føroyar. Blaðið skrivaði, at føroyingar høvdu umhugsað at taka hetta við í samráðingarnar við tí endamálið, at felagsmarknaðurin skuldi gerast meira atkomuligur fyri føroyingar av trygdarpolitiskum orsøkum, tí vit nú høvdu gjørt fiskiveiðusáttmála við Sovjet.




Atli Dam svaraði, at tílikt ongantíð hevði verið uppá tal undir tingingunum við felagsmarknaðin, men viðgekk, at sjálvandi vóru trygdarsjónarmið vavd uppí ein sáttmála við Sovjet. Atli Dam legði afturat, at tað als ikki var óvanligt at hava sáttmálar við Sovjet, og at donsk og føroysk skip leingi høvdu veitt lið um lið við russisk skip.

Vilhelm Johannesen segði, at tað var ein vági við at leggja ov stóran dent á heimafiskiskapin, sum Tjóðveldisflokkurin eftir teirra meting gjørdi. Tað var trupult at lata støði undir fiskivinnuni vera eitt so avmarkað øki, segði hann:

> **“Vi har hidtil været vant til at fiske i Nordsøen, ved Shetlandsøerne, Canada, Grønland, Island, Norge og Sovjet. Vi har været vandt til at fange mange forskellige forekomster. Vi har en fiskerflåde, der er indrettet på dette. Vi har et fleksibelt langtgående fiskeri, som hvis en bestand forsvinder kan finde en ny. Hvis vi kun har fiskeriet ved Færøerne er vi låst fast, og hvis bestanden svigter eller ikke slår til, så har vi ingen alternativer. Endelig kræver det en ny fiskeflåde og det er dyrt”. (Information, 1977)**

Hetta er júst sama argument sum í dag verður brúkt sum verju fyri avtaluna við Russland. Ikki minst kann vísast til árið 2011, tá svartkjaftakvotan minkaði munandi, og føroyingur kortini fingu loyvi til at veiða á leið somu nøgd av toski í Barentshavinum.

Eisini helt Vilhelm Johannesen, at avtalan, føroyingar høvdu við felagsmarknaðin, einans var góð fyri annan partin. Tað var altso ein stór ósemja millum Føroyar og felagsmarknaðin. Føroyingar vóru av tí áskoðan at vit bert fingu ein snøkil í Norðsjónum, sum hevði nógv minni virði enn tann veiðan, ið felagsmarknaðurin hevði undir Føroy- um.

Eisini her er áhugavert at samanbera við dagsins kjak: Frá føroyskari síðu verður aftur og aftur sagt, at vánaliga atgongdin til ES-marknaðin er ein orsøk til, at Føroyar

eru so tætt knýttar at Russlandi bæði tá tað snýr seg um útflutning og fiskivinnu. Tá føroyingar verða hartaðir fyri at hava so tætt samband við Russland er svarið ofta: Jamen, gevið okkum so betri atgongd til Europa.

### HEIMSKENDUR KRISTIN LEIÐARI TIL FØROYA AT TALA ÍMÓTI SAMVINNUNI VIÐ SOVJETSAMVELDIÐ

Ein maður, sum bleiv ein stór høvuðpína fyri Atla Dam og hinar javnaðarmennirnar, sum vardu samstarvið við Sovjet, var rumenski lutherski presturin Richard Wurmbrand. Wurmbrand var í sjeytiárinum eitt talurør í Vesturheiminum fyri tey handan jarntjaldið, sum undir kommunistiskum harðræði máttu líða fyri sína trúgv. Sjálvur var hann fongslaður fyri sína trúgv frá 1948 til 1956 og 1959 til 1964.

Eftir at hann var leyslatin, livdi Wurmbrand av at ferðast kring heimin og prædika, og skriva bøkur og greinar, sum søgdu frá støðuni hjá teimum trúgvandi og øðrum, sum vóru kúgað í londunum eystanfyri. Sjálvur var hann vandur upp sum ung-kommunistur, og kendi tí ta kommunistisku hugsjónina og hennara praksis sum fáur annar.

Í mai mánað 1966 Fekk Wurmbrand høvi til at bera fram ein vitnisburð fyri eini trygdarnevnd hjá tí amerikanska senatinum. Á hesum fundinum lat hann seg úr yvir beltið fyri at vísa 18 djúp sár, sum hann hevði fingið í sínum 14 árum handan rimarnar í kommunistiska Rumenia. Um alt Amerika, Evropa og Asia bleiv hann róptur fyri eitt "livandi blóðvitni" og ein "Paulus handan jarntjaldið." (Sosialurin, 1977)

Og í 1966, tá hann var farin úr heimlandinum, samtykti kommunistiska stjórnin, at hann skuldi takast av døgum. Áðrenn tað hótti trygdarløgreglan í Rumenia fleiri ferðir við at taka lívið av honum, tá hann, sjálvt handan rimar, helt anda sín fnískan, og mál sítt beint um at bera ræðusøgurnar hjá teimum trúgvandi, ið vórðu pínd í navni kommunismunar.

Upprunaliga skuldi Wurmbrand vera í Danmark frá 15. september 1977 og eina viku fram. Men í staðin, hóast fleiri av heimsins størstu londum vóru í longum bíðirøðum til at uppliva hann, kom hann sjálvboðin til Føroya at nýta fýra dagar av tí ætlaðu danmarkarferðini. Tað kann ikki váttast, at einasta orsøkin til at Wurmbrand sjálvur valdi at koma til Føroyar, var tí at vit nú vóru á gáttini, sum tað fyrsta landið í heiminum, at fara undir fiskiveiðusamstarv við Sovjet. Men boðskapurin hjá lutherska prædikumanninum, tá hann reikaði kring alt landið, var greiður: fara tit undir eitt fiskiveiðusamstarv við Sovjetsamveldið, eru tit samsek í at halda kristnar fangar í Sovjet undir jørð!

Hansara vitjan hevði stóra ávirkan á kjakið um avtaluna, sum Atli Dam gjørdi stutt eftir.

### TOGTOGAN MILLUM ANDSTØÐU OG SAMGONGU

Orðadrátturin var serstakliga hvassur í tíðini eftir at fiskiveiðuavtalan við Sovjetsamveldið varð skrivað undir. Løgmansflokkurin var ídnastur at verja avtaluna, meðan hinir báðir samgonguflokkarnir, Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin, vóru meira friðarligir.

Tað vóru ikki trygdarpolitisk atlit, sum fyltu mest hjá teimum, sum vóru ímóti avtaluni. Argumentini hjá teimum, ið vóru mest ímóti, vóru fyrst og fremst átrúnaðarlig.

Tann einasti flokkurin, sum púra greitt var ímóti, var andstøðuflokkurin Framburðs- og fiskivinnuflokkurin, ið seinni bleiv umdoyptur Kristiligi Fólkaflokkurin. Hann fekk eitt umboð valt á løgting við valið í 1977.

Hans A. Joensen, ið var løgtingsvalevni fyri Framburðs- og fiskivinnuflokkin og seinni Kristiliga Fólkaflokkin gjøgnum 80`ini hevði sum dømi eitt lesarabræv í Dagblaðnum hin 21. oktobur 1977, sum hann kallaði *Hitt sosialistiska gosfjallið* er farið av rivna. Hann legði eftir Javnaðar- og Tjóðveldisflokkinum, ákærdi hesar flokkar fyri ikki at hava fingið eyguni upp fyri úlvum í seyðaskinni, og nevndi støðuna hjá teimum kristnu í Sovjet. Harumframt skrivaði hann um liberaliseringina, sum var farin fram í Føroyum, og knýtti hana at samstarvinum við Sovjet:

> **"Eg vildi so fegin rópt so hart, at hitt kristna fólkið vaknaði úr deyðans svøvni sínum, og vendi sær til Harran, áðrenn tað er úti við landi okkara og frælsinum her. Bardagin er ikki partapolitiskur, men andaligur!" (Joensen, 1977)**

Í meðan Framburðs- og fiskivinnuflokkurin hevði ein greiðan sovjetpolitikk, var Sambandsflokkurin kloyvdur í tveir partar. Málgagn Sambandsfloksins, Dimmalætting, gjørdi nógv burturúr vitjanini hjá Richard Wurmbrand, og nýtti hana til at stempla Javnaðarflokkin anti-kristiligan.

Ein tann fremsta sambandsrøddin, tá tað kom til at bólka Javnaðarflokkin saman við kommunistum og gudloysingum, var vinnulívsmaðurin Jørmund Vágadal. Stutt eftir vitjanina hjá Wurmbrand, hevði Jørmund tann 27. september 1977 eina grein í Dimmalætting har hann róði framundir, at Atli Dam var hálvur ella heilur KGB agentur.

Jørmund Vágadal skrivaði, hvussu hann var um at gráta um sjálvan seg, tá hann stóð frammanfyri slíkum mætum

vitni sum Wurmbrand. Síðani skrivaði hann, um hvussu vit vóru "um at missa okkara fólkaræði, tí Atli samstarvar við bolsjevikkarnar, sum pína Wurmbrand og hansara líðandi brøður eystan jarntjald". (Vágadal, 1977)

Men javnaðarfólk slerdu manngarð um løgmann, og lesarabrøv frá bæði høgtstandandi politikarum hjá flokkinum, umboðum frá valfeløgunum og vanligum javnaðarveljarum fyltu síðurnar í Sosialinum í fleiri dagar, har ákærurnar frá m.a. Jørmundi Vágadal blivu kveistraðar burtur.

Her eru nøkur fá dømi úr tí, sum bleiv skrivað í málgagni Javnaðarfloksins dagarnar eftir greinina hjá Jørmundi Vágadal.

> **"Gud viti hvat Wurmbrand hevði sagt til at verið tikin til inntekt fyri slíka einoygda sambandsagitasjón? Tvíðvorðið, Vágadal. Vel reinari vápn, næstu ferð tú herjar á Javnaðarflokkin og tá serliga løgmann okkara Atla Dam. Blanda ikki politikk og religión saman bert fyri at tæna partapolitiskum sambandssjónarmiði, tað mátti trúgvin verið ov góð til." (Samuelsen, 1977).**

> **"Tað verður trúttað niður í fólk, at ávísir persónar, ávís bløð og avísir politiskir flokkar eru antikristiligir. Tað verður næstan lagt upp til, at vit í Føroyum, ístaðin fyri flokksbýti, sum vit nú hava, skulu hava tveir bólkar – ein kristiligan og ein antikristiligan. Avleiðingarnar av hesum kunnu verða eitt nýtt Norður-Írland í Føroyum. Endin kann verða, at Føroyar gerst eitt Russland ella eitt Franco-Spania. Um eg var antikristin, so vildi eg sagt "drívi á hinir gomlu", men tað eri eg ikki, og tí vil eg enda við at siga: Gevist!" (Johannesen, 1977).**



## Politisk slagsíða

SEINASTU tíðina hevur ein útlendskur prædikumaður ferðast kring oyggjarnar. Hesin nevnist Richard Wurmbrand úr Rumeniu.

TAÐ, sum komið er frá hesum manni, bæði á fundum og í bløðunum, er meira merkt av politiskum virksemi enn nøkrum øðrum. Tað er týðuligt, at maðurin hevur eina politiska slagsíðu og hansara fremsta endamál hevur verið útspilling av ávísum politiskum sjónarmiðum. Sjálvur hevur hann sagt, at hann áður hevur verið uppreistarmaður og kommunistur, men at hann seinni er komin til ta niðurstøðu, at menniskjan er ónd.

HANN er síðani farin runt av ávara fólk móti hesum óndskapi. Men her hendir tað løgna, at sambært Wurmbrand og Jørmundi Vágadal eru tey óndu fólkini bert at finna í ávísum londum við kommunistiskum stýrislag. Vit hava hoyrt og lisið um allan óndskapin og allan devulskapin har. Men vit hava onki orð hoyrt um líknandi óndskap her í Vesturheiminum. Vit hava onki orð hoyrt um fasistastýrini hjá Adolfi Hitler, Mussolini og Franco. Vit hava heldur onki orð hoyrt um tey 30—40.000 fólkini, sum sita í fangatyppunum í Chile, og vit hava heldur onki hoyrt um óndskapin í Uruguay og øðrum Suðuramerikanskum londum.

MEN vit hava bitið merki í, at tey borgarligu bløðini í Føroyum, Dagblaðið og Dimmalætting saman við Jørmundi Vágadal hava gjørt sær dælt burtur úr hesi vitjan. Roynt verður at brúka henda prædikumann politiskt. Og í hesum sambandinum verður samráðingarferðin hjá løgmanni í Russlandi eisini nýtt. Sambært J. V. er tað ræðuligt, at vit hava samvinnu við eitt kommunistiskt land.

MEN nær hevur Jørmund Vágadal gjørt nakra viðmerking til amerikansk-russisku samvinnuna. Vit taka als ikki undir við kommunistiska stýrislagnum. Vit taka heldur ikki undir við kapitalistisku einaræðisstýrunum í ymiskum londum í Vesturheiminum, og minst av øllum taka vit undir við, at kristindómurin av Jørmundi Vágadal verður misbrúktur í politiskum leiki.

*Oddagrein í sosialinum, 24. September 1977.*

**PAULI ELLEFSEN MÁTTI VELJA SÍÐU**

Formaður Sambandsflokksins, andstøðuleiðarin og løgmansvalevni, Pauli Ellefsen, bleiv eftir hvassorðaðu skrivingina í Dimmalætting tráspurdur, serliga av blaðfólkum hjá Sosialinum, um hann var til reiðar at drepa hønina hjá Atla Dam, sum varp gullegg til føroyska samfelagið.

Kundi mann rokna við, at Jørmund Vágadal umboðaði almennu støðu Sambandsfloksins í hesum máli? Hevði tað verið rættari at avvíst hesi samvinnu og latið tey 6000 tonsini av toski gloppið okkum av hondum?

Í oddagreinini "Huldupolitikkur" hjá Sosialinum tann 9. november 1977 kroysti Javnaðarflokkurin Paula Ellefsen upp í ein krók. Antin skuldi hann taka frástøðu frá blaðnum, sum Sambandsflokkurin hevði síni partabrøv í, og sum arbeiddi fyri at gera hann til løgmann, ella mátti hann taka "tað seinasta grundarlagið undan føroyskum trolfiskiskapi á fjarleiðum." (Sosialurin, 1977)

## Huldupolitikkur

FYRI STUTTUM var nógv skriving í Dimmalætting um føroysku samvinnuna við Russland. Hendan skriving varð førd bæði av blaðnum sjálvum og av kendum sambandsmonnum.

Í SAMBANDI við hesa skriving, sum fyri stóran part eisini snúði seg um Russlandsferðina hjá løgmanni, settu vit formanni sambandsfloksins, Paula Ellefsen, nakrar spurningar.

VIT HAVA spurt Paula Ellefsen um tað var rætt av løgmanni at taka av innbjóðingini at koma til Russlands at vitja, um tað er rætt, at vit føroyingar hava samvinnu við russar, ella um vit heldur skuldu slept hesi samvinnu og harvið eisini slept teimum 6000 tonsunum av toski, sum vit árliga veiða í russiskum sjógvi.

FYRST SPURDU vit einaferð. Vit fingu onki svar. Bert orðavavstur og uttanumtos. Vit tóku so spurningarnar uppaftur og vístu samstundis á, at teir kundu svarast heilt stutt, annaðhvørt við einum ja ella við einum nei. Men hetta segði tað sama. Vit hava framvegis onki svar fingið.

UM SOMU tið vita allir menn, at allar fiskileiðir verða munandi skerdar, og at leiðirnar eystanfyri, t.v.s. í norskum og russiskum sjógvi, so at siga verða einasta álitið hjá verksmiðjutrolarunum í komandi árum. Tað hevur ti sjálvandi áhuga hjá monnum at vita, hvørja støðu ein so stórur flokkur sum sambandsflokkurin hevur í hesum máli.

MEN TAÐ tykist at vera ómøguligt at fáa hetta at vita. Her er myrkalagt. Her er talan um huldupolitikk við lit. Og tað er helst ikki so løgið, ti tekur sambandsflokkurin undir við hesi samvinnu, so hevur hann harvið tikið støðu ímóti negativu skrivingini í Dimmalætting og tað er ikki so lætt.

TEKUR HANN hinvegin ta støðu at vera ímóti hesi samvinnu, so vil sambandsflokkurin harvið ein politikk, sum tekur tað seinasta grundarlagið undan føroyskum trolfiskiskapi á fjarleiðum.

VIT MEGU koma til ta niðurstøðu, at alment hevur sambandsflokkurin valt onga støðu at taka og fyri hugsandi fólk er hetta eisini eitt svar.



Lørdag 12. november 1977. Dimma

# Lat onkran annan fara

Í oddagrein í Sosialinum nr. 77 (ivaleyst skrivað av løgmanni sjálvum) verður einaferð enn spurt, um Sambandsflokkurin heldur at tað var rætt av løgmanni at taka av innbjóðingini at koma til Ruslands, og um tað er rætt at vit føroyingar hava samvinnu við russar, ella um vit heldur skuldu slept hesi samvinnu við russar og harvið eisini slept teimum 6000 tonsunum av toski, sum vit árliga veiða í russiskum sjógvi.

Sosialurin hevur sett hesar spurningar fram fyrr, og sjálvt um undirritaði hevur givið Sosialinum svar uppá spurningarnar, so skrivar Sosialurin: »Men tað tykist at vera ómøguligt at fáa hetta at vita. Her er myrkalagt. Her er talan um huldupolitikk við lit«.

Munnu ikki allir føroyingar, bæði sambandsmenn og aðrir, vera samdir um, at er tað nakar politiskur flokkur, sum ikki hevur rikið hulduprolitikk, so er tað júst Sambandsflokkurin.

Burtursæð frá løgmanni sjálvum og blaðleiðsluni á Sosialinum, vita allir føroyingar, hvat Sambandsflokkurin stendur fyri og hvønn fiskivinnupolitikk hann gongur inn fyri.

Og fyri alt tað er tað ein stórur spurningur, um ikki eisini løgmaður og Sosialurin vita tað.

Tí hvat hevur Sosialurin fyri kortum sagt um hetta sama mál? M.a. segði leiðsla Javnaðarfloksins í Sosialinum nr. 66: »Tað var undir Sambandsfloksins leiðslu at vit tóku upp samvinnu við russar«. Víðari skrivar javnaðarleiðslan: »Og tað er valla meira enn fýra ár síðan, at ein landsstýrismaður úr Sambandsflokkinum var á samráðingarferð í Ruslandi.« Og somu menn enda við hesum orðum: »Men veruleikin er, at hendan samvinna (við russar) kom í lag undir leiðslu Sambandsfloksins, og at hon bæði er hildin og útbygd meðan Sambandsflokkurin hevur verið við í landsstýrinum«.

Tað sum beint omanfyri er endurtikið er ikki eitt »postulat« frá einum hvørjum reyputum sambandsmanni, men tað er sagt og skrivað av leiðsluni fyri Hin Føroyska Javnaðarflokkin, og tað so seint sum tann 1. oktober 1977.

Og nú bert ein góðan mánað seinri spyr javnaðarflokkurin fyri aðru ferð, um Sambandsflokkurin krevur, at vit skulu sleppa teimum 6000 tonsunum, sum javnaðarmenn siga vera úrslitið av tí arbeiði sum fyrst og fremst sambandsmenn hava avrikað.

Er hetta ikki býttisliga skrivað og spurt? Víst er tað so.

Sosialurin skrivar, sum omanfyri nevnt: »Her er myrkalagt«.

Tann maður, sum hevur skrivað oddagreinina í Sosialinum nr. 77, hevur uttan iva havt kenslu av myrkalegging.

Tá eg las hesa oddagrein kom eg at hugsa um søguna um smádreingin, sum á køksgólvinum hevði fingið hattin hjá pápa sínum niður um bæði oyru og eygu. Alt bleiv myrkt fyri honum og fór hann at gráta. Tá mamman hevði lyft hattin av aftur høvdi hansara, mutlaði pilturin við gráturødd: Nú mundu tit ikki funnið meg aftur, so myrkt alt var vorðið.

Hvat tað er, sum leiðsla Javnaðarfloksins hevur fingið smoykt niður um oyru og eygu síni, og hvør hevur skyldina, tað veit eg ikki.

Men spyr Javnaðarflokkurin meg, um løgmaður eigur at taka av einari nýggjari innbjóðing til at koma til Ruslands, so verður svar mitt ivaleyst hetta: Lat onkran annan fara, tí løgmaður heldur neyvan til ein túr afturát av hasum slagnum.

Pauli Ellefsen.

12. november 1977 svarar Pauli Ellefsen, við lesarabrævi í Dimmalætting, aftur uppá herferðina hjá Javnaðarflokkinum. Í greinini "Lat onkran annan fara" vísur Pauli á, at tað var Sambandsflokkurin, sum av fyrstan tíð tók upp samstarv við Sovjet.

Hetta er rætt. Í fimtiárunum, meðan Sambandsflokkurin hevði politisku leiðsluna í Føroyum, var ein føroyskur landsstýrismaður í Sovjetsamveldinum og samráddist um sølu av sild til Sovjet. Tað var eisini tá, at russar fingu loyvi til at nýta ávísar føroyskar havnir, eitt nú Fuglafjørð og Tórshavn. Síðani tá høvdu føroyskir fiskaútflytarar á hvørjum ári selt sild og onnur fiskasløg til Sovjet og onnur kommunistisk lond.

Pauli Ellefsen royndi sostatt onkursvegna at taka æruna fyri sáttmálan, uttan at svara um skrivingina í Dimmalætting hjá Jørmundi Vágadal. Og í staðin fyri at átala sjálva avtaluna, vendi hann við hesum orðum byrsumúlanum móti Atla Dam persónliga:

> **"Men spyr Javnaðarflokkurin meg, um løgmaður eigur at taka av einari nýggjari innbjóðing til at koma til Russlands, so verður svar mítt ivaleyst hetta: Lat onkran annan fara, tí løgmaður heldur neyvan til ein túr afturat av hasum slagnum." (Ellefsen, 1977)**

Akkurát hvat Pauli sipar til tá hann sigur, at Atli Dam neyvan hevði hildið til ein túr afturat av hasum slagnum, kann ein bara gita um.

## TÁ FISKIVEIÐUAVTALAN SKULDI LEINGJAST 1987

Hóast mangir harðir orðadráttir vóru í tíðini beint eftir, at Føroyar vóru farnar at samstarva við Sovjet, var ein rímiliga breið politisk semja í Føroyum um fiskiveiðusáttmálan síðst í sjeytiárunum og inn í 80`ini. Meirilutin av politisku skipanini í Føroyum stóð saman um at verja umstríddu avgerðina fyri útheiminum tey fyrstu 10 árini av fyrsta rammusáttmálanum.

Einans ein flokkur var alla tíðina greitt í móti hesum samstarvinum. Tað var gamli Framburðs- og fiskivinnuflokkurin, sum í 1985 varð umdoyptur til Kristiligi Fólkaflokkurin og við navninum fekk ein greiðari virðiskonservativan samleika. Frá 1985 til 1989 sat flokkurin í

landsstýrinum saman við Javnaðarflokkinum, Sjálvstýrisflokkinum og Tjóðveldinum undir leiðslu av Atla Dam. Hetta var valskeiðið, har avgerð skuldi takast um, hvørt rammusáttmálin við Sovjet frá 1977 skuldi leingjast.

Tað vóru ikki mild orð, ið tey, ið vóru fyri hesum, fingu kastað eftir sær frá Adolfi v. Hansen, tingmanni fyr Kristiliga Fólkaflokkin, tá sáttmálin skuldi góðkennast av Føroya Løgtingið í februar 1987.

Enn einaferð var tað kristni átrúnaðurin, sum talaði so sterkt ímóti at hava fiskiveiðusamstarv við Sovjet. 18. februar 1987 hevði Adolf V. Hansen eitt lesarabræv í bløðunum við tí boðskapi, at føroyingar góvu Sovjet og táverandi leiðaranum, Gorbatjov, eina hjálpandi hond til at niðurberja religiónina.



# Skulu føroyingar hjálpa Gorbatjov at niðurberja religiónina?

Ein av komandi døgunum skal Føroya Løgting atkvøða um góðkenning av sínámillum fiskivinnusáttmála føroyinga við Sovjet. Undirritaði ætlar sær ikki at atkvøða fyri hesum sáttmála, og vil eg við hesum koma við eini frágreiðing um hví.

Føroyar krýna seg við heitinum »ein kristin tjóð«, og tað er út frá einum kristnum sjónarmiði, at tað niðanfyri skriva skal metast. Støða mín um ikki at atkvøða fyri russarasáttmálanum er tikin út frá einum kristnum sjónarmiði. Fyri meg er hetta ein samvitskuspurningur.

Ein og hvør bilateralur fiskivinnusáttmáli er gjørdur til eina sínámillum menning (fíggjarliga uppbygging), og so er eisini við sáttmálanum millum Føroyar og Sovjet. Við hesum sáttmála eru russar við til at menna okkum føroyingar og við við til at menna russar, t.v.s. stýrið í Kreml, hvørs leiðari er Gorbatjov.

Í september 1986 var ein grein í Pravda, har sagt verður, at neyðugt er at venda aftur til Lenins sonnu læru, og at russar tí mugu gera alt fyri at **niðurberja religiónina**. Tað var ikki Gorbatjov sjálvur, sum skrivaði hesa grein, men hon stendur sum sannleikin (orðið »pravda« merkir sannleiki) um støðu Sovjetsamveldisins til religión og harvið til kristindóm.

Okkum nýtist ikki bert at lurta eftir Pravda, men kanska skuldu vit eisini lurta eftir, hvat sjálvur leiðari Sovjetsamveldisins, Gorbatjov, sigur um kristindómin, ella rættari um religión sum heild.

Tann 24. november 1986 var Gorbatjov á veg til India á almenna vitja. Júst henda dag helt hann eina røðu fyri flokksleiðarum og kommunistiskum starvsfólki í Tasjkent, ið er høvuðsstaður í einum av teimum syðru sovjettjóðveldunum. Innihaldið av taluni var, at nú skuldi **kampurin móti religiónini herðast**. Henda røða varð hildin fyri afturlatnum hurðum, men talan er endurgivin í Pravda Vostoka, sum merkir »Sannleiki eysturlandanna«.

Her er soleiðis ikki bert talan um, at onkur hissini undirleiðari í Sovjet talar um at **niðurberja religiónina**, men so sanniliga hevur eisini sjálvur leiðari Sovjetsamveldisins, Gorbatjov, tikið lut í eggjanini til hesa niðurberjing av religiónini.

Spurningurin, eg setti mær sjálvum í sambandi við fiskivinnusáttmálan við Sovjet, var: **Skulu vit føroyingar vera við til at menna Sovjetsamveldið til at herða stríðið móti teimum trúgvandi og við sínámillum sáttmála menna Sovjet til at niðurberja religiónina?**

Svarið var einfalt nei. Og mín áheitan til allar tingmenn skal vera: **Mennið ikki Sovjet til at niðurberja religiónina**. Atkvøðið ikki fyri hesum sáttmála, fyri at vit føroyingar framvegis (í hjartanum) skulu kunnu krýna okkum sum ein kristin tjóð, og ikki av øðrum skulu kunna verða krýndir sum tjóðin, ið menti Sovjet **at herða kampin móti teimum trúgvandi**.

Sanniliga ein stór ábyrgd.

Tórshavn 16. februar 1987

**Adolf V. Hansen**

Mikhail Gorbatjov, floksleiðari

Hóast Adolf Hansen sat í samgongu, atkvøddi hann ikki fyri sáttmálanum við hesi grundgeving:

> **“Føroyar krúna seg við heitinum “ein kristin tjóð” og tað er útfrá einum kristnum sjónarmiði, at niðanfyri skrivna skal metast. Støða mín um ikki at atkvøða fyri russarasáttmálanum er tikin útfrá einum kristnum sjónarmiði.” (Hansen, 1987)**

Adolf var av tí greiðu sannføring, at handlaðu vit við Sovjet, so vóru vit við “til at herða kampin móti teimum trúgvandi og við sínámillum sáttmála menna Sovjet til at niðurberja religiónina”.

## NJÓSNING OG MANNARÆTTINDABROT

Umframt argumentini um kristindóm og heiðinskap blivu argument um mannarættindi og njósning nú eisini nýtt av andstøðingum til samhandilin við Sovjet.

**Fiskivinnuavtalan við Sovjet snýr seg um annað enn fisk**

— Fiskivinnuavtala føroyinga við Sovjet kann í eini kreppustøðu tryggja russum fult vald á Føroyum. Til tíðir eru upp til tríggjar ferðir so nógvar russar í Føroyum enn danskar militerpersónar, meta NATO-keldur.

— Tað liggur annað enn fiskur aftan fyri avtaluna, serliga frá sovjettiskari síðu, siga somu keldur við enska blaðið The Economist.

*Grein úr Dagblaðnum 20. Januar 1988*

Ó.J. Rólantsson á Dagblaðnum, málgagni Fólkafloksins, var ein, ið setti dám á kjaki í 80'unum, men við øðrum argumentum enn kristindóminum. Serliga vísti hann á sovjetska njósning og mannarættindabrot.

Í Dagblaðnum 27. januar 1988 skrivaði Ó. J. Rólantsson, at Dagblaðið ongantíð hevði skrivað, at sáttmálin við Sovjet ikki var búskaparliga góður fyri Føroyar. Men hann vísti síðan á vandan við at binda seg ov tætt fíggjarliga at Sovjet, tí vansin kundi vera, at vit gjørdust so bundin at hesum landi, at tað ikki fór at vera møguligt at sleppa burtur úr samstarvinum. Hann legði afturat, at Sovjet hevði ábyrgdina av heimsins størsta fólkamorði, og at Sovjet kúgaði ein part av heiminum. At enda skrivaði hann:

> **"Enn havi eg persónliga í øllum lítilætni saman við einum fátali frælsi til at boykotta Sovjet og alt, ið haðani kemur, veri tað seg fiskur, Lada ella Kaviar". (Rólantsson, 1988)**

Stóra altjóða tíðarritið The Economist tók eisini málið upp, og skrivaði tann 16. januar 1988 um valdið Sovjet kundi fáa í Føroyum og vísti til keldur hjá NATO, ið mettu, at tað til tíðir vóru upp til tríggjar ferðir so nógvir russar í Føroyum enn donsk hernaðarfólk.

> **"Although the Faroese regard the agreement with the USSR purely as a fishing agreement, there is concern among Nato analysts that the agreement and the location of the Danish-owned Faroe Islands in the north-east Atlantic poses a threat to Nato's security. Nato analysts argue that the Soviet Union, which has been granted permission to have repair work done to its fishing vessels at two of the three Faroese shipyards, could conceivably build up a Soviet task force and take over the islands before Nato had a chance to react." (Economist, 1988)**

## BÚSKAPARLIGU ARGUMENTINI VUNNU

Í aftursvari til skrivingina hjá m.a Ó. J. Rólantssyni greiddi javnaðartingmaðurin Frank Davidsen tann 23. januar 1988 frá teimum búskaparligu ágóðum, føroyingar fingu við at samstarva við Sovjet. Lesarabrævið hjá Frank Davidsen frá 1988 lýsir væl afturvendandi tónan, sum vinstravongurin brúkti í 80'unum.

Brot úr lesarabrævinum "Fullkomiliga burturvið at draga religión og stýrisskipanina í Sovjet inn í fiskisáttmálan.

Gera vit eina leysliga metan um, at hesi 21.000 tonsini av ráfiski geva 8000 tons av saltfiski, so sigur tað mær so mikið, at um tað fáast kr. 30,- fyri kilo, kemur tað at geva ti føroyska samfelagnum ein ágóða uppá 250.000.000 kr. ella 1/4 milliard kr. Helst fer tað at tátta út ímóti teimum 300 mill. kr., um prísurin verður eitt sindur hægri.

Tað seinasta, sum er hent, er, at málgagn fólkafloksins leggur upp til, at vit skulu kvetta samstarvið við Sovjet. Ja well, so vita vit tað. Fólkaflokkurin leggur so stóran dent á sitt russarahatur, at hann vil forkoma okkum fiskirættindini í sovjetiskum sjógvi.

Sum øll vita, er tað við at koma ein linni ímillum Sovjet og Amerika.
Um nú russarar siga sáttmála upp eftir trýsti frá Amerika ella um russarar sjálvkravdir slíta sáttmálan, um hesin verður ein meinbogi millum stórveldini!!! Fáa vit tá fiskin frá NATO??

Um vit samanbera kjakið um fiskiveiðuavtaluna við Sovjet í 1980'unum við kjakið, sum hevur tikið seg upp um somu avtalu síðani russisku innrásina í Ukraina, eru bæði áhugaverdir líkleikar og áhugaverdir munir.

Tað sást aftur á retorikkinum í seinnu helvt av 80`unum, at trygdarpolitisk viðurskifti vóru farin at fylla alsamt meira í politiska landslagnum í Føroyum. Átrúnaðarligu argumentini byrjaðu at fána, og spurningurin, um hvar Føroyar skuldu standa trygdarpolitiskt, setti sín dám á politiska orðaskifti. Orsøkin til tann vaksandi atfinningarsama tónan hjá Dagblaðnum mótvegis fiskiveiðusamstarvinum við Sovjet miðskeiðis í seinnu helvt av 80`unum, kann knýtast saman við fólkafloksins kúvending í NATO spurninginum. Á landsfundi í desember 1986 staðfesti flokkurin, at "sannleikans stund í NATO-málinum" var komin, og floksins almenna støða í NATO-spurninginum, snaraði 180 stig. Tann 8. desembur 1986 refereraði Dagblaðið soleiðis av landsfundinum:

> **"Eftir drúgva umhugsan og djúpa sjálvsrannsakan samtykti landsfundur Fólkafloksins leygardagin at sleppa tí støðu, flokkurin hevur havt í nógv ár í samsvari við tær løgtingssamtyktir, hann sjálvur hevur sett fram og atkvøtt fyri í síni tíð, at kúvenda og fult og heilt at taka undir við føroyskum stuðli til NATO." (Dagblaðið, 1986)**

Meðan Fólkflokkurin, við serliga Óla Breckmann á odda, tók leiklutin sum forsprákari fyri NATO, vaks mótstøðan móti NATO í Javnaðarflokkinum. Sæð í bakspegli hevði Atli Dam, løgmaður, neyvan nakað annað val enn at finnast at NATO sum felagsskapi. Tí skuldi Javnaðarflokkurin framvegis tvíhalda um fiskiveiðuavtaluna við Sovjet sum eina praktiska og vinnuliga avtalu, sum kom væl við hjá hart sperda føroyska búskapinum, bar samstundis ikki til at taka undir við verjusamgonguni NATO, tá boðskapurin var so greiður mótvegis føroyska samhandlinum við Sovjet. Atli Dam segði greitt, at NATO skuldi ikki blanda seg upp í føroysk handilsviðurskifti við Sovjet, men í staðin átti at givið føroyingum betri møguleikar at fiska í sjóøkinum hjá NATO-londunum:

> **"NATO skulle ikke tage for givet, at de kan lade os sulte ihjel, samtidig med at vi skal ofre blod, liv og helbred og økonomisk effektivitet for at være del af denne sammenslutning (NATO)." (Jensen, 2004)**

Um vit spola fram, er líkleikin at tað á sama hátt eru fólk í dag, sum seta moralsk / politisk atlit upp ímóti tí búskaparliga vinningi, vit hava av avtaluni. Munurin er, at meðan tað tá serliga vóru fólk á høgravonginum, sum hildu samstarvið verða politiskt ella moralskt skeivt, so hava tað síðani Russland gjørdi innrás í Ukraina kanska serliga verið fólk vinstrumegin miðjuna, sum hava ført fram politisk og moralsk argument móti samstarvinum við Russland. Tá rættvísgjørdi vinstrivongurin samstarvið við búskaparligum argumentum. Nú ger høgrivongurin tað sama.

Í dag eitur flokkurin, sum greiðast markerar seg sum garanturin fyri fiskiveiðuavtaluni við Russland ikki Javnaðarflokkurin, men Fólkaflokkurin. Fólkafloksins greiða støðu-

takan í NATO spurninginum á landsfundinum í 1986 sæst ikki aftur í verju- og trygdarpolitiska kjakinum í dag. Eins og hjá

Javnaðarflokkinum síðst í 1970`unum og í 1980`unum, viga búskaparligu ágóðarnir av fiskiveiðuavtaluni við Russland meira fyri Fólkaflokkin enn at verju- og trygdarpolitiskt svørja Vesturheiminum og NATO trúskap.

Óli Breckmann var maðurin, sum myndaði fólkafloksins verju- og trygdarpolitikk afturi í 80`unum, bæði sum blaðstjóri á Dagblaðnum og sum løgtings- og fólkatingsmaður. Seinastu árini hevur sami flokkur havt ein annan mann, ið greitt hevur talað harðast, tá kjak hevur stungið seg upp um verju- og trygdarpolitikk. Tann maðurin er samanlagt størsti atkvøðuslúkur fólkafloksins, síðan Føroyar blivu eitt valdømi, Jacob Vestergaard og við hansara útsagnum er verju- og trygdarpolitiska hamskiftið hjá Fólkaflokkinum veruliga komið til sjóndar.

Eitt greitt dømi um broytingina í Fólkaflokkinum var tann 6. oktober 2020, tá Jacob Vestergaard á tingsins røðarapalli segði hesi orðini: ”Tað er hugstoytt at hoyra, at mann skal verja Føroyar móti Russlandi. Og so skal tað vera ágangur móti Føroyum tí nøkur russisk flogfør hava verið í føroyskum loftrúmi. Eg kundi ikki skitið meira á tað fyri at brúka eitt ljótt orð. Um teir so vóru her hvønn dag.” Jacob Vestergaard var eisini í útvarpstovuni tann 8. februar 2022, tá 100.000 russiskir hermenn stóðu klárir at leypa á Ukraina, og allir heimurin helt ondini. Her eru nakrar av útsagnunum hjá fólkafloksins umboði úr uttanlandsnevndini tann dagin:

> **”Vit skulu ikki býta heimin upp í vinir og fíggindar. Tað hava vit slett onga grund til.” “Spyrt tú meg, so havi eg ikki brúk fyri nøkrum radara, eg havi ongan fígginda her í norðuratlantshavinum.” “ Eg havi funnist at, at vit skýra russar sum okkara fíggindar. Eg haldi at tað er pátikið frá donskum politikarum, tí teir mála russar sum fíggindar hvønn evig einasta dag. Russar hava ikki verið okkara fíggindar.”**

Tann 24. februar, morgunin eftir at Russland hevði lopið á Ukraina, helt Jacob fast við, at Føroyar ikki eiga at velja síðu millum NATO og Russland. Hann segði m.a soleiðis í KVF “Ordiligar skyldur í heimssamfelagnum hava vit ikki, fyrrenn vit eru ein sjálvstøðu tjóð, lat tað vera sligið heilt fast.”

Tá Jacob Vestergaard fór frá sum landsstýrismaður kom Árni Skaale, ið var eitt politiskt púra óskrivað blað, í hansara stað. Men linjan fyri hvat signal Føroyar skulu senda í orrustuni millum Russland og Vesturheimin hevur verið neyvt tann sama. Hetta sást eitt nú í degi og viku hin 02.08.22:

> **“Eg haldi, at Føroyar ikki skulu velja sær vinir og fíggindar. Eg haldi, at vit tæna bæði okkum sjálvum og øðrum best við at tosa við fólk, við at vera saman við fólki og ikki at ekskludera fólk.”. Spurdur um hetta eisini var galdandi, hóast fólkini vóru í kríggi, var svarið: “Ja, sjálvt um tey eru í kríggi”.**

Hetta skal tó ikki misskiljast so, at Fólkaflokkurin ikki ynskir at Føroya skulu hoyra til Vesturheimin longur, ella at flokkurin ikki tekur undir við verjusamgonguni NATO, men áhugavert er at hyggja at líkleikunum í søgugongdini. Javnaðarflokkurin í 1980`unum og Fólkaflokkurin í dag kunnu heldur ikki heilt samanberast, tí meðan Javnaðarflokkurin í 80`unum fór beinleiðis í andstøðu til NATO, er Fólkaflokkurin farin frá at vera størsti NATO stuðulin í Føroyum, til at liggja nærri at miðjuni í NATO spurninginum. Neyvan var tað av tilvild, at Javnaðarflokkurin, sum í 80`unum gekk mest inn fyri fiskiveiðusamstarvinum við Sovjet, broytti politiska støðu í NATO spurninginum. Og neyvan er tað av tilvild, at fólkafloksins NATO retorikkur er broyttur, nú Fólkaflokkurin er tann flokkurin, ið talar greiðast fyri fiskiveiðusamstarvinum við Russland.

Tá avgerðin um NATO radaran skuldi takast í 2022 kom eisini greitt til sjóndar, hvussu Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin hava flutt seg á verju- og trygdarpolitiska barometrinum. Fyrst atkvøddi Fólkaflokkurin nei til ynski frá andstøðuni um at leggja hetta týðandi málið fyri Løgtingi. Í staðin skuldi Uttanlandsnevnd Løgtingsins siga nei ella ja til, at Jenis av Rana kundi gera avtaluna um radaran.

Fólkaflokkurin hevði tvey umboð í nevndini, sum saman við tjóðveldinum atkvøddu nei. Um Javnaðarflokkurin ikki atkvøddi við samgonguni, hevði danska stjórnin fingið eitt nei úr Føroyum til at seta upp NATO-radaran. Aksel v. Johannesen, ið var limur í uttanlandsnevndini, segði eftir atkvøðugreiðsluna tann 9. juni 2022, at í radaramálinum hevði Javnaðarflokkurin valt ábyrgd fram um partapolitikk. ”Orsøkin til, at Javnaðarflokkurin hevur sagt ja til radaran, er tann, at ongin ivi skal vera um, at Føroyar eru ein partur av demokratiska vesturheiminum”.

## ATLI DAM HEIÐRAÐUR AV RUSSUM FYRI SÍN LEIKLUT Í SAMSTARVINUM



6 tíðindablaðið Nr. 207 – 30. OKTOBER 1997

*Atli P. Dam, fyrrverandi løgmaður:*

**Tað varð nevnt heiðinskapur**

*- Tað var ikki nøkur løtt avgerð, tá vit í 1977 tóku upp fiskivinnusamstarv við Sovjetsamveldið, sigur Atli P. Dam, sum nú hevur fingið medalju frá russiska fiskivinnumálaráðharranum fyri avrikið*

RANDI JACOBSEN

at royna hetta samstarv

*Atli P. Dam og Bozena Rasmussen vórðu bæði heiðrað fyri avrik síni í samstarvinum millum Føroyar og Danmark. Atli Dam fyri at hann sum løgmaður í 1977 tók stig til fiskivinnusamstarv millum Føroyar og Sovjetsamveldið, og Bozena Rasmussen hevur í áravís verið tulkur og hevur tí eisini verið við í mongum samráðingum. Tá Atli P. Dam fríggjadagin fekk sína medalju, var fylgiskjalið skrivað á russiskum, sum Bozena so týddi Mynd: Jens Kr. Vang*

20 ár eftir, at Føroyar tóku upp fiskiveiðusamstarv við Sovjetsamveldið, varð fyrrverandi løgmaðurin Atli Dam saman við Jákupi Hansen, Kjartani Hoydal, Árna Dam, Julionnu Klett og Bozenu Rasmussen, heiðraður av russiska fiskivinnumálaráðharranum fyri avrikið í 1977.

Vanlig siðvenja er, at javnaðartingfólk ikki taka móti medaljum ella ordanum, sum fólk vanliga fáa fyri at røkja eitt starv í longri tíð. Men Atli Dam segði við Sosialin 30. oktober 1997, at medaljan bert var ein viðurkenning fyri eina avgerð, hann var við til at taka, og tí var tað rætt at taka móti henni.

Atli viðgekk í greinini vandan, sum var við njósning, men segði, at politiskar ætlanir aldrin skuldu tvinnast saman við búskaparligum ætlanum.

Atli Dam segði eisini, at mótstøðan einans var politisk: "Ongantíð vóru trupulleikar við at fáa vinnulívsfólkini at taka undir við samstarvinum."

Í endanum av greinini hugleiddi fyrrverandi løgmaðurin um framtíðarsamstarvið við russar, sum hann var lykilin til at fáa í lag fyri tá 20 árum síðani.

"Tað tykist liggja í kortunum, at tað demokratiska Russland hevur samvinnu fyri neyðini, eitt nú um at menna nýggja tøknfrøði, nýggj virki og nýggj skip. Tungt er hjá teimum einsamøllum at gera hetta, og tað má tí í stóran mun gerast í samvinnu við vesturlendsk feløg. Har eru vit ikki so væl fyri beint nú", segði Atli Dam. (Sosialurin, 1997)

### FØROYSKIR SJÓMENN TIKNIR

Norska reiðarafelagið heitti í fjør vár á norsk skip um ikki at fara í russiskt sjóøki, men sum tíðin er liðin, eru fleiri skip farin aftur har kortini. Orsøkin til áheitanina var, at norska reiðarafelagið metti tað ikki vera trygt fyri manningar at vera í russiskum sjógvi í krígstíð. Ongin áheitan kom frá føroyska reiðarafelagnum um ikki at fara í russiskt sjóøki. Tað kann tykjast løgið, tí føroyskir fiskimenn hava áður merkt russiska valdssýning á egnum kroppi – enntá áðrenn russiska stjórnin var nær námind so ágangandi, sum hon er í dag.

Í november 2009 varð Skálaberg tikin av russum. Russiskir myndugleikar løgdu hald á skip og veiðu, tá ið teir mettu, at skipið hevði fiskað meira enn 600 tons ólógliga. Hetta vildu hvørki JFK, sum var reiðaríið hjá Skálabergi, ella føroyskir myndugleikar viðurkenna, tí skipið hevði bara fiskað kvotuna hjá Sundabergi, sum frammanundan varð seldur til Russlands, men loyvið var framvegis føroyskt.

Reiðaríið vísti á, at Fiskimálaráðið ikki hevði sent tey nýggjastu pappírini til Russlands. Russiskir myndugleikar vístu hinvegin á, at Skálaberg fiskaði av kvotuni hjá Sundabergi, sum varð seldur til Russlands sama ár.

Tað gingu nakrar vikur, har Skálaberg við manning lá í russiska býnum Murmansk, áðrenn teir 38 mennirnir sluppu heimaftur.

Meginparturin av manningini fleyg heim við flogfari og megnaði at koma heim til jólar.

Skálaberg varð seldur til Argentina í januar 2010, tveir mánaðir eftir at trolarin varð tikin í Russlandi, fyri 190 milliónir krónur. (Fiskur.fo, 2018)



**TILGONGDIN TIL FISKIVEIÐUSAMSTARVIÐ FYRI 2023**

Undir koronufarsóttini var tað ein afturvendandi kritikkur frá fleiri, at andstøðan ov sjáldan varð tikin upp á ráð. Í seinnu "kreppuni" hjá undanfarna landsstýri – sum snúði seg um avtaluna við Russland – var tíðliga greitt, at eingin avgerð bleiv tikin, uttan at andstøðan varð tikin við.

Tað er hugsandi, at ein orsøk til hetta var Miðfloksins støða. Uttan Miðflokkin var eingin meiriluti, og Jenis av Rana, formaður og landsstýrismaður, var púra greiður: Avtalan skuldi ikki endurnýggjast.

**6. september 2022** kallaði Bárður Nielsen, løgmaður, fyri fyrstu ferð flokkarnar saman til at viðgera fiskiveiðuavtaluna við Russland. Hini málini á skrá vóru revsitiltøk og "altjóða umdømi føroya", sum løgmaður málbar seg.

Eftir fundin segði Høgni Hoydal m.a soleiðis: "Vit hava víst á hvat vit eiga at gera, sum vit søgdu longu tá, at vit áttu at steðga øllum útflutningi beinanvegin."

Høgni Hoydal vildi annars ikki siga, júst hvat hann hevði tilmælt løgmanni vegna Tjóðveldi at gera, men bað kringvarpsjournalistin spyrja seg aftur eftir at støðan var tikin, so skuldi hann siga honum.

Ruth vang segði soleiðis við Kringvarpið eftir fundin: "Eg má siga sum er, at tað smakkar mær illa, at vit fara at seta okkum við eitt samráðingarborð við russar. Tað vildi verið undarligt, sum støðan er nú."

Ruth Vang sáddi eisini hendan dagin iva um, hvørt avtalan var so búskaparliga týdningarmikil fyri Føroyar: "Eg veit ikki um tað endiliga fer at kosta okkum so nógv. Vit lata jú eisini nakað afturfyri tað vit fáa frá russum, so spurningurin er um vit missa so nógv virði av tí avtaluni. Eg trúgvi ikki at vit verða so nógv fátækari", segði hon við kringvarpið.

Løgmaður segði einans, at vit skuldu taka eina felags avgerð og saman bakka upp um hana. Hetta var støðan hjá Sambandsflokkinum gjøgnum alla gongdina, tá kjak var um fiskiveiðusamstarvið við Russland.

Formaður Fólkafloksins, Christian Andreasen, vildi ikki gera nakra viðmerking, men segði, at orðini hjá løgmanni umboðaðu eisini Fólkaflokkin.

Týdningurin av at tosa við einari rødd var greiða yvirskriftin frá øllum eftir fundin.

**28. september 2022** komu forfólkini í flokkunum aftur saman at viðgera støðuna, men heldur ikki hesaferð kom nøkur niðurstøða. Løgmaður segði, at nú fóru fólk frá fíggjarmálaráðnum, løgmansskrivstovuni og fiskimálaráðnum at seta seg saman og hyggja at, hvat hetta hevði av týdningi fyri Føroyar. Eftir fundin varð eisini avgjørt, at løgmaður skuldi á fund við norska forsætisráðharran áðrenn nøkur niðurstøða varð gjørd.

**13. oktober 2022** var løgmaður á fundi við norska forsætisráðharran, ið stutt frammanundan hevði kunngjørt, at Norra fór at halda fram við samstarvinum. Eftir fundin ásannaði løgmaður, at nú var ikki nógv tíð eftir, men at enn vóru nøkur viðurskifti eftir at fáa greiðu á. Tí gav hann enn einaferð hinum forfólkunum fundarboð.

**17. oktober 2022** var aftur fundur í Tinganesi. Ein kanning av fiskiveiðuavtaluni frá búskaparáðnum var júst løgd fram, og niðurstøðan var, uttan at almenningurin fekk innlit í kanningina, at har var nøkulunda javnvág í avtaluni. Føroyar høvdu enn onga støðu tikið, men løgmaður lovaði at avgerð varð tikin innan fáar vikur.

Soleiðis orðaðu floksforfólkini í andstøðuni seg eftir fundin.

> Aksel v. Johannesen: **"Eg haldi ikki at tað er rætt sum støðan er í løtuni at hava nakað samstarv við Russland, men nú hava vit fingið at vita tað, vit hava eftirspurt nakrar ferðir, at reint búskaparliga hevur tað ikki nakrar negativar avleiðingar fyri Føroyar (at siga avtaluna upp). Sjálvandi verða tað nøkur reiðarí og nakrar manningar, sum verða rakt og tað eiga vit at taka atlit til. Ein møguleiki er at fáa aðrar kvotur aðrastaðnis. Tað kann vera í norska partinum av Barentshavinum ella aðrastaðnis."**

> Sámal Petur í Grund: **"Vit hava eina púra klára støðu. Hon er at vit ikki skulu samráðast við russar, men kvetta alt samstarv sum landið liggur."**

> Høgni Hoydal: "**Vit hava meldað út hvat við halda í Tjóðveldi – altso at tíðin er komin hartil, at vit taka tey drastisku stigini ikki at endurnýggja eitt fiskivinnusamstarv, simpulten frá tí moralska sjónarmiðinum, at kann man gera avtalu við eitt land, sum er í kríggi, sjálvt um kríggið hevur nógvar fasettir. Tað sum vit so ynskja, er at landsstýrið tekur eina greiða støðu og tað haldi eg, at tit skulu spyrja landsstýrið um."**

> Ruth Vang: **"Tað sum er hent í seinastuni og serliga tað at Russland hóttir við kjarnorkuvápnum ger okkara støðu torføra og tað verður**

**truplari og truplari at verja eitt framhaldandi fiskivinnusamstarv við Russland. Eg persónliga havi flutt meg síðan vit byrjaðu at kjakast um hetta og nú eri meira har, at nú skal man sannføra meg um at vit skulu halda á. So útgangstøðið hjá mær er, at hetta sær ikki gott út at vit skulu halda fram við samstarvinum við Russland."**

**9. november 2022** skrivaði løgmaður út val, ið skuldi vera 8. Desember 2022. Samstundis helt alt ting- og landsstýrisarbeiði uppat, og ongin almenn avgerð viðvíkjandi fiskiveiðuavtaluni við Russland varð tikin.

**15. november 2022** brast nýggja norðoyavalevnið hjá Tjóðveldi, Eirikur í Jákupsstovu, eina bumbu mitt í valstríðnum. Tjóðveldi hevði, saman við hinum andstøðuflokkunum, havt ein greiðan russlandspolitikk inntil hendan dagin, tá Eirikur valdi at venda skútuni í einum av høvuðsevnunum til løgtingsvalið 2022. Føroyar skuldu halda fram at samstarva við Russland, vóru boðini frá Eiriki.


Eirikur Í Jákupsstovu
November 15, 2022

HJÁLP TIL UKRAINA OG
FISKIVEIÐUSAMSTARV VIÐ RUSSLAND

Tað hjálpir ikki fólkinum í Ukraina at revsa russiskar fiskimenn. Tað hjálpir fólkinum í Ukraina at hjálpa fólkinum í Ukraina.

Kríggið, sum Russland førir ímóti ukrainska fólkinum er ræðuligt. Sum menniskju og tjóðskaparfólk er tað ótolandi at siggja, hvussu ósek menniskjalív verða týnd og hvussu heimsins størsta land roynir at taka frælsið frá ukrainsku tjóðini.

Vit eiga at gera okkara fyri at hjálpa, men eftir mínum tykki er tað ikki við at strika fiskivinnusamstarvið við Russland, sum áhaldandi hevur verið í gildi síðan 1977, tá fyrsta avtalan varð gjørt við Sovjetsamveldið.

Tað hjálpir ikki ukrainska fólkinum, at vinnulív og fiskimenn í Russlandi og Føroyum missa møguleikarnar at vinna til lívsins uppihald. Tað ávirkar heldur ikki Putin serliga nógv, um Føroyar ikki samstarva um fiskirættindi, tá øll hini londini í okkara parti av heiminum framvegis gera fiskiveiðuavtalur við Russland.

Men tað finnast hættir veruliga at geva Ukraina hjálp. Og ein er heilt einfalt at senda Ukraina pengar. Eitt boð kundi verið 20 mió. kr.

Tí hóast vit hava okkara at stríðast við í Føroyum, og átøk avgjørt skulu gerast fyri, at fleiri fólk í Føroyum skulu hava tað gott, so eru vit hóast alt í mun til fólkatalið eitt ríkari land enn til dømis Danmark.

Tí tykist tað upplagt at senda ein part av pengunum, sum Danmark sendir til Føroyar, til tey samfeløgini, sum av álvara eru í neyð.

At eitt valevni hjá Tjóðveldi alment boðaði frá, at viðkomandi ikki var sinnaður at slíta fiskiveiðusamstarvið við Russland, setti kílar í flokkin. Onkur valevni, og fólk við tøttum tilknýti til flokkin, funnust hvassliga at Eiriki fyri at ganga í móti linjuni, sum flokksleiðslan hevði sett út í kortið og broyta kós mitt í valstríðnum. Onnur tóku undir við sjónarmiðinum.


Tórbjørn Jacobsen
November 16, 2022

Skilji á lagnum, at onkur heldur, at Eirikur í Jákupsstovu burdi verið sendur á eitt kaffe latte skeið í høvuðsstaðnum, har man lærir tann sanna veruleikan, at umframt donsku ríkisveitingina (sum øll regnar niður yvir Havnina) kemur øll virðisskapanin í landinum sum Manna av himni - púra, ja, púra av sær sjálvari. Tí eiga vit bara at fyrihalda okkum til útreiðslurnar í samfelagnum. 😀

Fyrrverandi løgtings og fólkatingsmaðurin hjá Tjóðveldi, borgarstjórin í Runavíkar Kommunu, Tórbjørn Jacobsen, var skjótur at rósa Eiriki og samstundis prika til høvuðsstaðin.

**21. november 2022** kom almenna fráboðanin, sum mong høvdu bíðað eftir. Tað hevði leingi verið tøgn frá ovastu leiðslu Tjóðveldisins eftir umstrídda lesarabrævið hjá Eiriki í Jákupsstovu. Flokkurin var farin frá at hava ein greiðan politikk viðvíkjandi fiskiveiðusamstarvi við Russland, til ongan politikk at hava. Ein fyri og ein ímóti vongur var komin í Tjóðveldi, og eftirsum formaðurin ikki kom við nakrari almennari fráboðan tóktist tað sum, at fólk blivu frítstillað eins og í sokallaðum etiskum málum. Men 21. november sendi Tjóðveldi út eina fráboðan umboðandi øll valevni floksins. Høvuðsboðskapurin var at "Vinnu- og sjófólk, sum hava Barentshavið sum livibreyð, skulu kunna kenna seg trygg í, at livibreyðið eisini er har eftir jól." Tíðindaskrivið byrjaði við at harta tásitandi samgongu fyri onki at hava gjørt fyri at loysa hetta mál, men ístaðin at hava kastað landið út í eitt valstríð. Í øðrum lagi varð staðfest, at takkað verið vantandi fyrireiking og manglandi alternativum, var Tjóðveldi ikki sinnað at slíta samstarvið við russar her og nú, tí ein slík avgerð hevði gingið ov hart út yvir føroysk húsarhald.

**Fráboðan frá øllum valevnum hjá Tjóðveldi:**

SKRIVAÐ: Tjóðveldisflokkurin | 21.11.2022 - 10:21 POLITIKKUR TÍÐINDASKRIV

**Tjóðveldi tekur onga avgerð sum hóttir gerandisdagin hjá fólki**

Sitandi landsstýri hevur ikki tikið nakra avgerð, funnið nakra semju ella gjørt nakrar fyrireikingar og ætlanir í málinum um okkara samstarv við Russland, men hevur í staðin blakað landið út í eitt valstríð.

Tað loysir tó onki – avgerðin um endurnýggjan av sáttmálanum skal takast nú, innan fyri komandi mánaðan!

Við ongum fyrireikingum, ongum alternativum, ber ikki til at gera broytingar her og nú, uttan at tað gongur hart útyvir føroysk húsarhald. Tað er sjálvandi ikki nakað, Tjóðveldi vil fremja í nøkrum máli. Og vit hava frá byrjan sagt, at sjálvandi skulu allar ætlanir og fyrireikingar gerast. Vinnu- og sjófólk, sum hava Barentshavið sum livibreyð, skulu kunna kenna seg trygg í at livibreyðið eisini er har eftir jól.

Skal nakað broytast, krevst dygg fyrireiking, og breið semja má til. Hetta ásannar eitt samt Tjóðveldi, og vit vænta, at aðrir flokkar hava somu áskoðan.

**22. november 2022** hevði Javnaðarflokkurin tíðindafund, har valskráin til løgtingsvalið varð løgd fram. Eftir framløguna hjá Akseli V. Johannesen spurdi Eirikur Lindenskov frá Miðlahúsinum um Javnaðarfloksins støðu, tá tað kom til fiskiveiðusamstarvið við Russland. Aksel svaraði, at nú var ov seint at steðga samstarvinum fyri 2023. Hetta hóast hann viðgekk, at Javnaðarflokkurin áður hevði sagt, greitt og týðuliga, at vit áttu at steðga hesum samstarvi:

> **"Vit hava sagt, bæði alment og á fundi við løgmann og politisku flokkarnar, at vit eiga at fara undir at fyrireika, at vit einki fiskivinnusamstarv hava við Russland, tí tað hevur stóran týdning fyri reiðaríini og fyri manningarnar. Men einki er fyrireikað, og nú eru vit koyrd út í eitt valstríð, og hvørki løgtingið ella landsstýrið er arbeiðsført fyrr enn eftir jól. Tí eru vit komin í eina rættiliga trupla støðu", segði Aksel V. Johannesen.**

**22. november 2022** gav løgmaður forfólkunum í politisku flokkunum á tingi fundarboð fyri at kanna, um áhugi var fyri at samráða seg til eina fiskiveiðuavtalu við Russland fyri 2023, ið tók støði í avtaluni fyri 2022. Neyvan var tað av tilvild, at fundarboðini frá løgmanni komu beint eftir at tað var alment, at Javnaðarflokkurin heldur ikki tók undir við at slíta samstarvið her og nú. Tað var týðuliga ein lætti hjá Bárði Nielsen, løgmanni, at kunna siga við

útvarpið, at nú val var útskrivað, sat landsstýrið bert sum ein starvsstjórn og ein starvsstjórn skuldi ikki handla politiskt uttan eitt sterkt mandat aftanfyri seg:

> **"Tí havi eg valt, í sambandi við avtaluna við Russland, at kalla floksforfólkini inn fyri at viðgerða hvat vit skulu gera, tí samráðingarnar skulu í gongd nú um tær skulu blíva til nakað fyri hetta árið, so at tær koma í gildið áðrenn 1. januar", segði Bárður á Steig Nielsen.**

**23. november 2022** varð endaliga og formliga staðfest, at Javnaðarflokkurin, Tjóðveldi og Framsókn høvdu broytt støðu, og nú søgdu ja til at gera eina fiskiveiðuavtalu við Russland fyri 2023. Fundurin vardi ikki longur enn ein tíma, so tað vóru neyvan nakrar samráðingar, áðrenn semjan varð gjørd. Løgmaður var væl nøgdur, nú hann saman við andstøðuni fekk ein stóran meiriluta. Ein meiriluta, sum Miðflokkurin kanska ikki hevði kunnað tryggjað honum:

> **"Eg havi teir seinastu dagarnar lagt til merkis, at har hevur verið ein stemningur fyri, frá øðrum flokkum, sum kanska ikki hava verið so heitir fyri tí, at vit eiga kanska at taka hesar talgildu samráðingarnar upp. Tí kallaði eg inn til fund, og niðurstøðan er, frá einum greiðum meiriluta, at taka samráðingarnar upp, men avmarkað til 2023 og samstundis herða vit eftirlitið við russiskum skipum, bæði úti á sjónum, men eisini við bryggjubakkan," segði Bárður á Steig Nielsen við útvarpið eftir fundin.**

Løgmaður legði stóran dent á, at talan einans var um talgildar samráðingar á embætismannastigi:

> **"Sjálvandi skulu tað vera talgildar samráðingar. Tað verða ongar politiskar samráðingar. Hetta verður gjørt yvir talgildar samskiftismiðlar og mann fer so vítt møguligt at royna at fáa eina roll-over avtalu av tí sum er í dag."**

Táverandi andstøðufloksforfólkini blivu sjálvsagt spurd av kringvarpinum um teirra kúvending eftir fundin. Tey svaraðu soleiðis:

Aksel V. Johannesen, Javnaðarflokkurin:

> **"Vit hava sagt á fundinum í dag tað sama sum vit hava sagt í miðlunum, at tað er í lagi at gera eina avtalu nú, av tí at mann ikki hevur fyrireikað eitt alternativ".**

Aksel lovaði tó, at flokkurin eftir komandi val fór at fyireika eina framtíð uttan eitt fiskiveiðusamstarv við Russland um kríggj enn var í Ukraina.

Høgni Hoydal, Tjóðveldi:

> **"Eftirsum at landið er blakað út í eitt valstríð og mann ikki nær at fyrireika seg so, at hetta ikki fær avleiðingar fyri vanlig óskyldug verkafólk, sum verða hart rakt, so er onki annað at gera nú enn at leingja avtaluna".**

Høgni segði eins og Aksel, at eitt komandi landsstýri skuldi viðgerða hetta málið.

Ruth Vang, Framsókn:

> **"Nú er tað so mikið ligið út á árið og tað eru nøkur fólk og økir í landinum, sum tað fer at ganga hart útyvir um mann bara nú í síðstu løtu sleppur øllum. So eg haldi at tað eru rímiligar grundgevingar fyri, at vit fara til samráðingar um komandi ár."**

Sámal Petur í Grund, formaður í Sjálvstýri, helt fast við, at vit ikki skuldu samráðast við russar.

Jenis av Rana, formaður í Miðflokkinum, segði, at vit skuldu ikki gera nakra avtalu nú, men viðgerða støðuna eftir valið.

**25. november 2022** varð fiskiveiðusáttmálin við Russland fyri 2023 endaliga unirskrivaður á talgildum fundi. Avtalan, sum bleiv gjørd, hevði tillagingar, ið tóku atlit til broytingar í fiskastovnunum. Toskakvotan í Barentshavinum fór niður við 20 % í 2023, og hevði hetta við sær, at føroysku kvoturnar av botnfiski vórðu 20 % lægri enn í 2022. Føroyska rækjukvotan hækkaði við

1.500 tonsum. Eisini tær russisku kvoturnar av svartkjafti, makreli og norðhavssild í føroyskum sjógvi lækkaðu.

Føroysku kvoturnar í russiskum sjógvi í 2023 vórðu hesar:

Toskur 12.285 tons, hýsa 1.276 tons, flatfiskur 900 tons og rækjur 4.000 tons.

Russisku kvoturnar í føroyskum sjógvi í 2023 vórðu hesar:

Svartkjaftur 72.000 tons, makrelur 13.000 tons og sild 8.500 tons, íroknað hjáveiðu.

Hetta eru tøl, ið eftir okkara Spyr-kanning at døma, ikki hava áhuga fyri føroyingar. Bert 17,5% svaraðu rætt, tá spurt varð, um tey vistu hvussu nógv tons føroysk skip hava loyvi at fiska í russiskum sjógvi, og einans smá 8% vistu, hvussu nógv tons russar hava loyvi at fiska í føroyskum sjógvi.

**26. november 2022** ringdu nógvir danskir miðlar til fiskimálaráðharran, Árna Skaale, sum mátti seta hendan dagin í valstríðnum av til at verja føroysku avgerðina um at leingja fiskiveiðuavtaluna við Russland.



Færøerne trodser Danmark og EU og indgår ny fiskeriaftale med Rusland

Færøerne trodser EU og laver fiskeriaftale med Rusland. Samarbejdet med russerne skyldes – ifølge færingerne – dels at det lille øsamfund er ekstremt afhængigt af aftalen, dels EU's manglende samarbejde med færingerne.



Færøerne vil fortsætte kontroversiel fiskeriaftale med Rusland

Både oppositionen og internt i den færøske regering har der lydt modstand mod en ny fiskeriaftale med Rusland. Nu er der bred politisk opbakning til at fortsætte samarbejdet.

Afturvendandi argumentini hjá Árna Skaale hendan dagin vóru, at matvørur ikki eru fevndar av revsitiltøkunum hjá ES, at Russland hevur verið í kríggi í 35 av teimum seinastu 45 árunum, og so búskaparligi týdningurin av avtaluni, sum sambært Árna Skaale svaraði til umleið 5 prosent av BTÚ – nakað sum hann seinni ásannaði var faktuelt skeivt. Men tað var nakað, sum gav hansara argumentum tyngd. T.d. skrivaði Berlingske Tidende soleiðis 26. november 2022:

> **"Árni Skaale sammenligner en annullering af aftalen med, at man i Danmark på én gang lukkede både hele landbruget og hele medicoindustrien, der producerer medicinsk udstyr. Så stor en betydning har aftalen for Færøerne, siger han". (Berlingske Tidende, 2022)**

**1. desember 2022** varð Árni Skaale avdúkaður í Degi og Viku fyri at hava sagt ósatt fyri donskum miðlum, tá hann bleiv spurdur um fiskiveiðuavtaluna við Russland. Orðarætt hevði Árni skaale sagt "Det her samarbejde har en indvirkning på færøsk økonomi, der ligger på omkring 5 procent af bruttonationalproduktet på Færøerne".

Rógvi Reinert, aðalstjóri, segði, at fiskimálaráðið ikki

stóð aftanfyri upplýsingarnar. Rógvi Reinert segði eisini, at Árni Skaale hevði tølini frá Karl Erik Reynheim, stjóra í Faroe Agency, sum livir av at samstarva við russar og hýsir russiska konsulatinum í Føroyum. Karl Erik Reynheim skrivaði í eini grein tann 24. oktober 2022, at virðið av samstarvinum við Russland var 1,2 milliardir krónur um árið.

Kringvarpið spurdi eisini aðalstjóran, um ráðið hevði gjørt nakra meting til landsstýrismannin um virðið av russlandsáttmálanum. Tað hevði ráðið, og metingin bleiv eisini send til Kringvarpið, men av “samráðingartaktiskum orsøkum” var strikað útyvir allar búskaparligar metingar. Hetta skjalið varð tann 17. oktober undirskrivað av m.a. Hans Ellefsen, ráðgeva hjá Árna Skaale, meira enn ein mánað áðrenn at Árni Skaale segði við DR, at avtalan var verd 5% av føroysku bruttotjóðarúrtøkuni.

Dagur og Vika spurdi henda dagin Hans Ellefsen um virðið av avtaluni. Hann segði virðið vera tað, vit fiska í Barentshavinum, sum svarar til góðar 300 milliónir, og at virðisøkingin er nakað lægri enn tað. Spurdur um avtalan svaraði til 5% av BTÚ segði Hans Ellefsen, at 300 milliónir var umleið 1-2% av BTÚ, men um vit siga avtaluna upp fáa vit tann pelagiska fiskin í føroyskum sjógvi, sum russar fiska í dag, so fiskiveiðusamstarvið við Russland er nærri 0% av føroysku bruttotjóðarúrtøkuni.

Árni Skaale ásannaði, at hann hevði mistikið seg:

> **“Eg má bara viðurkenna, at eg havi ikki handfarið tølini rætt og tað má eg bara umbera,” segði hann.**

**22. desembur 2022** varð nýggj samgonga skipað eftir løgtingsvalið 8. desember. Flokkarnir, sum myndaðu nýggju leiðsluna í Tinganesi, søgdu allir undan valinum, at samstarvið við Russland eigur at halda uppat.

**24. februar 2023**, á ársdegnum fyri russisku innrásina, legði nýggi løgmaðurin, Aksel V. Johannesen, eina grein út á heimasíðuna hjá løgmansskrivstovuni. Undir yvirskriftini: “Frá Ishkov til Putin: Okkara sál og hjørtu gráta við Ukraina” segði hann m.a., at

> **“Vit eru á einum vegamóti. Í nýggjársrøðu mínari gjørdi eg greitt, at vit mugu siga frá. Tað krevur nakað at taka støðu. Tað kostar at verja rættvísi. Men eg eri ikki eina løtu í iva um, at vit eisini megna tað.”**

Hann segði hvørki beinleiðis, at útflutningurin til Russlands skal steðga, ella at fiskiveiðuavtalan skal sigast upp. Men kortini var ikki at fara skeivur av, hvørji boðini vóru, tá hann m.a. segði soleiðis:

> **“Nýggja handilspolitiska tíðarskeiðið fer helst at krevja, at vit í felag leggja um. At okkara dugnaligu útflytarar troyta aðrar marknaðir.”**

**12. apríl 2023** Spurdi Jenis av Rana løgmann, um landsstýrið fór at finna eina semju um ein føroyskan ukrainapolitikk. Friður hevði valdað leingi í politisku skipanini, tá ráddi um kríggið í Ukraina og heldur ikki hendan dagin segði nakar nakað, uttan Jenis av Rana. “Hetta er størsta álvarsmál, sum er í heiminum í dag – og tað er deyðatøgn á tingi”, staðfesti hann turrisliga. Løgmaður segði, at landsstýrið var í ferð við at leggja síðstu hond á eina útgreining og so verður málið tikið upp. Hann segði, at ætlanin var at fáa eina felags semju í Løgtinginum og so fór tíðin vísa, um tað eydnaðist at finna semju um tað. Men hann helt tað vera best, um Føroyar talaðu við einari rødd.

**13. apríl 2023** kom danski uttanríkisráðharrin, Lars Løkke Rasmussen, til Føroya. Dagin eftir skuldi hann á fund við uttanríkis og vinnumálaráðharran, Høgna Hoydal. Lars Løkke Rasmussen var í Degi og viku hetta kvøldið og tosaði um føroyska samhandilin við Russland. Møguliga var tað takkað verið ringum søguligum royndum, tá danir áður hava sagt hvussu vit eiga at gera í Føroyum, at danski uttanríkisráðharrin ikki segði eitt orð um sína persónliga hugsan um føroyska samhandilin við russar, men at einans føroyingar eiga avgerðina um fiskiveiðusáttmálan við Russland. Hann segði tó, at um Føroyar ynskja eitt tættari samband við ES og Bretland, so má mann hava í huga hvørji signal mann sendur.

Á fundinum millum Lars Løkke Rasmussen og Høgna Hoydal vórðu serliga føroysk viðurskifti við ES viðgjørd. Lars Løkke Rasmussen segði eftir fundin, at kríggið í Ukraina hevði gjørt, at

handilspolitikkur hongur saman við etikki og morali, og at tey frá danskari síðu fegin vilja fremja átøk saman við Føroyum til frama fyri betri føroyskari atgongd til ES.

**17. apríl 2023**, bert tríggjar dagar eftir fundin í tinganesi millum Lars Løkke Rasmussen og Høgna Hoydal, var aftur ein danskur ráðharri í Tinganesi. Hesaferð var tað verjumálaráðharrin Troels Lund Poulsen, sum kom at fundast við Høgna Hoydal. Á skránni var danska verjuavtalan, sum Troels Lund Poulsen lovaði, at Føroyar skuldu takast við í. Boðskapurin hjá Høgna Hoydal var, at Føroyar skulu

hava ábyrgd og avgerðarrætt á føroyskum viðurskiftum. Troels Lund Poulsen legði hendan dagin eisini upp til fleiri vitjanir í Føroyum komandi tíðina. Speisemið hendan dagin var, at russiska virksemið í Havn, eins og undanfarnu dagarnar, var sera stórt. Beint uttanfyri fundarhølini í Tinganesi - har fundast var um verju og trygd - vóru ikki færri enn sjey russisk skip á vitjan.

Elin Mirjamsdóttir, tíðindafólk í sjónvarpinum, spurdi Troels Lund Poulsen, um tað ikki var ein trupulleiki fyri ríkisfelagsskapin, at tað er ein vanligur partur av gerandisdegnum, at Tinganes er kringsett av russiskum skipum. Men verjumálaráðharrin svaraði uttanum og segði, at tað ikki var nakað hann sum danskur verjumálaráðharri kundi taka nakra avgerð um.

Eitt av russisku skipunum, ið lá á beding í Havn hendan dagin, var Melkart-5. Sum Frihedsbrevet.fo skrivaði tann 4. apríl hevur hetta skip fingið nógva umrøðu í Norra, sum ein møgulig trygdarhóttan av tí at í januar 2022 var ein av teimum kaðalum, ið bindur Svalbard at meginlandinum, kvettur av. Illgruni var um, at russiska skipið hevði kvett kaðalin av við vilja eftir at hava siglt óteljandi ferðir tvørtur um økið, hann lá. Skipið fekk eisini boð frá norsku myndugleikunum um at flyta seg, men aktaði ikki boðini.

Norra hevur seinastu tíðina hert eftirlitið og avmarkað talið av havnum, ið russisku skipini kunnu leggja at, men so er ikki í Føroyum, og hesin dagurin var talandi fyri, hvussu alt stendur púra opið í Føroyum fyri umstríddum russiskum skipum.

**23. apríl 2023** varð málið um tey illgrunasomu russisku skipini í føroysku havnunum umrøtt í sendingini 21-søndag hjá DR. Evnið varð tikið upp í kjalavørrinum av dokumentarsendingini "skyggekrigen", ið var eitt samstarv millum tey norðurlendsku kringvørpini. Serliga var tað útsøgnin hjá formanninum í tí konservativa flokkinum, Søren Pape Poulsen, sum fekk nógva umrøðu:

> **"Det er overhovedet ikke et færøsk anliggende. Jeg er fuldstændig ligeglad med de fiskeriaftaler, når det gælder det her. For hvis man som civilt fartøj har militært udstyr om bord, så handler det ikke om handel længere. Så handler det om udenrigs- og sikkerhedspolitik. Og dermed et anliggende for den danske regering"**

Hetta var fyrstu og higartil einastu ferð, síðan Russland gjørdi innrás í Ukraina, at ein danskur politikari alment hevur sagt, at Danmark eigur at blanda seg í føroysku fiskiveiðuavtaluna við Russland og taka føroyskar myndugleikar av ræði og strika avtaluna.



**SAMANUMTØKA**

Føroyski fiskiveiðusáttmálin við Russland frá 1977 varð undirskrivaður í eini tíð, tá ið heimurin var býttur upp í eystur og vestur. Fleiri útlendskir miðlar sóu tí samstarvið bæði sum eina trygdaravbjóðing og sum eina uppgerð við tann táverandi Evropeiska Felagsmarknaðin. Føroyingar sóu hinvegin avtaluna sum eina neyðuga og pragmatiska avtalu, tí nýggi havrættindasáttmálin forðaði fyri fríum fiskiskapi, og avtalurnar, sum felagsmarknaðurin kundi bjóða, vóru ikki nøktandi. Russar løgdu harafturat í svartkjaft, sum í Føroyum varð róptur "ónyttufiskur".

Hetta hevur verið áhaldandi hugburðurin hjá føroyingum øll hesi 46 árini, sum føroyska samstarvið við Russland hevur á baki. Vánaliga atgongdin til ES-marknaðin (fyrr felagsmarknaðin) verður søgd at vera atvoldin til, at Føroyar eru so tætt knýttar at Russlandi, bæði tá tað snýr seg um útflutning og fiskivinnu, og svartkjafturin verður enn sæddur sum ónyttufiskur. Frá politiskari síðu verða enn somu argument nýtt fyri at rættvísgera samhandilin, men tey verða søgd undir øðrum spjaldrum. Í tíðini hjá Sovjetsamveldinum varð fiskiveiðusamstarvið fyrst og fremst vart av Javnaðarflokkinum, hóast hinir flokkarnir, uttan Kristiligi Fólkaflokkurin, tóku undir við samvinnuni. Eftir at Sovjetsamveldið fall í 1991 hava allir flokkar tikið undir við fiskiveiðuavtaluni, eisini í 2014 tá Russland annekteraði Krim hálvoynna.

Nú politiska myrkrið aftur sýgur seg um heimin við Putin, sum tann 24. februar 2022 gjørdi innrás í Ukraina, eftir hann miðvíst og skipað hevði niðurlagt spírandi demokratisku rørsluna í Russlandi, og loyvt áhaldandi telduálopunum á vesturlendsku teldukervini fyri at undirgrava okkara fólkaræðiligu skipanir, stendur føroyska samstarvið við Russland aftur á einum vegamóti.

Flokkarnir, sum í dag sita í landsins stjórn, lovaðu áðrenn valið, at um kríggið helt fram, skuldi avtalan ikki leingjast. Høvuðsgrundgevingin hjá teimum fyri at leingja avtaluna í heyst var, at tað var so langt útliðið, at einki annað kundi gerast. Nú er ein triðingur av 2023 farin, og framvegis er eingin avgerð tikin. Skulu vit ikki enda í somu støðu sum í fjør er eyðsæð, at hon má takast áðrenn langt er liðið – og landsstýrið hevur í skrivandi stund eisini lovað, at hon fer at verða tikin heilt skjótt.

Vit hava nú sæð eina søguliga gjøgnumgongd av umstrídda samstarvinum, sum hevur verið ein vøgugongd millum moral og etikk á aðrari síðuni og búskaparligan týdning á hinari síðuni. Nú leggja vit moralska spurningin til síðis og fara at kaga eftir tølunum í avtaluni, og hvat hon merkir í krónum og oyrum.



# CASE

## Vit síggja ikki virðið í okkara egna

**Sambært Árna M. Dam lata vit nógv meir enn vit fáa, tá vit hvørt ár gera fiskivinnuavtalu við Russland. Vit hugsa bert um virði á toskinum í Barentshavinum, og gáa ikki um, at tað, vit lata afturfyri, er nógv meira vert. Okkurt árið hevur avtalan verið so vánalig, at til ber at siga, at vit hava latið Russlandi eini 150.000 tons av svartkjafti sum gávu.**

Tá føroyskir myndugleikar í síni tíð tveittu seg út í tað, sum seinni fekk heitið "makrelstríðið", vóru fá ið vistu, hvørji kort, vit høvdu á hondini.

Men ein teirra, ið eggjaði myndugleikunum til at fara í stríðið, og hvørs privatu tøl og útrokningar vóru partur av grundgevingunum fyri at gera tað, var Árni M. Dam á Norðskála.

Hann hevði bæði verið skipari og skrivari í reiðarafelagnum, og bygdi tískil tað, hann segði, á bæði praktiskar royndir og meira "akademiska" vitan.

Eg vitjaði hann tá, og bleiv ikki sørt hugtikin av allari teirri vitan, hann hevði savnað saman. Har vóru ikki bara hagtøl um fiskiskap hjá føroyskum og útlendskum skipum, avreiðingar og avreiðingarvirði, men eisini yvirlit yvir æti, dýpi, hita í sjónum, og hvussu fiskastovnar fluttu seg sambært teimum ymisku faktorunum.

Árni hevur – mær vitandi sum tann einasti – alment lagt fram hagtøl, sum lýsa virðið á avtaluni við Russland, tá allir viðkomandi og atkomiligir faktorar eru taldir við. Og úrslitið er eitt heilt annað enn tað, sum landsstýrisins loyniligu útrokningar vísa, og tað, sum tey, ið hava beinleiðis vinnuligan áhuga í sáttmálanum, eru komin fram til.

Eg royndi at fáa hansara tøl eitt sindur fram upp undir seinasta løgtingsval so landsstýrið kundi fáa eitt mótspæl, men tað eydnaðist bert í lítlan mun. Myndugleikarnir hildu seg til sínar loyniligu útrokningar, sum vístu, at avtalan stendur upp og niður. Altso at hon hvørki gevur pluss ella minus, men hinvegin ger føroyska búskapin meir fjølbroyttan.

Tað kom ikki alment fram, hvat hesar útrokningar bygdu á, og tí kundu Árnasa útrokningar ikki setast upp ímóti teimum hjá landsstýrinum.

Tað, landsstýrið gjørdi við lata tað vera dult, var at steðga øllum møguleikum fyri kritikki og tí orðaskifti, sum hann kundi ført til. At heldur ikki løgtingið ella miðlarnir – vegna Føroya fólk – kravdu at fáa alt á borðið, var eftir mínum tykki greið misrøkt av teirra skyldum.

Men nú skal avgerðin um, hvørt avtalan við Russland skal leingjast, so hon eisini verður galdandi fyri 2024, skjótt takast.

Tí ringdi eg aftur til Norðskála í sambandi við hesa frágreiðing, og spurdi Árna, um hann kundi vísa mær hansara tilfar.

Tað stóð ikki á – og tað var sera áhugavert.

Men tað var eisini hugstoytt at síggja hansara tøl, talvur og grafar. Fatanin, mann situr við, tá mann er komin gjøgnum tilfarið, er ikki góð. Hon er, at føroyingar øll hesi árini hava havt eitt fokus: Vit vilja hava atgongd til tosk í Barentshavinum! That's it! Hvat vit lata afturfyri, hava vit hugsað minni um. Og tað er óhugnaliga nógv sum bendir á, at vit ikki bara í nøgd men eisini í virði hava latið væl meira, enn vit fáa. Ár eftir ár eftir ár er pengar drenaðir út úr føroyska samfelagnum. Ikki beinleiðis, men óbeinleiðis gjøgnum mistar møguleikar.

Vit hava trúð meira uppá møguleikarnar í tí, sum svimur aðrastaðni, enn í tí, sum svimur í okkara egna sjógvi. Grasið hevur í okkara eygum verið grønari inni hjá grannanum.




Og enn verri verður kenslan, tá hugsað verður um, at hetta bara er hent í tí stilla. Eingin tosar um tað, eingin setir spurnartekin við tað, og fáur er tilvitaður um tað yvirhøvur. Allar flestu føroyingar vita als ikki, hvussu nógv vit lata. Tann opinleiki, tað orðaskifti og tann kritikkur, sum eru fortreytirnar fyri einum vælvirkandi fólkaræði, hava als ikki verið til staðar.

Sera nógv almenn umrøða hevur verið av tí, sum vit fáa afturfyri tað, vit lata. Tað er jú lætt hjá miðlum og politikarum at endurgeva tað, sum sæst í samfelagnum hvønn dag. Verri er at tosa um møguleikar. Og har hava vit svikið.

Eg – sum enntá eri politikari – eri einki undantak. Eg havi aldrin sett meg inn í hesar avtalurnar fyrr enn eg fór

# CASE

gjøgnum tølini hjá Árna. Eg havi aldrin hugsað um, at vit til dømis í 2020, frá 1. januar til 31. mars loyvdu 20 russiskum skipum í føroyskan sjógv. At vit frá 1. apríl. til 31. oktober loyvdu 29 skipum. Og at vit frá 1. november til 31. desember loyvdu 28 skipum.

Eg visti heldur ikki, at føroyingar í avtaluni fyri hetta árið enntá lovaðu at hyggja uppá eitt russiskt ynski um at hækka okkurt av tølunum.

Eg hevði ongantíð sett meg inn í, at Russland hetta árið – 2020 – hevði rætt at fiska 103.000 tons undir Føroyum, meðan vit sama árið afturfyri fingu rætt at fiska 22.660 av toski, hýsu, flatfiski og rækjum í Barentshavinum. Tað, vit lótu, var ikki bara tann bíligi svartkjafturin. 12.500 tons vóru makrelur, og 8600 tons vóru sild.

Sama ár hevði Ísland sambært fleirtjóða avtalu rætt at fiska 187.000 tons við Føroyar. So at siga øll tann íslendska svartkjaftakvotan verður fiskað í føroyskum øki.

Bara hetta árið – 2020 – fiskaðu hesi bæði londini altso nærum 300.000 tons í føroyskum sjógvi. Tað sigur eitt sindur um, at nøgdirnar, sum svimja, gýta, eta, vaksa og fitna í okkara øki, eru øgiligar. Og 2020 er ikki tað mest ekstrema árið. Í 2018 hevði bara Ísland rætt at fiska 252.000 tons við Føroyar. Tveyhundraðogtveyoghálvtrýsstúsund tons. Mann hevur ilt við at ímynda sær tað.

Eisini russiska kvotan – sum russar altso fáa fyri at loyva okkum upp í Barentshavið – hevur verið yvir 200.000 tons.

Afturat hesum kemur, at okkara eftirlit við fiskarínum hjá teimum mongu, mongu útlendsku skipunum er lítið. Og at millum tað, vit ikki vita, er hvussu stór hjáveiðan er.

Tað, Árni M. Dam hevur gjørt, er ikki rocket science. Tað krevur bara áhaldni og tol. Hann hevur grivið fram øll tey tøl, sum eru almenn og viðkomandi, og sett tey inn í excel-ørk. Tonsatøl fyri ymisk fiskasløg, avreiðingarvirði, oljunýtslu, oljuprís, hýrur, tilfeingisgjøld og so framvegis.

Síðani hevur hann rætt og slætt falda, lagt saman og drigið frá.

Ongar gitingar eru. Tá hann til dømis metir um, hvat vit kundu fingið fyri tann svartkjaft, ta sild og tann makrel, sum vit lata Russlandi, um vit fiskaðu hann sjálv, hevur hann til dømis bara hugt at, hvat vit sum er fáa fyri hesi fiskasløg, tá føroysk skip fiska fiskin. Síðani hevur hann havt sum fortreyt, at vit kundu fingið sama prís fyri hvørt kilo, um vit fiskaðu alt sjálv. Altso eisini tað, sum russar fiska. Men útgangsstøðið er verandi prísur hjá føroysku skipunum. Tað kann í teoriini vera, at prísurin pr. kilo hevði lækkað, um vit fiskaðu alt sjálv – í hvussu er í eina tíð. Tað kann eisini vera, at vit kundu fingið meir burturúr pr. kilo (sí samrøðuna við Eirik á Húsamørk í hesi frágreiðing). Men slíkar spekulatiónir eru ikki við. Bara einfaldar framskrivingar, pluss, minus, dividera og falda.

Høvuðsfortreytin er púra einføld: Hvussu nógv høvdu vit fingið, um vit fiskaðu og seldu tað, vit lata, fyri tað sama, sum vit nú selja tað fyri, sum vit sjálv fiska.

Síðani eru allir hinir nevndu faktorarnir settir inn – oljunýtsla, hýrur, tilfeingisgjøld etc.

Tað samlaða úrslitið er, at um vit søgdu upp avtaluna við Russland, mistu toskakvotuna í Barentshavinum og sjálv fiskaðu fiskin, vit lata russum, kundi føroyska samfelagið tjent umleið 390 milliónir meira um árið, enn vit gera nú.

Sjálvandi ber ikki til at rokna hetta so neyvt út. Mann fær aldrin allar faktorar við, og at siga hvat føroyskt vinnulív kundi fingið – ella ikki fingið – burtur úr øllum tí "nýggja" fiskinum, ber sjálvandi als ikki til.

Ókendu faktorarnir og óvissurnar peika ymsar vegir.

Ein faktorur, sum ikki er við, er havnagjøld frá russisku skipunum, og sølan av vørum og tænastum til hesi skip. Hetta økir sjálvsagt um virðið av avtaluni fyri Føroyar.

Ein faktorur, sum er sera trupul at meta um, eru avleiðingarnar av vantandi eftirlitinum. Hetta er tað, sum órógvar nógvar fiskimenn, eg havi tosað við, allar mest. Og tað er eisini nakað av tí, sum órógvar Árna:

"Eg havi verið við skipum, har eygleiðari var umborð, sum

reiðaríið sjálvt rindaði fyri. Føroyar hava onki eftirlitsfólk umborð á tí stóra, útlendska flota, sum fiskar her. Tí verða tað bara gitingar. Men russar hava so nógv skip undir Føroyum, at tað verður ikki nógv í part, sum teir bara fiska tað, teir hava loyvi til. Og tað er í sær sjálvum ófatiligt, at vit hava eina skipan, har so stór virði standa upp á spæl, og vit so lata alt byggja á álit heldur enn eftirlit. Og hetta er ikki bara galdandi fyri russisku, men eisini fyri íslendsku skipini. Ísland fiskar nærum allan tann svartkjaft, teir hava fingið sambært altjóða avtalu, í føroyskum øki. Og fyri tað, um fiskaríið ikki er sambært beinleiðis avtalu við okkum, so er tað altso okkara øki. Tí áttu vit at havt eftirlit við, hvussu nógv teir veruliga fiska, og hvussu nógv hjáveiða er uppií. Tað hava vit nærum ikki. Teir fiska her – og selja í Íslandi. Einaferð enn: Alt byggir á álit. Og tað er ikki skilagott", sigur Árni.

Og so er tað hjáveiðan.

"Tað er grunt kring Føroyar, og tí fær mann nógv meir botnfisk í trolið tá mann fiskar uppsjóvarfisk her, enn tá mann fiskar hann á heilt djúpum vatni, sum t.d. í altjóða øki norðanfyri Føroyar. Hjáveiðan er upsi, toskur, kongafiskur, blálonga og slíkt, sum gevur nógv betur prís enn uppsjóvarfiskurin", greiðir hann frá.

Í teimum útrokningum, sum her verða lagdar fram, verður varliga roknað við 4% í hjáveiðu. Tað talið er valt, tí tað sýndu kanningar hjá Havstovuni, at hjáveiðan var umborð á Nærabergi í 2004 og 2005. Høvdu íslendingar og russar somu hjáveiðu sum Næraberg við einum miðalprísi á 10 kr. kg. fyri hesa hjáveiðu, var virðið á hesi hjáveiðu 1,9 milliard frá 2005 til í dag. Men sum fiskiveiðuavtalan við Russland fyri 2004 vísir (sí niðanfyri), so er 4% helst rættiliga lágt sett.

Tá vit tosa um hvat vit lata Russlandi, so er tað næstan altíð bara svartkjafturin, sum verður nevndur. Men makrelur og sild eru eisini partur av avtaluni.

Taka vit árið 2004 sum dømi, so fingu vit hetta árið rætt til 15.275 tons í Barentshavinum sambært avtaluni við Russland, harav 13.000 vóru toskur. Afturfyri lótu vit hetta árið Russlandi ikki færri enn 239.000 tons.

Fyri hvørt tons, vit fingu loyvi at fiska, fekk Russland sostatt rætt at fiska meira enn 15 tons.

203.300 tons av tí, vit lótu, vóru svartkjaftur. 8.500 tons vóru makrelur. 7.000 tons vóru sild, sum Russland kundi hava sum hjáveiðu, og 20.300 vóru prikkafiskur, sum Russland eisini kundi hava sum hjáveiðu. Umframt hetta fekk Russland loyvi at fiska 700 tons sum "royndarveiðu".

Í 2004 hevði makrelurin góðan prís. So góðan, at fiskaðu vit hann sjálv, metir Árni, at tað er líka við, at tey 8.500 tonsini av makreli kundu givið meira í netto-inntøku enn øll okkara toskakvota í russiskum sjógvi gav tað árið. Ikki tí makrelur er meira verdur enn toskur, men tí hann er nógv bíligari at fiska. Føroysku skipini fiskaðu tá makrel í norskum og bretskum sjóøki. Hann bleiv fiskaður við nót og allur landaður í Norra ella Hetlandi, so oljunýtslan var lítil.

Men vit lótu altso ikki bara russum hesi 8.500 tonsini av makreli í 2004. Vit lótu teimum eisini yvir 203.000 tons av svartkjafti og yvir 27.000 tons av prikkafiski og sild.

Sum danir siga: Hetta lata vit standa eina løtu...

Tað er nógv annað, eg kundi ikki fram her. Men tølini siga sínar egnu søgur, og tær tala fyri seg. Og sum Árni sigur: Kann onkur vísa á, at onkur "faktorur" ikki er rættur, so eru tey vælkomin at greiða frá, hví hann ikki er rættur.

# 2. PARTUR

# Hvør kundi inntøkan verið av uppsjóvarkvotuni?

**INNGANGUR**

Hvat er føroyski fiskiskapurin í Barentshavinum verdur? Nógvir eru hættirnir at greina hendan spurning, og allir hava sínar vansar. Mest týðandi luturin í svari uppá spurningin er helst virðið á sjálvum fiskiskapinum. Hetta virðið stavar frá eitt nú yvirskoti til reiðarí, tilfeingisgjaldi, hýrum til manning, virðisøking á landi, lønarskatti o.s.fr. Stutt sagt, øll tey virði, sum fiskiskapurin í sjálvum sær skapar av privatum og almennum inntøkum. Men fiskurin er ikki ókeypis. Afturfyri at vit fiska í Barentshavinum sleppa bæði Russland og Norra at fiska í føroyskum sjógvi. Hetta er ein handil. Spurningurin er, um handilin er gagnligur fyri Føroyar.

Í hesum parti tekna vit eina støðumynd av árinum 2021, og meta um, hvørt handilin var til fyrimuns fyri Føroyar ella ei. Svarið uppá spurningin er grundað á eina samanbering av virðinum, sum føroyingar fingu burturúr fiskiskapinum í Barentshavinum í 2021, við tað virðið, sum føroyingar høvdu kunnað fingið av sjálvi at fiska tær kvoturnar, sum Russland og Norra fingu tá í Føroyum. Vit samanbera sostatt samlaða føroyska fiskiskapin úr Barentshavinum við bæði tann russiska og norska fiskiskapin undir Føroyum. Orsøkin til, at vit ikki bert samanbera virðið á fiskiskapinum í Barentshavinum við russiska fiskiskapin í føroyskum sjógvi er, at føroyingar keypa sær rætt at fiska nakað av russisku kvotuni í norskum sjógvi. Sostatt kann man eisini siga, at vit í hesum parti kanna, um fiskiveiðuavtalurnar, sum Føroyar hava við bæði Russland og Norra, eru til fyrimuns fyri Føroyar.

Stóra avbjóðingin við samanberingini er, at vit ikki reiðiliga vita, hvat fiskurin, sum Russland og Norra fiska í føroyskum øki, hevði verið verdur fyri føroyingar, um vit fiskaðu hann sjálv. Til tess at geva eini boð hóast hetta, so líta vit í fleiri førum ikki á ávís absolutt tøl, men á miðaltøl. Tó eru tey nýtilig til at gera eina heildarmeting, sum er endamálið við hesum parti.

Hesin parturin er sostatt grundaður á eina samanbering av tí, sum Føroyar fáa burturúr Barentshavinum, við tað, sum Føroyar høvdu kunnað fingið burturúr teimum kvotunum, sum vit lata Russlandi og Norra afturfyri Barentshavið. Hetta er hypotetiska fortreytin undir útrokningunum, og hon skal sjálvandi takast við neyðugum fyrivarni. Tá ið vit í hesum parti umtala ávikavist botn- ella uppsjóvarfiskiskap ella -kvotur, so er talan altíð um tær kvoturnar, sum vit lata Russlandi og Norra. So tá ið vit til dømis skriva "tilfeingisgjald av uppsjóvarkvotunum", so skal hetta skiljast sum tilfeingisgjaldið frá kvotunum, sum vit lata Russlandi og Norra, um vit fiskaðu fiskin sjálv.

**ÁRIÐ ER 2021**

Orsøkin til, at 2021 er snúningsdepilin, er, at Árni M. Dam fyrst og fremst hevur funnið fram hagtøl og útrokningar frá hesum ári. 2021 er eisini fyrsta árið, har ið fiskiskipini í Barentshavinum rindaðu tilfeingisgjald. Og so er tað jú eisini ógvuliga stutt síðani 2021.

Allar útrokningar niðanfyri eru gjørdar av Árna M. Dam. Í fleiri førum brúkar hann tøl frá Vørn, men stundum eisini metingar, har hann av royndum kann geva kvalifiserað boð. Tá vit hyggja at virðisøking á landi hevur hann eisini brúkt roknskapartøl frá 2021 hjá fleiri uppsjóvarvirkjum og tøl hjá Bakkafrost.

Okkara lutur í hesum parti er at bera tølini fram so rætt og greitt, sum vit megna.

Heldur onkur, at tølini ikki eru bein, er viðkomandi meira enn vælkomin at siga, hví so er.

**VERULIGI FISKISKAPURIN OG ÁSETTU KVOTURNAR**

Seinni í partinum fara vit at útrokna virðini á uppsjóvar- og botnfiskakvotunum, sum vit í 2021 lótu Russlandi og Norra. Til tess nýta vit kvoturnar hjá báðum londunum heldur enn tøl fyri faktiska fiskiskap teirra. Kvoturnar hjá Russlandi og Norra kunnu finnast á heimasíðuni hjá Fiskivinnumálaráðnum:

fiskiveiðiavtala-millum-føroyar-og-russland-fyri-2021.pdf (d3b1dqw2kzexi.cloudfront.net); fiskiveiðiavtala-millum-føroyar-og-noreg-fyri-2021.pdf (d3b1dqw2kzexi.cloudfront.net).

Fyri Barentshavið brúka vit tøl fyri faktiska fiskiskapin. Sostatt er hetta ein roynd at samanbera, hvat vit faktisk fingu burturúr við tað, sum vit høvdu kunnað fingið burturúr.

### NETTOINNTØKA TIL FØROYSKA SAMFELAGIÐ

Høvuðstalið, sum vit útrokna, kalla vit *nettoinntøku til føroyska samfelagið*. Tað útroknast við at draga virðið á fiskiskapinum í Barentshavinum, soleiðis sum vit lýstu hetta virðið ovast, frá hypotetiska virðinum á ávikavist uppsjóvar- og botnfiskakvotunum, sum vit lata Russlandi og Norra. Soleiðis, sum víst er á talvuni niðanfyri.

**NETTOINNTØKA TIL FØROYSKA SAMFELAGIÐ FRÁ UPPSJÓVAR- OG BOTNFISKAKVOTUNUM**

( **Uppsjóvarkvoturnar, sum vit lata Russlandi og Norra** + **Botnfiskakvoturnar, sum vit lata Russlandi og Norra** ) ÷ ( **Fiskiskapurin í Barentshavinum** )

**= NETTO FYRI FØROYSKA SAMFELAGIÐ**

Vit kalla tað nettoinntøku, tí vit spyrja, hvør inntøka til føroyska samfelagið er eftir, eftir at vit hava drigið virðið á kvotunum í Barentshavinum frá. Ítøkiligu útroknaðu virðini, sum innganga í tað, vit kalla "inntøkur til føroyska samfelagið", reksast upp niðanfyri.

### ÚTROKNINGAR FYRI BARENTSHAVIÐ OG UPPSJÓVARKVOTURNAR

Vit skilja útrokningarnar sundur í tveir høvuðspartar. Fyrst samanbera vit fiskiskapin í Barentshavinum við uppsjóvarkvoturnar, sum vit lata Russlandi og Norra. Síðani leggja vit botnfiskakvoturnar, sum vit í høvuðsheitum lata Norra, avtrat. Russisk hjáveiða er tikin við í útrokningarnar fyri botnfiskiskapin.

Ítøkiliga útrokna vit boð uppá niðanfyristandandi inntøkur frá ávikavist Barentshavinum og uppsjóvarfiskinum.

**INNTØKUR TIL SAMFELAGIÐ FRÁ BARENTSHAVINUM OG UPPSJÓVARFISKINUM**

| Privatar | Almennar |
|---|---|
| Bruttoúrslit til reiðarí* | Tilfeingisgjald |
| Hýrur | Lønarskattur |
| Virðisøking á landi | Onnur lønargjøld |
| **= INNTØKUR TILSAMANS** | |

** "Bruttoúrslit til reiðarí" vísir, hvat er eftir hjá reiðarííi at gjalda aðrar kostnaðir og kapital kostnaðir eftir at ávísar útreiðslur eru tektar frá avreiðingarvirðinum.*

Inntøkurnar frá Barentshavinum dragast síðani frá inntøkunum fyri uppsjóvarkvoturnar fyri at finna nettoinntøku til føroyska samfelagið frá uppsjóvarkvotunum.

### ÚTROKNINGAR FYRI BOTNFISKAKVOTURNAR

Tá vit hava gjørt hetta, rokna vit eitt boð uppá, hvør inntøkan til føroyska samfelagið hevði verið frá botnfiskakvotunum, sum vit í dag lata Norra umframt russisku hjáveiðuni. Ítøkiliga útrokna vit boð uppá inntøkurnar, sum verða vístar í talvuni niðanfyri.

**INNTØKUR TIL SAMFELAGIÐ FRÁ BOTNFISKAKVOTUNUM**

Mett yvirskot til reiðarí av brutto-avreiðingarvirði av ávikavist norsku botnfiskakvotunum og russisku hjáveiðuni í føroyskum sjógvi*

Hýrur frá botnfiskiskapinum og russisku hjáveiðuni

Virðisøking á landi av botnfiskiskapinum

**=INNTØKUR TILSAMANS**

**Hetta verður lýst nærri, tá vit rokna tað út*

Vit rokna ikki skatt av hýrum. Hetta hevði ikki broytt uppá, hvør nettoinntøkan til føroyska samfelagið hevði verið, har vit jú ikki skilja mun á privatum og almennum inntøkum. Botnfiskiskapurin betalur heldur ikki tilfeingisgjald.

Til síðst leggja vit inntøkurnar frá norska botnfiskiskapinum undir Føroyum saman við nettoinntøkuni frá uppsjóvarfiskinum fyri at gera eina meting av samlaðu nettoinntøkuni til Føroyar fyri uppsjóvar- og botnfiskakvoturnar, sum vit lata Russlandi og Norra.

**399 MILLIÓNIR Í UNDIRSKOT**

Tær útrokningar, sum leggjast fram longur niðri, koma fram til, at nettoinntøkan til føroyska samfelagið í 2021 hevði verið 399 milliónir krónur, fiskaðu vit sjálvi uppsjóvar- og botnfiskin, sum vit lata Russlandi og Norra, heldur enn fiskin í Barentshavinum. Úrslitini fyri ávísu inntøkurnar til føroyska samfelagið frá uppsjóvarfiskinum og Barentshavinum, sum vístar á talvuni *"Inntøkur til samfelagið frá Barentshavinum og uppsjóvarfiskinum"* omanfyri, síggjast á grafinum niðanfyri.




Serliga eru tað møguleikar fyri virðisøking á landi, sum skapar virðið í metingini um, hvat uppsjóvarfiskurin er verdur. Sambært útrokningunum, so gevur Barentshavið meira í hýrum til manningar og harvið eisini almennar lønarinntøkur. Niðanfyri vísast tær inntøkur, sum vit útrokna fyri botnfiskiskapin og russiku hjáveiðuna.




Leggja vit samlaðu inntøkurnar á uppsjóvarfiskinum saman við inntøkur frá botnfiskinum og trekkja Barentshavið frá, so finna vit fram eina nettoinntøku á 399 milliónir.




Í næsta partinum vísa vit, hvørjar útrokningar og metingar grafarnir eru grundaðir á.

# Inntøkur úr Barentshavinum og møguligar inntøkur av uppsjóvar- og botnfiskiskapinum

**BYGNAÐUR** *(1.1)*

Tað fyrsta vit gera er at samanbera avreiðingarvirðið á kvotunum í Barentshavinum við bæði uppsjóvar- og botnfiskakvoturnar. Í sjálvum partinum útgreina vit, hvussu hetta verður gjørt. Eftir hetta rokna vit út, hvørjar inntøkur Føroyar fingu úr Barentshavinum í 2021 og samanbera hetta við møguligu inntøkurnar frá uppsjóvarfiskinum. Tá ið tað er gjørt, so rokna vit, hvat botnfiskurin hevði havt av virðið. Til síðst taka vit samanum.

**AVREIÐINGARVIRÐIÐ** *(1.2)*

Fyri at finna virðið á tí fiski, sum vit lata ávikavist Russlandi og Norra, ganga vit út frá, at føroyingar høvdu fingið sama miðalprís fyri fiskasløgini, sum tey frammanundan fingu hetta sama árið í føroyskum sjóøki. Miðal kiloprísin fyri makrel, sild, svartkjaft, brosmu og longu í 2021 hevur Árni Dam útroknað við tølum frá Vørn. Hetta eru also tøl fyri fiskiskapin hjá føroyskum skipum í føroyskum sjógvi sama árið. Ítøkiliga útrokningin hevur verið at deila samlaða avreiðingarvirðið hjá ávísu fiskasløgunum, sum føroysk skip fiskaðu í føroyskum sjógvi, við sølumongd í kilo. Upplýsingar um sølumongd og avreiðingarvirði er sambært avreiðingarseðlum, sum upplýstir á heimasíðuni hjá Vørn: Hagtøl - Vørn (vorn.fo)

Niðanfyri samanbera vit avreiðingarvirðini fyri fiskin úr Barentshavinum við uppsjóvar- og botnfiskakvoturnar. Fyrst hyggja vit eftir, hvat ið avreiðingarvirðið hevði kunna verið, avreiddu føroyingar sjálvir allan fiskin, sum vit lata Russlandi og Norra. Síðani samanbera vit hetta við avreiðingarvirðið av fiskiskapinum úr Barentshavinum. Tað vil siga, at vit samanbera Barentshavið við bæði uppsjóvar- og botnfiskiskapin hjá Russlandi og Norra í føroyskum sjógvi.

Talvan niðanfyri vísir tøl fyri russisku og norsku kvoturnar og hvønn miðalprís, føroysk fiskiskip fingu fyri ávísu fiskasløgini í 2021. Í fjóðra teigi frá høgru eru mongd og prísur síðani faldað saman fyri at finna avreiðingarvirðið, um føroyingar avreiddu allan fiskin sjálvir.

**AVREIÐINGARVIRÐIÐ Á UPPSJÓVAR- OG BOTNFISKINUM**

| Uppsjóvarfiskur | Fiskiskapur (kg.) | Miðal kiloprísur í 2021 fyri sama fiskaslag | Avreiðingarvirðið, um føroyingar veiddu fiskin |
|---|---|---|---|
| RS*: Makrelur | 14.500.000 | 7,00 | 101.500.000 |
| RS: Sild | 10.000.000 | 5,29 | 52.900.000 |
| RS: Svartkjaftur | 82.000.000 | 2,02 | 165.640.000 |
| NR**: Makrelur | 6.600.000 | 7,00 | 46.200.000 |
| **Uppsjóvarfiskur Tilsamans** | **131.547.474** | | **366.240.000** |
| **Botnfiskur & Hjáveiða** | | | |
| RS: Hjáveiða | | 4.260.000 | 10,00 |
| 42.600.000 | | | |
| NR: Brosma | 2.000.000 | 7,00 | 14.000.000 |
| NR: Longa | 2.500.000 | 14,00 | 35.000.000 |
| NR: annað | 800.000 | 10,00 | 8.000.000 |
| **Botnfiskur tilsamans** | **9.560.000** | | **99.600.000** |
| **AVREIÐINGARVIRÐIÐ Á UPPSJÓVAR- OG BOTNFISKISKAPI TILSAMANS** | | | **465.840.000** |

**Russland, **Norra*

Hesar metingar benda á, at føroysk skip høvdu avreitt uppsjóvarfiskin, sum vit lata russum og norðmonnum, fyri áleið 446 milliónur krónur í 2021. Talvan niðanfyri vísir til samanberingar, hvat avreiðingarvirðið av føroyskum fiskiskapi í Barentshavinum var í 2021. Avreiðingarvirðið fyri fiskiskapin í Barentshavinum stavar frá søluvirðinum í krónum sambært avreiðingarseðlum, sum upplýstir á heimasíðuni hjá Vørn fyri 2021. Hagtøl - Vørn (vorn.fo)

| AVREIÐINGARVIRÐIÐ HJÁ FØROYSKUM SKIPUM Í BARENTSHAVINUM | |
|---|---|
| Toskur, hýsa o.a. | 413.062.083 |
| Rækjur | 38.711.505 |
| **TILSAMANS** | **451.773.588** |

Sambært omanfyristandandi útrokningum, so høvdu uppsjóvar- og botnfiskakvoturnar givið 14 milliónir krónur meira í 2021.

| MUNUR Á AVREIÐINGARVIRÐI (MIÓ. KR.) | |
|---|---|
| 2021 avreiðingarvirðið, um føroyingar avreiddu uppsjóvar- og botnfiskakvoturnar | 466 |
| 2021 avreiðingarvirðið hjá føroyskum skipum í Barentshavinum | 452 |
| **MEIRA FRÁ UPPSJÓVAR- OG BOTNFISKI** | **14** |



**BARENTSHAVIÐ OG UPPSJÓVARFISKURIN – HVAT GEVUR MEIRA?** *(1.3)*

Í hesum parti samanbera vit fiskiskapin í Barentshavinum við uppsjóvarkvoturnar, sum vit lata Russlandi og Norra. Sostatt eru norsku botnfiskakvoturnar ikki við. Og av tí at russisk hjáveiða fyri tað mesta er botnfiskur, so er russiska hjáveiðan heldur ikki við í hesum parti, men heldur í seinna partinum saman við botnfiskakvotunum.

Sostatt rokna vit her boð uppá tær ymisku umrøddu inntøkurnar til føroyska samfelagið frá uppsjóvarfiskinum og Barentshavinum. Raðfylgjan er hendan:

1. Bruttoinntøkur til reiðarí
2. Skattur og hýrur
3. Tilfeingisgjald
4. Virðisøking á landi

**BRUTTOÚRSLIT TIL REIÐARÍ** *(1.3.1)*

Talvan niðanfyri vísir eina meting av, hvat reiðarí høvdu av bruttoúrsliti áðrenn skatt, eftir olju, pakning, tilfeingisgjald og hýrur av Barentshavsfiskiskapinum, og hvat tey høvdu havt av bruttoúrsliti fyri uppsjóvarfiskin. Sí noturnar síðst í frágreiðingini fyri nærri útgreining av teimum ávísu útreiðslunum markeraðar við (*) í talvuni. Nærri frágreiðing fyri tilfeingisgjaldið er við í hesum partinum longur niðri.

## BRUTTOÚRSLIT TIL REIÐARÍ

| | | Barentshavið | | Uppsjóvarskip |
|---|---|---|---|---|
| Avreiðingarvirðið* | | 451.773.588 | | 366.240.000 |
| **ÚTREIÐSLUR** | | | | |
| Oljuforbrúk** | | 57.396.864 | | 36.105.435 |
| **Úrslit áðrenn pakning** | | **394.376.724** | | **330.134.565** |
| Pakningur*** | | 10.504.158 | | - |
| **Úrslit áðrenn tilfeingisgjald** | | **383.872.566** | | **330.134.565** |
| Tilfeingisgjald | | 21.459.245 | | 62.695.500 |
| **Úrslit áðrenn hýru** | | **362.413.321** | | **267.439.065** |
| *Hýra****:* | 41,56% | 150.612.847 | 26,20% | 79.528.659 |
| *Onnur gjøld:* | 3,28% | 4.932.571 | 3,28% | 2.604.564 |
| **EFTIR TIL REIÐARÍÍ** | | **206.867.903** | | **185.305.843** |

**Sí notu 1 fyri nærri greining, **Sí notu 2 fyri nærri greining, *** Sí notu 3 fyri nærri greining, ****Sí notu 4 fyri nærri greining*

Munur er á, hvussu hýran til ávikavist Barentshavið og uppsjóvarskipini er roknað. Sí notu 4 fyri útgreining.

| EFTIR TIL REIÐARÍ | |
|---|---|
| Barentshavið | 206.867.903 |
| Uppsjóvarfiskur | 185.305.843 |
| **MEIRA TIL BARENTSHAVIÐ** | **21.562.060** |

Sostatt bendir omanfyristandandi á, at fiskiskapurin í Barentshavinum gevur meira av sær til reiðaríini, eftir at olja, hýru-útreiðslur, pakningur og tilfeingisgjald er drigið frá.

**SKATTUR OG HÝRUR** *(1.3.2)*

Vit vísa til notu 4 (aftast í frágreiðingini) fyri nærri frágreiðing um, hvat grundarlagið er fyri hýrunum í talvuni niðanfyri. Skattaprosentið fyri 2021 er ikki heilt neyvt kannað. Tó hevur prosentsatsurin í sjálvum sær onki at siga fyri metingina av samlaðu nettoinntøkuni fyri føroyska samfelagið. Tað einasta, ið broytist, er, hvar pengarnir enda – hjá manningini ella í almenna kassanum.

Við hýrusatsi og skattaprosenti kunnu vit meta, um ávikavist fiskiskapurin í Barentshavinum ella uppsjóvarfiskurin hevði givið meira í løn til manningar, og hvør fiskiskapur gevur størstu lønarskattainntøkurnar.

**SKATTUR OG HÝRUR**

| | Hýra | Skattur (%) | Skattur (kr.) | Netto løn |
|---|---|---|---|---|
| Barentshav | 150.612.847 | 45% | 67.775.781 kr | 82.837.066 kr |
| Uppisjóvarskip | 79.528.659 | 45% | 35.787.897 kr | 43.740.762 kr |
| **BARENTSHAVIÐ GEVUR MEIRA Í HÝRUM TIL MANNING** | | | | **39.096.303** |

Fyri Barentshavið er hýran 41,56% av bruttoúrslitinum hjá reiðarínum, eftir oljuforbrúk, pakning og tilfeingisgjald, sum sambært talvuni "Bruttoúrslit til reiðarí" omanfyri jú gav 362.413.321 krónur. Tað gevur so áleið 150 milliónur krónur í hýrum. Fyri uppsjóvarskip rokna vit hýruna at vera 26,2% av avreiðingarvirðinum minus tilfeingisgjald, tvs. 26% av 303.544.500, sum so gevur áleið 80 milliónir krónur. Vit ganga út frá einum lønarskattaprosenti á 45%, og so rokna vit netto hýrurnar í ytsta teigi til høgru í talvuni omanfyri.

Almenni lønarskatturin sambært hýrum er so 45% av áleið 150 mió. kr. fyri Barentshavið og 45% av áleið 80 mió. kr. fyri uppsjóvarskipini. Tey tølini vísast niðanfyri.

**LØNARSKATTUR TIL LANDIÐ**

| | |
|---|---|
| Barentshavið | 67.775.781 kr |
| Uppsjóvarfiskur | 35.787.897 kr |
| **STØRRI SKATTAINNTØKUR ÚR BARENTSHAVINUM** | **31.987.885 KR** |

Sambært útrokningunum gevur Barentshavið sostatt bæði meira í hýrum til manning umframt størri skattainntøkur til landið.

## TILFEINGISGJALD *(1.3.3)*

| TILFEINGISGJALD | Veiða og kvotur (kg.)** | Miðal kiloprísur fyri fiskaslag (kr.) | Veiðigjald (% av kiloprísi) | Tilfeingisgjald per kilo (kr.) | Tilfeingisgjald fyri fiskaslag |
|---|---|---|---|---|---|
| **BARENTSHAVIÐ** | | | | | |
| Miðalprísur fyri fiskiskap í Barentshavinum (íroknað rækjur)* | 25.209.357 | 17,92 | 4,8% | 0,85 | 21.459.245 kr |
| **UPPSJÓVARFISKUR** | | | | | |
| Makrelur | 21.100.000 | 7,00 | 19,0% | 1,33 | 28.063.000 kr |
| Sild | 10.000.000 | 5,29 | 18,5% | 0,98 | 9.786.500 kr |
| Svartkjaftur | 82.000.000 | 2,02 | 15,0% | 0,30 | 24.846.000 kr |
| **UPPSJÓVARFISKUR TILFEINGISGJALD TILSAMANS** | | | | | **62.695.500 KR** |

**Sí notu 5 fyri útgreining, ** Fyri Barentshavið umboðar talið fiskveiðu í alt, tá ið vit hava umroknað til heilan fisk. Fyri uppsjóvarfiskin vísir talið kvotumongd*

Miðal kiloprísur fyri Barentshavið er grundaður á eina útrokning fyri, hvat miðalprísurin hevði verið fyri heilan fisk. Sí notu 5 fyri, hvussu vit finna fram boð uppá miðal kiloprísin. Hetta gera vit fyri at standardisera kiloprís til prís fyri heilan fisk.

Tilfeingisgjald per kilo fæst við at falda miðalprís fyri fiskaslag saman við veiðigjaldinum, sum er ein prosentsatsur av kiloprísinum sambært lóg: Lógasavn (logir.fo). Síðani verður hetta talið falda við sjálvum kvotumongdunum fyri at finna tilfeingisgjald tilsamans fyri hvørt fiskaslag. Talvan niðanfyri samanber samlaða tilfeingisgjlaldið frá Barentshavinum og uppsjóvarfiskinum.

| TILFEINGISGJALD | |
|---|---|
| Barentshavið | 21.459.245 kr |
| Uppsjóvarfiskur | 62.695.500 kr |
| **MEIRIUPPHÆDDIN FRÁ UPPSJÓVARFISKI** | **41.236.255 KR** |

Omanfyristandandi útrokning bendir sostatt á, at uppsjóvarfiskur, sum vit í dag lata Russlandi og Norra, hevði givið áleið 41 milliónur krónur meira í tilfeingisgjaldi til landskassan, enn tilfeingisgjaldið, sum verður goldið av fiskiskapi í Barentshavinum.

### VIRÐISØKING Á LANDI *(1.3.4)*

Eftir at fiskurin er landaður, verður uppsjóvarfiskurin virkaður víðari á landi. Vit ganga út frá, at øll uppsjóvarkvotan, sum hon er, verður virkað á landi. Ein partur av fiskinum úr Barentshavinum verður eisini virkaður víðari á landi. Við í útrokningini til virðisøking á landi fyri Barentshavið taka vit bert mongdina av avhøvdaðum fiski, sum fyrst er umroknaður til heilan fisk.

Útrokningarnar fyri virðisøkingarfaktorarnar, sum faldast við mongd av fiski, eru grundaðar á roknskapartøl hjá ymiskum uppsjóvarvirkjum í Føroyum, umframt tøl frá Bakkafrost fyri 2021. Sí notu 6 fyri nágreiniligu útrokningarnar, sum finna fram til virðisøkingarfaktor.

**VIRÐISØKING Á LANDI**

| | kg. | Virðisøking (Kr. pr. kg.) | íalt |
|---|---|---|---|
| **BARENTSHAVIÐ:** | | | |
| Avhøvdaður fiskur roknaður til heilan fisk: | 6.131.925 | | |
| Skorðin til flak í Føroyum (43%): | 2.636.728 | | |
| virðisøking í Fø. 6,- kr. kg | 2.636.728 | 6,00 | **15.820.367 kr.** |
| **UPPSJÓVARFISKUR:** | | | |
| Makrelur | 21.100.000 | 2,39 | 50.429.000 kr. |
| Sild | 10.000.000 | 2,39 | 23.900.000 kr. |
| Sv. Kjaftur | 82.000.000 | 3,95 | 323.495.560 kr. |
| **Íalt** | | | **397.824.560 kr.** |
| **= NETTO MEIRA INNTØKA AV VIRÐISØKING FRÁ UPPISJOVARFISKI** | | | **382.004.193 KR.** |

Virðisøking á 6 krónur kilo fyri fisk úr Barentshavinum í Føroyum er, sambært Árna Dam, ein nøkulunda meting. Fortreytin her er aftur, at vit høvdu kunnað virðisøkt fyri áleið tað sama, sum vit í 2021 virðisøktu fyri á landi. Við tí útgangsstøði benda útrokningarnar á stórar møguleikar at skapa virðisøking á landi um vit sjálv fiska uppsjóvarkvoturnar. Nettoinntøkan til føroyska samfelagið frá virðisøking hevði kunnað verið áleið 382 milliónur krónur.



## NETTOINNTØKA TIL FØROYSKA SAMFELAGIÐ FRÁ UPPSJÓVARFISKINUM *(1.3.5)*

Higartil hava vit útroknað boð uppá ymiskar inntøkur til føroyska samfelagið frá Barentshavinum og uppsjóvarfiskinum. Niðanfyristandandi talva savnar hesi høvuðstøl og vísir á samlaðu nettoinntøkuna til føroyska samfelagið frá uppsjóvarfiskinum.

| | UPPSJÓVARFISKUR | BARENTSHAVIÐ |
|---|---|---|
| Tilfeingisgjald | 62.695.500 | 21.459.245 |
| Virðisøking | 397.824.560 | 15.820.367 |
| Bruttoúrslit reiðarí | 185.305.843 | 206.867.903 |
| Netto hýra | 43.740.762 | 82.837.066 |
| Lønarskattur | 35.787.897 | 67.775.781 |
| Onnur gjøld | 2.604.564 | 4.932.571 |
| Tilsamans | 727.959.125 | 399.692.933 |
| **MEIRAINNTØKA TIL FØROYSKA SAMFELAGIÐ FRÁ UPPSJÓVARFISKINUM** | | **328.266.192 KR.** |

Sostatt benda útrokningarnar hjá Árna M. Dam á, at stórar inntøkur eru at heinta frá uppsjóvarfiskinum. Serliga kemst hetta av møguleikunum fyri virðisøking á landi.



**BOTNFISKISKAPURIN OG RUSSISK HJÁVEIÐA** *(1.4)*

Vit venda okkum nú til norska botnfiskiskapin undir Føroyum og russisku hjáveiðuna, sum fyri tað mesta eisini er botnfiskur. Niðanfyri eru nakrar talvur, sum verða nýttar fyri at finna fram til ávikavist mett yvirskot til reiðarí av botnfiskiskapinum, hýrur til manning og til síðst virðisøking á landi av botnfiskiskapinum.

**METT YVIRSKOT TIL REIÐARÍ** *(1.4.1)*

| AVREIÐINGARVIRÐIÐ HJÁ BOTNFISKAKVOTUNI | Kvota (kg.) | Miðal kg.prísur (kr.) | Avreiðingarvirðið (kr.) |
|---|---|---|---|
| Brosma | 2.000.000 | 7 | 14.000.000 |
| Longa | 2.500.000 | 14 | 35.000.000 |
| Annað | 800.000 | 10 | 8.000.000 |
| **AVREIÐINGARVIRÐIÐ TILSAMANS** | | | **57.000.000** |

Miðal kiloprísur fyri fiskasløgini eru funnin á sama hátt sum omanfyri, tá vit útroknaðu miðalprís fyri uppsjóvarfiskin. Omanfyristandandi bendir sostatt á, at samlaða avreiðingarvirðið fyr norska botnfiskin hevði verið 57 millónir krónur.

| AVREIÐINGARVIRÐIÐ AV RUSSISKU HJÁVEIÐUNI | |
|---|---|
| Kvotan hjá Russlandi (kg.) * | 106.500.000 |
| % hjáveiða | 4,00% |
| Hjáveiða tilsamans (kg.) | 4.260.000 |
| Miðal kiloprísur fyri hjáveiðu (kr.) | 10 |
| **AVREIÐINGARVIRÐIÐ (KR.)** | **42.600.000** |

**Av makreli, sild og svartkjafti*

Hjáveiðan á 4% er grundað kanningar hjá Havstovuni um hjáveiðu í flótitroli, har royndir vórðu gjørdar við Nærabergi í 2004 og 2005. Tølini finnast á hav.fo:

Microsoft Word - Hjáveiða í flótitroli.doc (hav.fo) ; Microsoft Word - Hjáveiða í flótitroli 05.2005.doc (hav.fo)

Miðal kiloprísur á 10 krónur er ein útroknað meting hjá Árna M. Dam. Tað er ein meting fyri tann botnfisk, sum russisk hjáveiða í høvuðsheitum stendst av.

Útrokningin omanfyri bendur sostatt á, at avreiðingarvirðið hjá russisku hjáveiðuni hevði verið góðar 42 millónir krónir.

| YVIRSKOT TIL REIÐARÍ AV BRUTTO AVREIÐINGARVIRÐI | |
|---|---|
| Norsku botnfiskakvoturnar | 57.000.000 kr |
| Hjáveiða hjá russum ísv. Botnfiskiskap | 42.600.000 kr |
| Mett yvirskot av brutto | 10% |
| **YVIRSKOT TIL REIÐARÍIR** | **9.960.000 KR** |

Mett yvirskot á 10% til reiðarí av avreiðingarvirði er ein meting hjá Árna Dam grundað á mett yvirskot til línuskip og trolarar.

**HÝRUR** *(1.4.2)*

| HÝRUR | | | |
|---|---|---|---|
| | **Avreiðingarvirðið** | **Hýrusatsur** | **Hýrur** |
| Norsku botnfiskakvoturnar | 57.000.000,00 kr | 42,00% | 23.940.000,00 kr |
| Russiska botnfiskahjáveiðan | 42.600.000,00 kr | 35,00% | 14.910.000 kr |
| **HÝRUR TILSAMANS** | | | **38.850.000 KR** |

Fyri norsku botnfiskakvoturnar seta vit hýrur sambært sáttmálum hjá manningum hjá línuskipum, sum eru mettar at vera 42% av samlaða avreiðingarvirðinum. Fyri russisku botnfiskahjáveiðu seta vit hýrur sambært trolarum á 35% av avreiðingarvirðinum.

**VIRÐISØKING** *(1.4.3)*

| VIRÐISØKING | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Kvota (kg)** | **Úrtøka (per kg)** | **Mongd av flaki (kg)** | **Virðisøking** | **Virðisøking (per kg)** |
| Norska botnfiskakvotan | 5.300.000 | 39% | 2.067.000 | 6,00 kr | 12.402.000,00 kr |
| Russisk hjáveiða av botnfiskiskapi | 4.260.000 | 39% | 1.661.400 | 6,00 kr | 9.968.400,00 kr |
| **VIRÐISØKING TILSAMANS** | | | | | **22.370.400,00 KR** |

Úrtøkan er sambært Árna Dam sjálvdan minni enn 39%, tí verður tað sett.

**INNTØKUR TIL FØROYSKA SAMFELAGIÐ FRÁ BOTNFISKISKAPINUM** *(1.4.4)*

Fyri at taka samanum botnfiskiskapin, so hava vit higartil útroknað metingar fyri, hvat bruttoyvirskotið hevði verið til reiðaríi, hvørjar hýrur manningar høvdu kunnað væntað, og hvør virðisøkingin hevði verið. Allar hesar inntøkur reksast upp niðanfyri í talvuni, sum vísir, hvørjar inntøkur føroyska samfelagið hevði kunnað væntað av botnfiskiskapinum hjá russum og norðmonnum undir Føroyum.

| INNTØKUR TIL FØROYSKA SAMFELAGIÐ FRÁ BOTNFISKISKAPINUM | |
|---|---|
| Yvirskot til reiðaríir | 9.960.000 kr |
| Hýrur | 38.850.000 kr |
| Virðisøking | 22.370.400 kr |
| **INNTØKUR TILSAMANS** | **71.180.400 KR** |



**NIÐURSTØÐA**

Samanbera vit bert uppsjóvarfiskin við fiskiskapin í Barentshavinum, so eru flestu av teimum inntøkunum, sum vit hava hugt eftir, hægri fyri Barentshavið. Tó so eru tað møguleikarnir at virðisøkja uppsjóvarfiskin á landi, sum gera, at virðið á uppsjóvarkvotunum gerst munandi størri enn virðið á Barentshavinum. Leggja vit inntøkur frá botnfiskinum avtrat, so gerst niðurstøðan, at í 2021 høvdu føroyingar kunnað havt knappar 400 milliónir meira í inntøkum av at fiska tær kvotur, sum vit lata Russlandi og Norra.

Til hetta minna vit fyrst og fremst á, at vit sjálvandi mugu vera varðin við at meta fiskiveiðuavtalurnar við Russland og Norra út frá bert einum ári. Í 2022 var avreiðingarvirðið úr Barentshavinum munandi hægri enn í 2021, tí prísirnir hækkaðu. Hinvegin, so hækkaðu prísirnir fyri uppsjóvarfiskin eisini. Oljuprísurin var eisini munandi hægri í 2022, sum hevur ávirkan á úrslitið hjá fiskiskapunum.

Føroyingar lata fyri tað mesta uppsjóvarfisk fyri fiskiskapin í Barentshavinum. Samanborið við botnfiskin undir Føroyum, sum eru smáir stovnar, so hava teir tríggir stovnarnir – makrelur, sild og svartkjaftur – søguliga verið ógvuliga støðugir. Tá ið toskastovnrin í Barentshavinum er væl fyri, er hann umleið 3 milliónir tons, meðan makrel-, silda- og svartkjaftastovnarnir hava verið millum 10 – 15 milliónir tons tilsamans í mong ár. Sostatt bendir hetta á, at uppsjóvarfiskurin er ein sera trygg inntøkukelda hjá føroyingum. Í hvussu er, er tað hugsandi, at vit kundu havt stórar inntøkur frá virðisøking, um vit sjálvi fiskaðu tað, sum vit lata russum og norðmonnum fyri Barentshavið.

Eitt er teir búskaparligu faktorarnir, krónur og oyru og hvat vit skulu liva av. Eitt annað er, hvat vit kunnu liva við. Og hvat fyri slag av tíð, ið møguliga liggur fyri framman hjá okkum. Vit fara tí nú at líta yvir á fiskiveiðupartnara okkara fyri eystan og tey viðurskifti, sum gera, at at kalla øll vestanlond hava kvett síni sambond við Russland.

Er tað yvirhøvur trygt at hava avtalur við Russland í løtuni? Tað snýr næsti og seinasti partur av hesi frágreðing seg um.

Men áðrenn tað, skulu vit til Leirvíkar at eta proteinir.



# CASE


THE PERFECT PROTEIN FOR YOU
FISHPROTEIN
PURE VIKING
FISH PROTEIN FROM FAROESE WATERS
TARI
OCEAN PALM

# Havið er okkara mina og svartkjafturin er diamanturin

**Vit kunnu skapa nógvar ymiskar vørur og eina millardaforrætning úr tí svartkjafti, vit lata frá okkum hvørt ár, sigur Eirikur á Húsamørk, stjórin á Høvdavirkinum í Leirvík.**

Í 1977, tá Atli Dam sum løgmaður vegna Føroyar gjørdi ta fyrstu fiskivinnuavtaluna við Sovjettsamveldið, sá eingin nakað serligt virði í tí svartkjafti, sum vit lótu fyri at fáa tosk í staðin. Sum henda frágreiðing sýnir umrøddi hann beinleiðis svartkjaftin sum "ónyttufisk".

Inntil fyri 20 árum síðani høvdu tey allar flestu somu hugsan um høvd og ryggir á fiski.

Men so fór Eirikur á Húsamørk at keypa og turka hesar vørur, sum stundum fóru til djóraføði og stundum blivu vippaðar á sjógv. Hann fann ein marknað í fyrst og fremst Nigeria. Og síðani hevur Høvdavirkið í Leirvík (Faroe Marine Products) tilsamans selt fyri yvir eina milliard.

Altso: Eirikur og hansara fólk hava fingið túsund milliónir fyri nakað, sum næstan eingin fyri fáum árum síðani sá nakað virði í yvirhøvur. Og tað er selt á einum í føroyskum høpi nýggjum marknað, sum heldur eingin annar sá nakrar møguleikar í áðrenn hann byrjaði.

Í hesi frágreiðing leggja vit nógv tøl fram, men fyri at hon ikki bara skuldi enda sum akademiskt snakk, vildi eg hava onkran vinnulívsmann við eisini. Eg ringdi til Eirik, tí eg kenni hann eitt sindur frá tíðini, tá vit báðir vóru grønir skótar og skótaleiðarar. Einaferð skóti, altíð skóti, og bað meg endiliga koma inn á gólvið í Leirvík.

Eg ætlaði at spyrja, um hann, grundað á sínar royndir, sá nakrar møguleikar fyri at skapa virði úr tí uppjóvarfiski, ið vit lata russum (og íslendingum), sum standa mát við tey virði, vit skapa úr toskinum í Barentshavinum. Men tá eg kom sá eg nakað, eg als ikki visti: Eirikur hevur ikki bara hugsanir um at skapa nýggj og størri virði úr svartkjaftinum – nei, hann er fyri langari tíð síðani farin í gongd við ítøkiligar verkætlanir.

**MEN FYRST EITT SINDUR UM SØGUNA.**

Eirikur arbeiddi í mong ár á teldufyritøkini ComData, sum gjørdi skipanir til flakavinnuna. Honum dámdi væl – men hann tráðaði eftir at gera okkurt, sum onnur ikki gjørdu, og at skapa okkurt úr tí, sum onnur ikki skaptu nakað úr.

Tí fór hann saman við pápanum og øðrum at gera lýsi úr teimum toskalivrum, sum blivu tveittar í havið. Tað gekk væl, men so kom ein ósemja millum Reiðarafelagið og Fiskimannafelagið, sum steðgaði møguleikunum. Tað var eykaarbeiði hjá teimum, sum kruvdu, at taka livrina, og tað ynskti fiskimaðurin eina størri samsýning fyri. Tá Reiðarafelagið hinvegin vildi býta eftir gamla býtislíkilnum, datt livratøkan niðurfyri.

Teir stóru møguleikar, Eirikur sá í hesum, køvdust av hesi ósemjuni millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

Hann og hansara fólk stóðu so við einum bygningi, sum tey ikki kundu nýta til tað, hann var ætlaður til. Men seinni kom hann í samband við íslendingar, sum við góðum úrsliti høvdu turkað toskarhøvd. Og hóast høvd og slógv kundi geva eitt sindur viðhvørt, so var tað ofta bara ein trupulleiki hjá føroysku flakavirkjunum. Í besta føri fór tað inn á Havsbrún ella varð fryst til minkafóður, men ofta varð tað bara vippa útav keikantinum.

Í 2001 var so – í samstarvi við íslendingar – farið undir at turka høvd. Og hóast trupulleikar summi ár, hevur tað sum heild gingið væl. Umsetningurin hevur hesi tvey áratíggjuni sum nevnt verið væl yvir eina milliard, hóast keypararnir í Nigeria eru millum fátækastu fólk í verðini.

# CASE

**PARALELLUR TIL SVARTKJAFTIN**

Nýggja málið hjá Høvdavirkinum er at skapa nýggj virði úr eini vøru, sum vit hava í stórum nøgdum, men sum vit fáa lítlan vinning úr mál fyri hvørt kilo: Svartkjaftinum!

Tað verður arbeitt á fleiri frontum.

Baader hevur sett nýggjastu tøknina upp at skera svartkjaft, og prototypur av maskinum eru eisini gjørdar eftir "in-house" tekningum, sum kunnu flakaskera svartkjaftin, so hann kann nýtast til matna, og tær fungera væl.

Tey hava eisini gjørt fars úr svartkjaftinum. Tey hava gjørt frikadellur. Tey hava eisini gjørt háprís-vørur sum proteinpulvur at blanda uppí vatn ella mjólk ella at koyra útyvir t.d. jogurt. Og tey hava gjørt protein-tablettir.

"Tað er ein veldugur marknaður fyri øllum hesum í til dømis Asia", sigur Eirikur. "Proteinpulvur og tablettir úr einum so "mettaðum" produkti sum svartkjafti er ein fantastisk vøra, sum lættliga vinnur kappingina móti slíkum vørum, ið eru gjørdar úr mjólk."

Proteintablettirnar, hann tosar um, kosta eini 2000 kr. kilo í handlunum. Og pulvurið hevur eisini góðan prís.

Eg royni tað hesar báðar dagarnar eg eri á vitjan. Mær dámar tað væl. Og er smakkurin ikki tann rætti fyri tann asiatiska, amerikanska ella europeiska góman, ber væl til at geva tí t.d. jarðberjasmakk.

"Vit síggja fyri okkum, at hetta pulvurið kann liggja oman á t.d. jogurti, har músli ofta er í dag.", sigur Eirikur. Tað verður longu gjørt á Høvdavirkinum: Fólk eta pulvur, sum er gjørt úr svartkjafti, oman á skyr og jogurt.

Tað besta er, at pulvurið og tablettirnar kunnu gerast, tá flaki er skorið av.

"Tað snýr seg sum heild um at differentiera tingini", sigur tann eldhugaði stjórin. "Tú kanst fá gelatine úr svartkjaftinum. Tað er ein marknaður. Tú kanst eisini gera eina vøru við mineralum – altso kalcium, zink, jod osv. – og tað er so ein annar marknaður. Fars og frikadellur eru uppaftur ein annar marknaður".

"Eftir okkara tykki eiga tað bara at vera høvd og innvølir, sum verða brúkt til mjøl. Allur hin parturin av fiskinum eigur at verða foredlað produkt", sigur hann.

Eirikur tosar, teknar uppá talvuna, veipar við ørmunum og stendur at bresta av hugskotum. Tá hann teknar ein svartkjaft á talvuna og býtir hann upp í ymiskar partar, sum kunnu nýtast til ymiskar vørur, endar hann við at tekna ein stóran diamant rundan um.

"Havið er okkara mina. Svartkjafturin – tann so óendaliga lítisvirdi svartkjafturin – er okkara diamantur. Vit mugu læra at fara betri við honum".

Og hann hugsar ikki bara um teir vælrindandi marknaðirnarnar. Nigeria er eisini í huganum – og faktiskt hevur høvdavirkið eisini longu turkað nøkur 1000 tons av svartkjafti til tann nigerianska marknaðin.

Eg fái ein posa av hesum við mær, tá eg fari. Hann er allur etin. Tað er frálíkur, lættur matur. Tað havi eg ikki vitað fyrr – tí hetta er faktiskt fyrstu ferð í lívinum, eg havi etið svartkjaft!

Og tað er, sum bretar siga, a "sobering thought": Eg búgvi í einum landi, har summi ár fleiri 100.000 tons av svartkjafti verða fiskað – men eg havi ongantíð etið hann! Tað sigur alt um, hvussu vit hava hugsað um ta risastóru proteinkeldu, sum vit sita á.

**FORÐINGAR**

Eins og ein ósemja forðaði fyri, at lýsiframleiðslan í Leirvík bleiv tað ævintýr, hon kundi blivið, eru forðingar sum mugu beinast burtur áðrenn teir stóru dreymarnir um svartkjaftin kunnu fremjast í verki.

Tá eg var ungur tíðindamaður tosaði eg nakrar ferðir við John Smith, sum m.a. teknaði línuskip. Hann plagdi at siga, at sumt fiskarí var so harðligt og óhumhugsað, at virði á fiskinum, sum er sera stórt tá hann svimur í sjónum, minkaði og minkaði frá tí hann kom í trolið og líka til hann var seldur. Hann hataði "tonsamentalitet" og vildi seta "góðskumentalitet" í staðin.

John tosaði fyrst og fremst um tosk og hýsu. Men Eirikur á Húsamørk sigur í dag nakað tað sama um svartkjaftin:

"Svartkjafturin er av Gadus-familjuni. Altso av toskafam-

iljuni. Tað er ein prima, prima fiskur. Hann er bara ikki so stórur, og skal tað bera til arbeiða hann til mannaføði á landi, má hann koma lands í góðari góðsku.

Trupulleikin, tá vit hava keypt avhøvdaðan svartkjaft frá føroyskum skipum er, at har er har er ov nógv livur við í maganum. Teir reinsa ikki fiskin ordiliga. Hesin hugburðin má broytast. Vit mugu fáa fiskin, tá hann framvegis hevur góða dygd. Antin væl reinsaðan ella heilan í góðari góðsku, so vit sjálvi frá byrjan kunnu virka hann til ynsktu framleiðslu.

"Hetta krevur, at fiskurin verður tikin upp úr sjónum á ein meira varligan hátt enn nú. Tað ber t.d. ikki til at trolarar tova í dastið av einum døgni, tí tá er eyðsæð, at fiskurin oyðilegst. Tað, sum hendir nú, er eitt slag av rovdrift. Tað svarar næstan til at ein bóndi hevði svævað 30 seyðir áðrenn hann fór undir at fletta. Tað hevði sjálvsagt oyðilagt góðskuna. Tí tekur hann ein seyð í senn. Vit mugu eisini fara varligari fram við svartkjaftinum, skulu vit kunna nýta hann til annað enn djóraføði".

Tað er kortini ikki nøkur kollvelting, ið skal til, leggur Eirikur dent á. Broytingarnar kunnu gerast so líðandi og vit kunnu skipa so fyri, at tað er fíggjarligur vinningur, sum drívur tær.

Høvdavirkið hevur longu gjørt nakrar royndir, har tey fáa fisk frá Jupiter og øðrum skipum, sum hava lutfalsliga lítla kvotu, og sum tí eru áhuga í at fáa meira fyri hvørt kilo. Avtalan er, at virkið í Leirvík fær tann síðsta partin av einum tovi. Altso tann partin, sum ikki er oyðilagdur av trýstinum frá restini.

"Henda skipan kann útbyggjast. Eitt skip kann til dømis landa 1500 tons til Havsbrún, og so bjóða 200 tons av betri góðstu út til tann, sum hevur hug at keypa. Keypir eingin fer tað eisini til Havsbrún. Tí er nærum eingin vági. Og fæst betri prísur, fer ein støðugt størri partur til matna. Soleiðis kunnu vit so líðandi, við fíggjarligari motivatión, flyta okkum frá mest at hugsa í tonsum og djóraføði til at hugsa meira um góðsku og mannaføði", sigur Eirikur.

Vit støði í tí svartkafti, Høvdavirki hevur keypt, eru sum sagt fleiri royndir gjørdar. Fars. Frikedellur. Proteinpulvur og –tablettur og turkaður svartkjaftur. Í løtuni hevur virkið 170 tons av mjøli og 30 tons av lýsi á goymslu. Hesar royndirnar fara allar til djórafóður, tí hóast fabrikkin er góðkend til mannaføði, so er endaliga løggildingin frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni framvegis ikki komin. Men so skjótt tað er uppá pláss, er ætlanin at byrja selja til mannaføði.

"Og nú hava vit slett ikki tosað um tað mest upplagdu vøruna, mann kann gera úr svartkjafti: Surimi. Her eru rætt og slætt óendaligir møguleikar. Ikki bara til okkara virki, men eisini onnur. Tí eitt er vist: Heimsmarknaðurin er ivaleysa stórur til fleiri føroysk virki. Bera vit okkum rætt at eri eg sannførdur um, at vit kunnu fáa nógv størri inntøkur úr teimum stóru nøgdunum av svartkjafti, sum vit í dag lata russarum og íslendingum, enn vit fáa úr teimum fáu tonsum av toski, sum vit fáa frá teimum í staðin."

Fyri Eirik snýr hetta seg eisini um ein grundleggjandi hugburð um at virðismeta sítt egna:

"Trúgva vit uppá okkara egna, virða vit okkara egna og gagnnýta vit okkara egna, so kann tað gerast ein milliardaforrætning. 300.000 tons er einki í verðinshøpi. Hvat um vit fingu eini 10 kr. kilo fyri tað nógva av hesum? Minni fyri summar partar, men meir fyri aðrar partar? Tað er als ikki ómøguligt."

Eitt, sum talar fyri at hetta kann vaksa í framtíðini er, at tað er púra í samsvari við eitt tíðarrák. Fólk og handilsketur vilja hava mat, har fyrsti liður í framleiðsluni er gagnnýttur beinleiðis. Altso ikki mat, sum fyrst er framleiddur til djóraføði, og har vit síðani eta djórini, men har vit gera mat beinleiðis úr tí, sum djórini fáa í dag.

Sum eitt av mongum dømum ger Burger King nú lutvíst búffar beinleiðis úr tí, sum neytini áður ótu. Um vit fara at gera mannaføði beinleiðis úr tí svartkjafti – ella einum parti av tí svartkjafti – vit í dag gera til djórafóður, er tað í samsvari við hetta rák.

Tey, sum hava proteinirnar, standa sterk í hesi nýggju kappingini. Og fá – um nakar – hevur atgongd til so nógvar góðar proteinir, sum føroyingar.

Og hetta er altso ikki bara akademiskt snakk. Tað eru vinnulívsfólk, sum hava hugskotini og dirvið til at fremja tað í verki. Ein teirra er í Leirvík – men hann er als ikki tann einasti.

# 3. PARTUR

# Søgan um revsitiltøk og ein umstríddan handilsfelaga

**Í hesum partinum hyggja vit nærri at teimum altjóða politisku umstøðunum, ið mugu vera tað baksýni, ið avgerðin um samstarv Føroya við Russland verður tikin við. Vit fara eisini at hyggja nærri at revsitiltøkunum móti Russlandi, teimum spurningum tey reisa og um tey yvirhøvur rigga. Tað eru nógvir tættir, ið skulu renna saman í avgerðini um, hvat vavi samstarvið við Russland skal hava, og her verður ein roynd gjørd at geva eitt yvirlit yvir tey yvirskipaðu politisku og búskaparligu atlitini, ið mugu takast við í viðgerini – eins og spurningurin um hvønn leiklut etikkur og virðir spæla í eini slíkari avgerð eisini verður viðgjørdur.**

## FRÁ LIBERALARI VÓN TIL STRATEGISKAN GEOPOLITIKK OG HYBRIDKRÍGGJ

Á sínum fyrsta tíðindafundi á odda fyri nýggju ES-nevndini boðaði nývaldi forsetin í ES-nevndini Ursula von der Leyen frá, at hon fór at standa á odda fyri einari "geopolitiskari ES-nevnd og at ES skuldi vera ein "geopolitisk kraft" í altjóða politikki. Hetta var ikki av tilvild, tí geopolitikkur er um nakað eitt hugtak, sum er 'in' og hevur verið at hoyra í hvørjum einasta orðaskifti um altjóða politikk seinastu árini.

*Geopolitikkur* er eitt umstrítt hugtak, men snýr seg fyrst og fremst um sambandið millum geografi, politikk og búskap. Geografi spælir við øðrum orðum ein stóran leiklut í politikki – bæði innanríkis og uttanríkis, og tesan er heilt grundleggjandi, at eitt land hevur nakrar givnar møguleikar og avmarkingar, treytað av, hvar landið liggur. Føroyar liggja einsamallar mitt úti í norðuratlantshavinum, og tað hevur nakrar serligar avbjóðingar (eitt nú tá tað ræður um flutning) og møguleikar (stórt havøki ríkt í tilfeingi) við sær.

Hetta kann ljóða sjálvsagt, men seinastu árini hava politikarar og akademikarar í grundini droymt um, at vit við tíðini fóru at megna at gera hesar ymiskleikarnar og munirnar – um ikki heilt óviðkomandi, so í øllum førum nógv meiri triviellar. Tá Berlinmúrurin fall í 1989, og Sovjetsamveldið stutt eftir í 1991 rapaði saman, gekk liberali, demokratiski vesturheimurin sigursgongu. Við USA á odda hevði vesturheimurin vunnið á Sovjetsamveldinum og fá umboða tíðarandan hesi árini betri enn amerikanski filosoffurin og stjórnmálafrøðingurin, Francis Fukuyama, sum í 1994 skrivaði eina grein í *Foreign Affairs* undir yvirskriftini "The End of History" – søgunnar endi. Fukuyama vildi vera við, at liberala fólkaræði við sínum politisku og borgarligu rættindum, sínum marknaðarbúskapi og síni virðispolitisku pluralismu og tolsemi *endaliga* hevði sigrað á autokratisku alternativunum, ikki minst kommunismuni.

Móti endanum av seinastu øld skolaði eisini ein verulig demokratiseringsalda yvir heimin, og talið av demokratiskum londum í heiminum fleirfaldaðist. Eitt nú vóru tað í 1995 bert Kuba og Haiti eftir í øllum Suðuramerika, sum framvegis ikki høvdu eina demokratiska stýrisskipan, meðan tað í 1970'unum bert vóru eini tvey-trý demokratisk lond í øllum heimspartinum.

Hetta bjartskygni er horvið heilt í dag.

Vit kundu kalla tað "The Return of History" ella vit kunnu tosa um tað "geopolitisku epokuna" – orðini eru ikki avgerandi her. Tað sum hevur týdning er, at tað slepst ikki undan, at liberala bjartskygni hjá Fukuyama ikki bert er horvið; tað virkar í dag so naivt, at vit hava hug at rópa tað ábyrgdarleyst. Sambært The Economist Democracy Index livdu bert 8,4% av heimsins íbúgvum í einum fullbúnum fólkaræði í 2020. Í 2021 var talið lækkað til 6,4%, meðan meiri enn 37% livdu í einum autoriterum samfelag, so tølini tykjast eisini tala sítt greiða og hugtyngjandi mál (Democracy Index 2021: The China Challenge, 2022) (Democracy Index 2022: Frontline Democracy and the Battle for Ukraine, 2023).

Hóast Føroyar liggja fyri seg sjálvar mitt í Norðuratlantshavið, so eru vit kortini "mitt í verðini". Strategiska plasering okkara merkir, at vit altíð hava verið áhugaverdar fyri stórveldini, og vaksandi týdningurin av at hava ein fingur við í spælinum í Arktis merkir eisini, at hesin áhugin ikki minkar í bræði – heldur tvørturímóti.

Tí mugu vit í Føroyum eisini spyrja okkum sjálvi, hvat hendan gongdin í altjóða politikki merkir og hvør leikluturin

hjá Føroyum í heiminum í grundini er. Fukuyama hevur uttan iva verið ov bjartskygdur: at liberala demokratiið saman við øktum samhandli millum lond – og serliga sokallaður "interdependensur" ella sínamillum treytan – í sær sjálvum fór at gera heimin tryggan, tí at fyrimunirnir við okkara livihátti fóru at vera so innlýsandi fyri tey, ið higartil ikki vóru partur av vesturheiminum, ljóðar bæði naivt og evrosentriskt í dag.

Men er tað kortini ikki okkara skylda at stríðast fyri teimum virðum, vit byggja okkara samfelagsáskoðan á – mannarættindi, fólkaræði, rættartrygd – í altjóða politikki? Eru vit ikki noydd til áhaldandi at virka fyri, at altjóða skipanin fylgir spælireglunum, vit hava samtykt og felt niður í altjóða lóg? Kunnu vit góðtaka at framhaldandi handla við lond, sum uttan haldgóða grund taka seg inn í onnur lond og hvørs hermegi fremur ótespilig krígsbrotsverk móti sivilum?

Tað stendur rættiliga greitt í dag, at vesturheimurin helst átti at verið raknaður við fyrr.

Ávaringarnar og signalini hava verið har, men vit hava hvørki vilja hoyrt ella sæð. Russland hevur seinastu nógvu árini verið á heilt skeivari kós, og hóast nógvir tilburðir áttu at fingið vesturheimin at reagera, so varð heilt fram til februar 2022 hildið fast við trúnna uppá, at Putin-stýrið var til at tosa við, at samráðingar kundu fyribyrgja eini innrás.

Men sum Dumitru Minzarari – granskari við Stiftung Wissenschaft und Politik – skrivaði í apríl 2022, so eru samráðingar sambært Putin-stýrinum fyri tey veiku. Russiskur uttanríkispolitikkur er grundaður á styrki, og tá tú situr við trumfinum, fert tú ikki til samráðingarborðið. At samráðast er eitt demokratiskt prinisipp, og okkara hugsan er, at tað altíð er gott at hava opnar samskiftiskanalir, men í Russlandi verður tað at biðja um samráðingar sæð sum ein veikleiki.

Hevði vesturheimurin víst styrki í januar-februar 2022, so høvdu vit kanska verið í eini heilt aðrari støðu, men Putin fekk tíverri ta fatan, at vesturheimurin tá samanumkom ikki veruliga fór at vera sinnaður heilhjartað at stuðla Ukraina. (Minzarari, 2022)

Aftursvarið úr vesturheiminum – við umfatandi revsitiltøkum, bæði diplomatiskum og búskaparligum; stórum íløgum í trygd og verju og stórum fíggjarligum og hernaðarligum stuðli til Ukraina – bendir á, at vit í vesturheiminum kanska umsíðir hava skilt, hvønn tað er, vit hava við at gera. Hvat tað er, vit í grundini stríðast um. Vit kunnu ikki longur – um vit nakrantíð hava kunna tað – ganga út frá, at demokrati, politisk frælsisrættindi og altjóða rættur fara at verja og handhevja seg sjálvi. Og hetta merkir eisini, at uttanríkispolitikkurin og innanríkispolitikkurin mugu samskipast.

Sum Jens Ladefoged Mortensen, lektari í stjórnmálafrøði við universitetið í Keypmannahavn, skrivar:

> **"Logikken har ændret sig. Det er blevet udenrigspolitisk farligt at varetage ens indenrigspolitiske egeninteresser, som om intet var hændt. Vores politiske handlerum har indsnævret sig. Nødvendighedens politik har fået forrang. Uanset hvor uretfærdigt det end synes, må indenrigspolitik tilpasse sig de nye rammevilkår" (Ladefoged Mortensen, 2023)**

At Føroyar eisini eru partur av hesum stríðnum má ongin ivi vera um. Í Russlandi verður fylgt væl við, hvat fer fram í Føroyum, og eisini orðaskiftið um útflutning okkara av fiskavørum til Russlands og hvørt føroyskar havnir eiga at verða stongdar fyri russiskum skipum, notera tey sær í Russlandi.

Eitt dømi um hetta er greinin "Больше не «рыбное место»? Будущее российско-фарерских связей под вопросом" *(Ikki longur eitt fiskimið? Framtíðarviðurskiftini millum Russland og Føroyar í vanda)*, sum Nikita Belukhin, granskari við russisku Kreml-vinarligu tankasmiðjuna RIAC (Russian International Affairs Council) skrivaði í mai 2022 (Belukhin, 2022). Hesin sami Belukhin hevur eisini skrivað greinar um stórveldispolitikkin í Arktis, og hvussu hann ávirkar ríkisfelagsskapin (Belukhin, 2022) og um sjálvstýrisrørslurnar í Grønlandi og Føroyum, og hvussu tær hótta samanhangsmáttin í Ríkisfelagsskapinum (Belukhin, 2022).

Longu í 2010 skrivaði ein russiskur stjórnmálafrøðingur, Artur Indizjev, eisini eina bók við heitinum "Битва за Арктику" (Stríðið um Arktis), har hann m.a. vísir á, at Russland eigur at gera sær dælt av innanhýsis ósemjum í Ríkisfelagsskapinum við at stuðla Føroyum og Grønlandi í sínari stremban eftir størri sjálvstýri. Á henda hátt kann Russland undirgrava Danmark sum politiskan spælara í Arktis. Heilt ítøkliga skrivar Indizjev, at "Russland noyðist at brúka vaksandi spenningarnar millum Danmark og Grønland og Føroyar til egnan fyrimun við at gera donsku krøvini í Arktis veikari. Í aðru atløgu løna vit teimum tað aftur í gráum kálvsskinni fyri anti-russiska politikkin og stuðulin til tjetjensk loysingarfólk" (Indizjev, 2010).

Eitt annað ítøkiligt dømi, ið vísir greiðan samanhang millum russiska politiska strategi og handling, er militariseringin av sivilum russiskum skipum.

Í mai 2022 kom fram, at Russland fór at gera tillagingar í síni maritimu doktrin (sum er politiska herflotastrategi Russlands) soleiðis at eisini granskingarskip, fiskiveiðiskip og ísbrótarar blivu fevnd av russiskari flotatilbúgving og kundu verða kravd at gera tænastu fyri russiska flotan. Tann 31. juli 2022 skrivaði Putin so undir eina fyriskipan, ið formliga setti nýggju doktrinina í gildi. Í nýggja tekstinum er m.a. eitt brot um "Mobiliseringsfyrireiking og mobiliseringstilbúgving", har tað m.a. stendur skrivað um raðfestingarnar innan maritimt virksemi, at: "at betra mannagongdirnar at avhenda russisku hermegini mobiliseraði sivil skip – í krígstíð og tá mobilisering er lýst" og at farast skal undir at "betra mannagongdirnar fyri herbúgving og nýtslu av flutningsskipum, fiskiskipum og spesialiserðum skipum uttan mun til ognarviðurskifti..." (Морская доктрина Российской Федерации, 2022).

Við øðrum orðum, so eru øll russisk skip nú partur av russiskari herflotatilbúgving, og hetta eigur sjálvandi at fáa ávaringarklokkurnar hjá okkum í Føroyum at ringja. Her kunnu russisk skip framvegis sigla frítt og liggja í havn. At talan heldur ikki bara er um orð fingu vit eisini sjón fyri søgn herfyri, tá DR, NRK, SVT og Yle í sendirøðini 'Skyggekrigen' kundu avdúka, at russisk skip – bæði herskip og sivilskip – hava siglt í norðsjónum m.a. við tí fyri eyga at kortleggja havvindmyllulundir, gassleiðir, streym- og netkaðlar. Lítil ivi kann vera um, at ætlanin er at velja út mál til sabotasju (Fastrup, Quass, & Ledegaard, 2023).

Eitt av hesum skipunum, Melkart-5, sum sambært norsku Etterretningstjenesten hevur kvett ein telekaðal millum Svalbard og Noregi, kom síðani til Føroya og varð tikið upp á beding.

Hetta eigur at gera tað púra greitt, at vit í Føroyum vera noydd til at taka hesa hóttanina móti okkara trygd í álvara. At russiskir trolarar ella farmaskip kunnu vera í føroyskum sjógvi í hernaðarørindum er sjálvandi ørkymlandi, men tað er eisini bara ein staðfesting av, at Føroyar heldur ikki sleppa undan at taka støðu til russiskt hybridkríggj móti vesturheiminum.

**FAKTA**

## Russiskt hybridkríggj

**Russisk hernaðarstrategi byggir á tað, vit rópa "hybridkríggj". Hybridkríggj er ein samanseting av hernaðarligum og ikki-hernaðarligum amboðum og átøkum, og vit tosa í hesum sambandi ofta um "Gerasimov-doktrinina" – uppkallað eftir russiska generalinum Valerij Gerasimov, sum í skrivandi stund er ovasti í russiska herstjórnarráðnum og russiskur varaverjumálaráðharri.**

**Hóast talan í grundini ikki er um eina veruliga doktrin, so setir Gerasimov í eini kendari grein frá 2013 orð á grundleggjandi hugsanirnar í russiskum hernaðarlogikki. Gerasimov sigur m.a., at kríggj í framtíðini fara at verða eyðkend við, at tey ikki eru meldað, at mørkini millum tað hernaðarliga og ikki-hernaðarliga kámast burtur, og at stríð fara at verða bæði fysisk og informatiónskríggj. Politisk, diplomatisk, búskaparlig og onnur ikki-hernaðarlig (eitt nú cyber) amboð og átøk eru partur av hybridkrígsførsluni, og eru minst líka týdningarmikil sum vanlig fysisk amboð og átøk.**

***(Spliedsboel Hansen, 2016)***

### KRÍGGJ VIÐ ØÐRUM TÓLUM: GEOBÚSKAPARLIGA AFTURSVARIÐ ÚR VESTURHEIMINUM

Tann stóri spurningurin í dag, nú Russland hevur endavent trygdarpolitisku støðuni í Evropa er sjálvandi: hvussu svarar tú einum stórveldi í tínum grannalagi aftur, sum hevur í ríkiligt mát av bæði konventionellari hernaðarútgerð og kjarnorkuvápnum?

ES hevur onga felags hermegi, og harumframt hevur tað eftir kalda kríggið ongantíð verið uppá tal, at vesturheimurin fer í eitt beinleiðis vápnað stríð við Russland. Til tess er vandin fyri, at kríggið stigvíst harðnar og at kjarnorkuvápn verða tikin í brúk, ov stórur.

Tí svaraði vesturheimurin í fyrsti atløgu Russlandi aftur við "geobúskaparligum" amboðum – t.e. búskaparligum amboðum, ið hava til endamáls at fremja (geo)politisk endamál: umfatandi búskaparligari hjálp til Ukraina og

umfatandi revsitiltøkum – sum ofta verða rópt "war by other means" ella "the economic weapon" – móti Russlandi.

Í hesum partinum verður hugt eitt sindur nærri at revsitiltøkunum, ið vesturheimurin (USA, ES, G7-londini) hava sett í verk móti Russlandi. Ætlanin er ikki at lýsa hesi út í æsir, men heldur vísa á gongdina seinastu árini og taka fram nakrar av høvuðslinjunum í orðaskiftinum um revsitiltøk móti Russlandi – ikki minst yvirskipaðar spurningar sum: hvørji atlit vit mugu taka, tá vit umrøða at seta í verk revsitiltøk? Rigga revsitiltøk yvirhøvur?

Og ikki minst: ber til at siga, at vit hava eina moralska ábyrgd at seta í verk revsitiltøk?

## VESTURLENDSK REVSITILTØK MÓTI RUSSLAND: TOO LITTLE, TOO LATE?

Startskotið til tey eftirhondini umfatandi revsitiltøkini móti Russland varð latið av í 2014, eftir at vesturheimurin at kalla vaknaði við kaldan dreym, tá Russland í eini handavending ólógliga hersetti Krimhálvoynna og limaði hana inn í Russland.

Russland hevði longu í 2008 víst, at landið uppá ongan máta ætlaði sær at góðtaka verandi trygdarpolitisku støðuna í Evropa, sum líðandi varð versnað – og fyribils hevði nátt eitt nýtt lágpunkt við sokallaðu München-røðuni hjá Vladimir Putin árið frammanundan, har hann m.a. segði, at

> **"Víðkanin av NATO (...) hevur onki við tað at veita vissu fyri trygdini í Evropa at gera. Tvørturímóti, so er talan um eina álvarsliga provokatión, ið avlagar sínamillum álit millum partarnar. Og vit [Russland, red.] hava allan rætt til at spyrja: hvørjum er hendan víðkanin ætlað?"**

Sum beinleiðis aftursvar upp á eitt lyfti frá NATO-londunum á einum toppfundi í Rumenia um, at Ukraina og Georgia við tíðini kundu gerast limir í NATO, gjørdi Russlandi innrás í Georgia. Vesturlendska aftursvarið var lunkað í 2008: fordøming og lyftir peikifingrar – hetta hóast ongin ivi kundi vera um, at hetta var eitt ávaringarskot frá Russlandi: haldið tykkum vekk frá okkara nærøki!

Russiskt-sinnaði forsetin í Ukraina, Viktor Janukovitj, varð eftir Euromajdan uppreisturin í 2014 rikin frá valdinum, og tá ið teir sokallaðu "grønu mennirnir" – hermenn uttan nakað sjónligt eyðmerki – brádligu vórðu sæddir á Krim, har teir skjótt løgdu hálvoynna undir seg – varð tí skjótt avrátt í USA og ES, at hesuferð skuldi aftursvarið verða meiri kontant. Ikki minst tá ið russiskt-sinnaðar militisir í Donbas-økinum har eysturi í Ukraina skutu niður MH17 - eitt ferðafólkafólkaflogfar hjá Malaysia Airlines ávegis til Kuala Lumpur úr Amsterdam.

Russland skuldi revsast og merkja sviðan av ikki at halda seg til galdandi altjóða lóg.

Áðrenn vit fara nærri inn á, hvørji hesi tiltøkini vóru – og eisini tey nýggju, sum eru sett í verk eftir russisku innrásina í Ukraina í februar 2022, er fyrst kanska hent at siga eitt sindur um, hvat revsitiltøk – ella "avmarkandi tiltøk", sum tað eitur á ES-máli – í grundini eru fyri nakað.

Ein vanlig fatan av revsitiltøkum er, at tey eru eitt politiskbúskaparligt amboð, sum hevur til endamáls at noyða onkran (ein stat, ein bólk, ein einstakling) at broyta atferð við at leggja serliga búskaparligt (men revsitiltøk kunnu eisini vera t.d. diplomatisk) trýst á móttakaran, sum er tann, ið verður revsaður. Tann, ið setir revsitiltøkini í verk, rópa vit sendaran.

Hugsanin er at hetta kann henda upp á tveir mátar:

1) við at búskapurin yvir ein kamb viknar so mikið nógv, at vanligi borgarin verður galvaniseraður til mótstøðu móti stýrinum ella
2) valdsforskjótingar fara fram í politisku elituni – t.d. millum meiriluta og andstøðu – soleiðis at eitt nýtt stýri kann taka við, ella at stýrið má sleppa ávísum ætlanum ella gera nýskipanir til tess at varðveita sína undirtøku.

Alto, um Putin-stýrið orsaka av búskaparligari afturgongd kemur undir so mikið stórt politiskt trýst, at landið tekur seg úr Ukraina, so kunnu tiltøkini sigast vera eydnast. Í førinum við Russlandi vildi mátistokkurin fyri, um revsitiltøkini hilnast, sostatt verið broytt politisk kós í Kreml.

Tey flestu hava tó í dag eina breiðari fatan av revsitiltøkum. Endamálið við revsitiltøkum er nevniliga ikki neyðturviliga at noyða móttakaran at broyta atburð ella politiska kós. Revsitiltøk kunnu hava fleiri endamál – og enntá fleiri endamál í senn. Eisini er vert at hava í huga, at hóttanin um revsitiltøk eisini er týdningarmikil, og hevur í summum førum størri ávirkan enn revsitiltøkini sjálvi.

## VESTURLENDSK AVMARKANDI TILTØK MÓTI RUSSLANDI

Í løtuni hava ES-londini samtykt tíggju sanktiónspakkar

við revsitiltøkum móti Russlandi, og talan er um bæði diplomatisk og búskaparlig revsitiltøk, eins og talan bæði er um sokallað 'málrættað' tiltøk og sektorrevsitiltøk (sí faktaboks).

ES-nevndin boðaðið tíðliga í tilgongdini greitt frá, at endamálini við revsitiltøkunum móti Russlandi (og Belarus) vóru trý í tali:

1. Minka um førleikan hjá russisku stjórnini at fíggja kríggið í Ukraina
2. At áleggja russisku elituni, ið hevur ábyrgd av innrásini í Ukraina, fíggjarligar og politiskar kostnaðir
3. Avmarka búskaparliga grundarlag Russlands

Eitt fjóðra endamál er signalvirði.

Tað, at vesturheimurin – og í grundini ikki bert ES og USA, men eisini onnur G7-lond og t.d. Sveits og Singapore – so skjótt og við so breiðari semju hevur sett so umfatandi revsitiltøk í verk, hevur sent eitt greitt signal til Russland og umheimin annars um, at atburðurin hjá Russlandi ikki verður góðtikin.

Tað er tó ein týdningarmikil spurningur, hvussu framtíðin hjá ES-revsitiltøkunum sær út, tí ES hevur tvær avbjóðingar tá tað um revsitiltøk ræður.

Tann fyrra er, at tað er felags trygdar- og verjupolitikkurin í ES – Common Security and Defence Policy (CSDP), sum heimilar ES at seta revsitiltøk í verk. Treytin er tó, at full semja er millum øll limalondini um tiltøkini. Og hóast tað higartil er eydnast heilt væl at seta tiltøk í verk, so eru tað lond í ES, sum ikki eru eins eldhugað og onnur at seta umfatandi tiltøk í verk – eitt nú Ungarn, ið hevur verið ein stórur innflytari av russiskum gassi.

Ein onnur avbjóðing er, at tað ikki er full semja í ES um, hvat evsta endamálið við tiltøkunum er. ES-londini eru býtt í tveir bólkar: á einu síðuni eru "hardline'arar" – eitt nú tey Baltisku londini og Pólland – sum vilja, at revsitiltøkini umframt at noyða Russland at taka seg úr Ukraina eisini eiga at bróta niður Russland so mikið nógv, at landið ikki í framtíðini kann gera innrás í eitt grannaland.

Á hini síðuni eru lond sum Frakland og Týskland, ið halda, at evsta endamálið við revsitiltøkunum skal vera at geva Russlandi "incitament" til at taka seg aftur úr Ukraina.

# FAKTA

## Endamál við revsitiltøkum

**Revsitiltøk kunnu hava ymisk endamál. Endamálið kann m.a. vera:**

### RÆÐSLA ('DETERENCE'):

Ofta verður roynt heilt at sleppa undan at brúka revsitiltøk, men heldur við hóttanum um at seta tey í verk royna at ræða móttakaran. Hetta royndu USA og ES um árskiftið 2021-2022, tá roynt var at ræða Russland frá at gera innrás í Ukraina – tó uttan at tað eydnaðist.

### REVSING:

At revsa móttakaran – t.d. fyri brot á altjóða lóggávu ella krígsbrotsverk – kann vera eitt endamál í sjálvum sær. Her verða revsitiltøk nýtt til at tryggja rættvísi. Einstakir persónar kunnu eisini revsast fyri sín part í ivasomum virksemi við t.d. at hald verður lagt á ognir teirra.

### SKAÐA KAPASITETIN HJÁ MÓTTAKARANUM AT FØRA KRÍGGJ:

Við at forða fyri innflutningi av vápnum og lutum, sum kunnu brúkast til vápnaframleiðslu (eisini sokallaðum dual-use lutum, sum t.d. mikroprosessarir, sum kunnu brúkast til telefonir, men eisini missilskipanir) kunnu revsitiltøk skaða evnini hjá móttakaranum at føra kríggj.

### SKAÐA BÚSKAPARLIGA KAPASITETIN HJÁ MÓTTAKARANUM:

Við eitt nú innflutnings- og útflutningsforboðum og fíggjarligum tiltøkum (t.d. útihýsing úr SWIFT, sýtan fyri at veita lán) ber til at raka búskapin hjá móttakaranum. Hetta er sjáldan eitt mál í sjálvum sær, men kann óbeinleiðis fremja politisk endamál, t.d. raka legitimitetin hjá stýrinum í móttakaralandinum og elva til ónøgd millum fólk og politisk órógv.

### SENDA EITT SIGNAL:

Endamálið við revsitiltøkum kann eisini vera at senda eitt signal – t.d. til egnar íbúgvar, aðrar statir, móttakaran. Eitt nú sendir tað eitt greitt signal til umheimin, tá øll ES-londini (saman við USA og G7-londum sum Stórabretlandi, Kanada og Japan) sameind seta tiltøk í verk móti Russlandi.

## ES-REVSITILTØK MÓTI RUSSLANDI

"Avmarkandi tiltøkini", sum ES hevur sett í verk móti Russlandi eru samtykt í tíggju umførum (teir sokallaðu sanktiónspakkarnir). Hesi fevna m.a. um:

- Individuell revsitiltøk móti 1.473 persónum (t.d. Putin og týdningarmiklum persónum í stjórnini) og 207 eindum (t.d. bankum, politiskum flokkum, Wagner-bólkinum o.s.fr.) – eitt nú innferðarforboð, hald lagt á ognir, kontur innifrystar o.s.fr.
- Fíggjarlig tiltøk, ið hava við sær, at flestu russisku bankar – herundir russiski miðbankin – eru útihýstir úr øllum samstarvi við evropeisku fíggjarmarknaðirnar, og at fleiri russiskir bankar ikki longur hava atgond til altjóða millumbankaskipanina SWIFT.
- Fleiri russiskir statsmiðlar hava ikki longur sendi- og útgávuloyvi í ES – m.a. RT og Sputnik News.
- Forboð móti at russisk skip kunnu brúka ES-havnir, móti at russisk flogfør kunnu brúka ES-flogvallir og -loftrúm og forboð móti russiskum flutningsakførum á ES-vegum.
- Forboð fyri at ES-borgarar og fyritøkur kunnu veita Russlandi og russiskum borgarum ávísar tænastur.
- ES-forboð móti innflutningi av russiskari olju og oljuúrdráttum umframt eitt prísloft á russiska olju, ið verður handlað við evropeiskum aktørum ella evropeiskari fígging.

(EU response to Russia's invasion of Ukraine, 2023)

Hesi tiltøkini eru yvirhøvur samskipað við USA og G7-londini, sum eisini hava sett líknandi tiltøk í verk. Ein røð av diplomatiskum tiltøkum eru eisini sett í verk, eitt nú er Russland útihýst úr eini røð av altjóða felagsskapum (m.a. Evroparáðnum, ST-mannarættindaráðnum, OECD og OSCE), eins og nøkur lond hava sett innferðarforboð í verk móti russiskum ríkisborgarum. Í nógvum ítróttargreinum sleppa russisk ítróttarfólk heldur ikki at luttaka undir russiskum flaggi.

## RIGGA REVSITILTØKINI?

Fyri at seta spurningin um revsitiltøk rigga, so er fyrst neyðugt at gera sær greitt, hvør mátistokkur skal brúkast, og sum longu nevnt omanfyri, so kann talan vera um ymisk endamál við tiltøkunum. Hugsanin í ES er, at tiltøkini skulu røkka fleiri endamálum í senn, eins og tað í grundini ikki er full semja um, hvat evsta endamálið við revsitiltøkunum skal vera.

Men vit kunnu í øllum førum hyggja at, hvørja ávirkan tiltøkini hava – ikki minst hvørja búskaparliga effekt tey hava, eftirsum rættiliga breið semja tykist vera um, at eitt endamál við revsitiltøkunum í øllum førum er at niðurlaga tann russiska búskapin.

Tí er spurningurin sjálvandi: er russiski búskapurin raktur av og minkaður, eftir at revsitiltøkini eru sett í verk?

Sambært eini frágreiðing, granskingartænastan hjá Evropaparlamentinum hevur gjørt, so ber til at siga, at tiltøkini frá 2014 í kjalarvørrinum av ólógligu anneksiónini av Krimhálvoynni, í árunum 2015-

2018 hava kosta eitt stað millum 2-8% av BTÚ í Russlandi. Her er eisini vert at hava í huga, at heimsbúskapurin kumulativt í árunum 2014 til 2019 vaks knøpp 20%, meðan búskapurin í Russlandi einans vaks við 6% sama tíðarskeið (Russel, 2022).

Í síni prognosu fyri búskaparvøksturin í Russlandi frá januar 2022 metti Altjóða valutagrunnurin (IMF), at russiska BTÚ fór vaksa 2,8% í 2022 og 2,1% í 2023. Eitt sindur meiri varisliga metti Heimsbankin (World Bank) at vøksturin fór at vera 2,4% í 2022 og 1,8% í 2023. Í marts í fjør broyttist myndin heilt, og nú metti russiska fíggjarmálaráðið, at búskapurin fór at minka 10% í 2022, og Heimsbankin og IMF høvdu líknandi metingar (millum 10-12% afturgongd).

Russland setti tó eina røð av átøkum í verk, ið hava víst seg at rigga betri, enn væntað. Tí metti IMF í eini dagførdari meting í januar 2023, at russiski búskapurin minkaði 2,2% í 2022 (Caprile & Delivorias, 2023). Tað er also ongin ivi um, at árinini á russiska búskapin ikki hava verið so umfatandi, sum spátt var tíðliga í 2022, men greitt er eisini, at tiltøkini hava eina ávirkan á russiska búskapin.

Serliga sæst hetta í útvaldum sektorum. Eitt nú minkaði bilframleiðslan í Russlandi 50% í 2022, í tráð við at tað bleiv trupult at fáa neyðugu lutirnar til framleiðslu. Metingar vísa eisini, at prísurin á bilum er hækkaður 20-30%, samstundis sum góðskan er lækkað munandi (t.d. hava nógvir bilar ongan airbag longur). Eisini heilivágsídnaðurin í Russlandi er meint raktur, og metingar vilja vera við, at heimaframleiðslan av heilivági er minkað við 80% eftir at revsitiltøk vórðu sett í verk. Av tí at nógv ung heilsustarvsfólk eisini eru flýdd úr landinum kann russiska heilsuverkið fáa stórar avbjóðingar framyvir (Snegovaja, Dolbaia, Fenton, & Bergmann, 2023).

Vladimir Milov, serfrøðingur í russiskum búskapi og eitt skifti vararáðharri í orkumálum undir Putin, metir, at revsitiltøkini hava størri ávirkan á Russland, enn tey flestu geva sær fær um. Hann skrivar:

> **“Hóast tað er tíðiliga at meta um árinini av altjóða revsitiltøkunum móti Russlandi, ið sett vóru í gildi eftir innrásina hjá Putin í Ukraina í 2022, so er greitt, at tiltøkini hava eina stóra, negativa ávirkan á integritetin í búskaparmodellini í Russlandi undir Putin og hava umfatandi árin tvørturum nógvar lyklarsektorar í russiska búskapinum” (Milov, 2023).**

Ein annar máti at meta um revsitiltøkini, er við at sammeta við onnur dømi um altjóða revsitiltøk, ið vit í dag kunnu greina og meta um effektin stóð mát við endamáli(ini). Maria Snegovaja og aðrir greinarar fyri Center for Strategic & International Studies, hava brúkt hesa tilgongdina, og vísa á, at altjóða revsitiltøkini móti apartheid-stýrinum í Suðurafrika og prestastýrinum í Iran geva okkum góðar ábendingar um, at hóast tiltøkini ikki upp á stutt sikt góvu stýrunum eitt avgerandi knock-out, so elvdu tær líðandi og við tíðini til umfatandi politiskan óstabilitet og politiskar trupulleikar fyri valdshavarnar. Í Suðurafrika endaði tað við, at apartheid-stýrið mátti fara frá, meðan vit í dag síggja umfatandi mótmælisgongur og uppreistur móti prestastýrinum hjá Khomeini í Iran – lutvíst sum avleiðing av eini vaksandi misnøgd við vánaligu livikorini í landinum, ið búskaparligu revsitiltøkini móti landinum eisini eiga sín part í .

Snegovaja og starvsfelagaðar hennara koma tí til niðurstøðuna:

> **“Samanumtikið, so vísir hendan greiningin at tað eru góðar grundir til framhaldandi at verða bjartskygdur um revsitiltøkini. Við tíðini, so elvdu umfatandi revsitiltøkini hjá altjóða samfelagnum móti stýrunum í Iran og Suðurafrika til stórar sosialar avbjóðingar, elvdu til innlendis ófrið og noyddu stýrið at geva eftir fyri altjóða samfelagnum” (Snegovaja, Dolbaia, Fenton, & Bergmann, 2023)**

Sum argument fyri, at tiltøkini ikki hava rigga, kann ein føra fram, at revsitiltøkini frá 2014 og fram høvdu onga knock-out effekt á russiska búskapin. Búskapurin var í rímiliga góðum standi í 2022, tá Russlandi gjørdi innrás í Ukraina.

Revsitiltøkini høvdu heldur ikki tað ynsktu politisku effektina á stýrið í Kreml – heldur tvørturímóti hevur Russland seinastu árini havt kós móti meiri konsolideraðum autokrati og uppílegging og destabilsering á altjóða pallinum (t.d. uppílegging í forsetavalið í USA í 2016). Hóttanin um revsitiltøk hevur also ikki minkað um áhugan í Russlandi at føra hybridkríggj.

Tað er eisini eyðsýnt, at revsitiltøkini ikki høvdu ta “deterrence”-effekt – also ”forskrekkings-effekt”, sum summi hildu tey hava. Vónin var, at hóttanin um umfatandi revsitiltøk fór at ræða Russland frá at gera innrás í Ukraina. Og hóast ES í 2019 – eftir at tveir FSB-agentar høvdu roynt at taka lívið av Sergej Skripal í London í 2018 – fór undir revsitiltøk móti teimum, sum brúka kemisk vápn, so endurtók søgan seg í marts 2021, tá russisku trygdartænasturnar royndu at taka lívið av russiska andstøðupolitikararnum, Aleksej Navalnyj, við eiturevninum Novitjok. Spurnartekin kunnu sostatt setast, um revsitiltøk yvirhøvur ræða Putin og hansara stýri.

Spurningurin um revsitiltøkini rigga veldst sostatt eitt sindur um, hvussu tú spyrt, og hvussu tú mátar, men samanumtikið kunnu vit staðfesta, at tað er sumt, sum talar fyri at revsitiltøk rigga, og sumt, sum hinvegin talar ímóti at tey rigga.

Ein annar spurningur er, ið eisini hevur uppiborið viðger, er: Hava vit eina moralska skyldu til at seta revsitiltøk í verk móti Russlandi? Tað kann tykjast sum ein rímiliga einfaldur spurningur, men tað er í grundini ikki so lætt at gera av, um vit eiga at seta í verk revsitiltøk móti Russlandi – uttan mun til um tey rigga ella ikki.

Tað fara vit at viðgera eitt sindur nærri nú.

## FØROYSK TILTØK MÓTI RUSSLANDI: ALTJÓÐA POLITIKKUR OG MORALUR

Í samrøðu við Dag & viku 14. apríl í samband við tíðindafund í Tinganesi segði Lars Løkke Rasmussen, uttanríkisráðharri, m.a. soleiðis við Kringvarpið:

> **“Etik og handelspolitik hænger sammen – det er de begyndt at gøre. Der har været en lang periode, hvor det var ren globalisering: “Vi handler bare, og når vi handler, så slås vi ikke.” Og det vi har lært,**

**og først for alvor forstået efter Ukraine-krigen, er at så god er verden desværre ikke".**

Eisini í Føroyum hevur tað leingi verið hugsanin, at handilspolitikkur og uttanríkispolitikkur eiga at verða skild hvør frá øðrum. Men ber tað yvirhøvur til? Tey flestu kenna til ymisk dømi um, at tað ikki altíð er so lætt at viga moralskar skyldur upp í móti peningaligum áhugamálum, men kunnu vit bara seta okkara moralsku skyldur til viks, tá tað ræður um handil og pening?

Í tí nógva orðaskifti, sum hevur verið um føroyska samhandilin við Russland og okkara sínamillum fiskiveiðiavtalu, hevur moralska dimensjónin ikki fingið so nógva viðger. Signalini úr okkara grannalondum hava kortini yvirhøvur verið, at tað hevði tænt bæði Føroyum og ríkisfelagsskapinum betri, um Føroyar fann aðrar marknaðir til sín fisk og eisini segði upp fiskiveiðiavtaluna við Russland.

Í hesum samanhangi eru tvær grundgevingar, ið ganga aftur:

1. í verandi støðu má vesturheimurin standa saman móti Russlandi, og sum ein savnaður frontur stríðast fyri, at Russland ikki sleppur avstað við sínum atburði, og
2. at russiska framferðin er so grov og ótespilig, at tað liggur ein moralsk skylda á okkum í felag at gera okkara til at revsa Russland og isolera og byrgja landið inni.

Fyrst er tó neyðugt at vísa á, at áherðsla aloftast hevur verið løgd á, at hetta er ein føroysk avgerð. Forstáilsi hevur eisini verið fyri, at Føroyar ikki soleiðis frá degi til dags kunnu finna nýggjar marknaðir.

Eisini er tað týdningarmikið at vísa á, at spurningurin í Føroyum ikki snýr seg um, hvørt vit eiga at seta revsitiltøk í verk móti Russlandi. Tað er breið semja um hetta, eisini í politisku skipanini. Tað er ikki soleiðis, at Føroyar onki hava gjørt síðani russisku innrásina.

Føroyar hava:

1. fordømt Russisku innrásina í Ukraina,
2. sett revsitiltøk í verk móti Russlandi,
3. tikið móti ukrainskum flóttum og
4. sent Ukraina fíggjarliga hjálp.

Harumframt hava summar fyritøkur eisini av sínum eintingum valt at taka seg úr Russlandi, eins og privatir felagsskapir hava savnað inn og latið pening inn til Ukraina. Einstakir føroyingar hava eisini sjálvbodnir meldað seg í ukrainsku fremmedlegiónina.

Spurningurin snýr seg tí heldur um, hvørt vit hava gjørt nóg nógv.

Og her er tað serliga hetta, at hóast Føroyar hava sett teir fyrstu fimm ES-sanktiónspakkarnar í gildi, so halda summi, at hetta hevur verið ein bíligur umgangur fyri Føroyar. Føroyar valdu enntá tulka ES-tiltøkini øðrvísi enn í Danmark, soleiðis at russisk fiskiskip framvegis sleppa at leggja at í Føroyum (Evensson, 2022). Summi vilja eisini vera við, at upphæddirnar Føroyar hava latið Ukraina áttu at verið munandi størri, skuldi vit latið nakað, sum samsvara nøkulunda við tað, onnur lond hava latið. Og so er sjálvandi fiskiveiðiavtalan við Russland.

Í hesum partinum her verður ikki roynt at svara uppá, um tað er rætt ella ikki, at Føroyar hava gjørt ov lítið. Í staðin verður víst á nøkur av teimum viðurskiftum, sum mugu við í eina slíka moralska greining, og víst verður á tvær ymiskar moralskar argumentatiónsstrategiir, ið verða brúktar at grundgeva fyri einum moralskum kravi um, at Føroyar seta meiri umfatandi revsitiltøk í verk móti Russlandi.

Í høvuðsheitum snúgva moralsku argumentini seg um, at vit 1) siga okkum hoyra til vesturheimin og standa saman við vestanlondunum og 2) moralska skyldan at revsa ella skaða Russland fyri síni krígsbrotsverk.

### "FØROYAR ERU PARTUR AV VESTURHEIMINUM"

Tá sagt verður, at "Føroyar eru ein partur av vesturheiminum", so er hetta í grundini at staðfesta nakað, vit øll vita. Í Føroyum samstarva og sammeta vit okkum við vesturlendsk lond, og vit vilja gjarna varvðeita eitt gott samband við hesi. Um Føroyar ferð eftir ferð í uttanríkispolitisku framferð okkara vísa hesum londum, at vit ikki eru samd við tey, so kann tað fáa avleiðingar fyri okkara samstarv. Tí er tað als ikki uttan týdning, hvørji politisk signal vit senda okkara grannalondum og umheiminum.

Tí – ljóðar eitt moralskt argument – eru vit noydd til at senda eitt greitt signal til okkara samstarvsfelagar og umheimin, at vit ikki góðtaka russiska kríggið í Ukraina. Tað ber til at føra fram, at hendan skyldan kemst av okkara skyldu til saman við vesturlendskum londum at verja mannarættindi og demokratisku samfelagsskipanin v.m., men tað ber eisini væl til at argumentera meiri gagnetiskt fyri, at politiskt-strategiskt mugu vit í uttanríkispolitikki gera tað, sum gagnar flest føroyingum mest møguligt, og at tað í longdini er tað besta fyri Føroyar at samstarva

við vesturlendsk lond. Moralska skyldan at tryggja føroyska vælferð kann also liggja til grund fyri umfatandi revsitiltøkum, sum – hóast tey kanska upp á stutt sikt raka ávísar fyritøkur ella einstaklingar – í longdini eru frægasti valmøgleikin.

Orsøkin til, at tað kann skaða føroyska vælferð framhaldandi at samstarva við Russland er, at Føroyar kann fáa eitt keðiligt umdømi sum ein óálítandi samstarvsfelagi. Hóast tað er ilt at siga, heilt ítøkliga hvat hetta kann hava við sær av avleiðingum fyri Føroyar, so er lítil ivi um, at vælvildin mótvegis Føroyum vil minka, um londini, vit samstarva við, fáa eina fatan av, at vit ikki hava somu áhugamál og virðir. Og um teirra fatan verður, at vit ikki eru líka greið í okkara fordøming av Russlandi.

Ein negativ mynd av Føroyum í okkara grannalondum kann fáa búskaparligar avleiðingar – serliga í hesum døgum, nú fyritøkur byrja at ásanna og skjalfesta sína samfelagsábyrgd (í sokallaðum CSR-ætlanum) og eru tilvitaðar um, hvønn tær samstarva við. Tá føroyskir laksaútflytarar av sínum eintingum velja at taka seg úr Russlandi, so er hetta ivaleyst eitt dømi um, at fyritøkurnar eru tilvitaðar um, hvørja ávirkan tað kann hava á umdømi teirra framhaldandi at selja til Russlands.

Avgerðin at fylgja vesturheiminum í øllum lutum av sanktiónum og politiskari fordøming kann tí sambært hesum sjónarmiði geva góða meining bæði uttanríkispolitiskt og búskaparliga.

## MORALSK SKYLDA AT REVSA RUSSLAND

Tað ber eisini til at argumentera fyri, at Føroyar hava eina skyldu at gera alt, vit eru mentar, til tess at steðga krígnum í Ukraina.

Á einum tíðindafundi í Kina tann 5. apríl førdi Josep Borell, uttanríkisleiðari í ES, fram, at "Kina hevur eina moralska skyldu at steðga kríggi Russlands í Ukraina" (Feng, 2023). Ivaleyst hevði Borell á eini vitjan í Føroyum sagt, at eisini Føroyar hava somu moralsku skyldu. Argumentið her er, at lond hava eina moralska skyldu til ikki bert at taka frástøðu frá órættvísi og ólógligum ágangi – eitt nú krígsbrotsverkum og brotum á altjóða lóg – men eisini at gera alt, tey eru ment at steðga órættvísi.

Føroyar kunnu neyvan – hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis – ávirka russiskan uttanríkispolitikk, ella førleika Russlands at føra kríggj í Ukraina. Men førast kann fram, at tað er avgerandi, at Føroyar ikki – hvørki aktivt ella passivt - góðtaka russisku aggressiónina í Ukraina.

At halda fram við verandi samstarvi sum onki var hent, kann tí ikki góðtakast, sambært hesum sjónarmiði.

## NØKUR MÓTARGUMENT

Tað týdningarmesta mótargumentiå móti teimum báðum argumentunum omanfyri er, at meiri umfatandi revsitiltøk koma at raka Føroyar nógv harðari enn Russland. Politiska skipanin í Føroyum hevur eina moralska skyldu mótvegis føroyska fólkinum, ið møguliga er sterkari enn skyldan

mótvegis øðrum londum. Tí má kostnaðurin av tiltøkunum, sum í síðsta enda kann raka føroyska vælferð, takast við í samlaðu metingina.

Samstundis er tað ikki heilt greitt, hvussu tað at selja fisk til Russlands er at stuðla russiskari aggressión í Ukraina. Sambandið kann í besta føri vera óbeinleiðis. Fiskur kann ikki - mótsett vápnum, olju ella maskinlutum – brúkast til at føra kríggj, og tí kann føroyskur fiskaútflutningur ikki so lætt knýtast beinleiðis at russiskum mannarættindabrotum í Ukraina. Um russiskir hermenn fáa føroyskan fisk at eta við hermótið, so ber møguliga til at argumentera fyri, at føroyar beinleiðis stuðla russiskari aggressión. Men kausala sambandið er framvegis rættiliga tunt.

Tað ber eisini til at siga, at við *ikki* at selja fisk til Russlands, so kunnu Føroyar frígera pengar, ið kunnu brúkast til keyp av meiri ivasomum slag – ella lata aðrar statir, ið kanska sjálvir hava trupult við at respektera mannarættindini, fáa hesar inntøkurnar og sleppa fram at at selja russum fisk.

Hava Føroyar eina moralska skyldu at siga upp fiskiveiðuavtalu okkara við Russland? Tað veldst um eina røð av viðurskiftum, ikki minst hvussu stórur samfelagskostnaðurin av hesum hevði verið fyri Føroyar. Men onnur viðurskifti eru eisini viðkomandi, og tað ber væl til at føra fram, at vit hava eina skyldu til at gera alt tað, vit kunnu at skaða Russland og forða landinum at føra kríggj. Ella at hóast tað kann kosta okkum nakað upp á stutt sikt, so er tað skilabest fyri Føroyar í longdini at siga upp avtaluna fyri at senda eitt greitt signal til okkara sameindu og umheimin annars.

Í seinastuni hava eisini verið nógvar røddir frammi – herundir Lars Løkke Rasmussen, danskur uttanríkisráðharri – um, at Føroyar ikki kunnu vænta sær eina góða handilsavtalu við ES, um hurðin til Russlands framvegis er opin. Við øðrum orðum: Tað hevur sínar politisku og handilsligu vandar, enda vit sum einasta vestanland við eini beinleiðis handilsavtalu (her fiskiveiðuavtalu) við Russland.

**NIÐURSTØÐA**

Avgerðin um framtíðarsamstarv Føroya við Russland má takast við altjóða politisku gongdini seinastu árini og verandi støðu í huga. Hóast tað er avgerandi at kanna, hvat vit forvinna (ella tapa) av hesum samstarvi, so hava vit sæð, at meira enn bert krónur og oyrur eru upp á spæl.

Gongdin í altjóða politikki seinastu árini hevur køvt bjartskygnið og dreymarnar um "the end of history", ið veruliga vóru tíðarandin eftir at Berlinmúrurin og Sovjetsamveldið rapaðu saman móti endanum av farnu øld. Fólkaræði, mannarættindi og altjóða lóg eru ikki longur nøkur sjálvfylgja – tvørturímóti hevur nýggja "geopolitiska epokan" og útbreiðslan av hybridkríggi staðfest, at uttanríkispolitikkur og innanríkispolitikkur í dag illa kunnu skiljast sundur. Eisini Føroyar mugu taka støðu til broyttu trygdarpolitisku støðuna og taka russisku hóttanin í álvara.

Tað er lítil ivi um, at umfatandi revsitiltøkini móti Russlandi endurspegla ein ótta fyri, hvussu framtíðin fer at síggja út. Vesturheimurin tykist hava ásannað, at neyðugt er at seta hart móti hørðum; at russisk aggressión má fáa eitt aggresivt aftursvar, og umfatandi hernaðarhjálpin til Ukraina er eitt gott dømi um hetta. At byrja við fekk týska stjórnin seg ikki til at senda annað enn nakrar hjálmar til Ukraina, men so hvørt stríðið harnaði og ótespiligar søgur hoyrdust úr Irpin og Butja – tveir Kyjiv-forstaðir, har krígsbrotsverk vórðu framd móti sivilum – varð traðka á spitaran og eisini Leopard 2-stríðsvognar vórðu latnir Ukraina.

Og hóast tey ikki hava havt ta knock-out ávirkan, sum teimum varð spátt, so hava revsitiltøkini móti Russlandi ikki verið uttan ávirkan. Revsitiltøk eru eitt "slow-burning tool"- t.e. eitt amboð, ið virkar líðandi, og tí er tað ikki rætt-



vísandi longu nú at gera avgjørdar niðurstøður um, hvussu væl tey virka. Sum søgulig dømi vísa, eitt nú revsitiltøkini móti apartheid-stýrinum í Suðurafrika og prestastýrinum í Iran, so kunnu revsitiltøk yvir tíð niðurlaga búskapin í móttakaralandinum og elva til misnøgd, politiska ónøgd og órógv, og harvið fáa avgerandi ávirkan á politisku gongdina í landinum.

Føroyar hava ongi vápn at lata Ukraina. Men vit hava møguleika at senda eitt greitt signal til Moskva og okkara sameindu um, at vit ikki góðtaka russisku framferðina í Ukraina. Summi vilja vera við, at kostnaðurin fyri Føroyar er ov høgur, og at ávirkanin á Russland kortini er marginal. Men tað ber eisini til at spyrja, um vit hava ráð til at lata vera. Halda vit fram við samstarvinum við Russland sum onki var hent, so kann hetta við tíðini ávirka samstarv okkara við okkara norður- og vesturlendsku sameindu. Tað er ilt at meta um, hvat hetta kann enda við at kosta.

Hetta er ein trupul avgerð, tað er ongin ivi um tað, men tað avgerandi er helst, at politiska skipanin tekur støðu við framtíðini í huga. Kunnu vit góðtaka russiska atburðin? Vilja vit liva og virka í einum heimi, har tað framvegis verður samstarva við lond, sum undirgrava altjóða lóg og leggja á sínar grannar? Ella er tað leiklutur og pláss Føroya í heiminum at berjast fyri teimum virðum, vit sjálvi hava grundað okkara lívs- og samfelagsáskoðan á?

Kanska lykilin er at finna í slíkum spurningum, heldur enn at gera alt upp í krónum og oyrum.



# 4. PARTUR

# Samanumtøka: Er tíðin komin at skiljast?

Við hesum faldaranum hava vit nú sett nøkur orð á eitt av týdningarmestu politisku málunum í Føroyum. Vit hava hugt eftir søguliga partinum av fiskiveiðusamstarvinum við táverandi Sovjetsamveldið. Vit hava víst á politiska orðadráttin og argumentini meirilutin brúkti at rættvísgera umstríddu avtaluna við í 1977. Vit hava samanborið við kjakið í dag og staðfest, at á mongum økjum eru tað tær somu grundgevingarnar, sum gera seg galdandi í dag, sum fyri 46 árum síðani. Eisini hava vit hugt at tilgongdini til fiskiveiðusamstarvið við Russland fyri 2023.

Vit hava lagt fram tøl, sum fyrrverandi skiparin og skrivarin í reiðarafelagnum, Árni Dam hevur sett saman. Sambært roknistykkinum hjá Árna, so høvdu uppsjóva- og botnfiskakvoturnar, sum vit lata Russlandi og Noregi, í 2021 kunnað givið 399 milliónir krónur meira enn Barentshavið gav. Stóra virðið av uppsjóvarfiskinum stavar frá tí møguligu virðisøkingini á landi. Størsta fyrivarni við tølunum vit hava lagt fram, er at vit bert hyggja eftir einum ári. Talan er sostatt um eina løtumynd og kunnu tað vera óteljandi faktorar, ið ávirka virðið á fiskiskapinum. Hinvegin hava vit eina uppsjóvarkvotu, sum søguliga hevur verið ógvuliga støðug. Tað í sær sjálvum talar fyri einari sera tryggari inntøkukeldu. Tað er, samanumtikið, nógv, sum talar fyri, at vit høvdu kunnað fingið heilt nógv burtur úr, um vit sjálvi fiskaðu tað, vit lata Russlandi og Noregi afturfyri kvoturnar í Barentshavinum.

Vit hava verið á gátt hjá stjóranum í Høvdavirkinum í Leirvík, Eiriki á Húsamørk. Eirikur er ein teirra, sum hevur sæð burtur frá hugburðinum um, at svartkjaftur er ónyttufiskur og er fyri langari tíð síðani farin í gongd við ítøkiligar verkætlanir, sum svartkjafturin kann nýtast til. Og møguleikarnir eru nógvir. Hendan rávøran, sum aðrastaðni verður brúkt sum mannaføði, hevur í øllum førum nógv størri virði, enn vit hava givið okkum far um. Og eitt hvørt komandi kjak um føroyska fiskivinnu eigur tískil eisini at taka menningarmøguleikarnar í svartkjaftinum í álvara.

Hendan frágreiðingin hevur eisini víst, at vit – uttan mun til hvat vit halda um fiskiveiðuavtaluna – mugu hava eitt politiskt kjak um viðurskifti okkara við Russland. Tað ber ikki longur til at siga, at vit eru ov smá, ella at okkara avgerðir ongan týdning hava fyri onnur lond. Tí londini rundan um okkum fylgja nú brádliga sera væl við í tí, sum fyriferst í føroyskum politikki. Og okkara sameindu hava, um okkum dámar tað ella ikki, meiningar um tað, vit í Føroyum gera. Vit liggja mitt í stríðnum millum stórveldini eystan- og vestanfyri. Og okkara sambond við umheimin eru kanska týdningarmiklari enn nakrantíð.

Russland er í dag at kalla eitt fámannaveldi, sum brýtur altjóða lóg fyri at fremja síni áhugamál í verki. Putin er vorðin helst størsta einaræðishóttanin í okkara tíð – ið hvussu er um okkara leiðir. Og tess størri trýst hann kemur undir frá umheiminum, tess størri tapini verða hjá russisku krígsmaskinuni í Ukraina, tess meira óútrokniligur verður hann. Tað setir altjóða trygd og samstarv undir trýst, eins og tað fyribils hevur gjørt samstarvið í arktiska økinum óhugsandi. Tað er hugsandi, at hesi viðurskifti sum frálíður fara at leggja enn størri trýst á smátjóðir sum Føroyar. Og at fleiri bond verða løgd á okkara uttanríkispolitisku heimildir.

Tí snýr avgerðin, sum føroya løgting í næstum skal taka um fiskiveiðuavtaluna við Russland, seg ikki um fisk einans. Avgerðin, um hvørt føroyska fiskiveiðusamstarvið við russiska statin skal slítast ella leingjast hevur fíggjarlig, moralsk, sosial og ikki minst altjóðapolitisk atlit við sær.

Vesturheimurin hevur síðan Sovjetsamveldið rapaði saman í 1991 havt ta áskoðan, at jú meira vit handla við Russland, tess størri ávirkan fáa vesturlendsku virðini á Russland. Hesin hugburðurin hevur verið galdandi hóast allar alarmklokkur hava ringt næstan síðan Vladimir Putin kom til valdið í 2000. Síðan fyrst í 21' øld hevur Putin knúst tí fólkaræðisligu vónina, sum einaferð var í Russlandi, hann hevur jagstrað og fongslað politisk mótstøðufólk, kvalt allar frælsar miðlar í landinum, týnt andstøðingar uttanlands og ikki minst loyvt áhaldandi telduálopunum á vesturlendsku teldukervini, fyritøkur og einstaklingar fyri at undirgrava okkara fólkaræðiligu skipanir.

Evropeisku høvuðstaðirnir hava tilvitað sæð millum fingrarnar, tá Russland áhaldandi hevur brotið mørkini fyri, hvat kann góðtakast. Tað hava vit sæð í Tjetjenien, í Georgia og ikki minst í Sýria. Men tá Russland hertók Krim-hálvoynna í 2014 fleyt bikarið yvir í Evropa, og revsitiltøk vórðu á fyrsta sinni sett í verk móti Russlandi. Tað var tó ikki fyrrenn tann 24. februar 2022, tá Russland gjørdi innrás í Ukraina við

tí endamáli, at leggja størsta landið í Evropa undir seg, at Vesturheimurin loksins slepti vónini um okkurt slag av samstarvi við Russland.

Men í 2014, tá flestu londini í Evropa minkaðu um samstarvið við Russland, stóð ein samd politisk skipan í Føroyum saman um at økja um útflutningin til russlands. Avgerðin møtti fleiri atfinningum úr bæði Danmark og ES, men vit tvíhildu um samhandilin við Russland við tí grundgeving, at føroyska marknaðaratgongdin til Evropa var ov vánalig, og vit tí ikki høvdu nakað val. Í tilgongdini til fiskiveiðusamstarvi fyri 2023 var politiska skipanin í Føroyum alt annað enn greið. Tilsamans minkaði útflutningurin úr Føroyum til Russland úr 25 prosentum niður í átta prosent. Hetta var tó ikki takkað verið politisku myndugleikunum, men í høvuðsheitum orsakað av privatum átøkum.

Stóri spurningurin var, um fiskiveiðuavtalan, sum landið Føroyar hevur við statin Russland, skuldi leingjast ella strikast. Tá tað kom til stykkis var tað ein greiður politiskur meiriluti fyri at leingja avtaluna í eitt ár. Avgerðin bleiv tikin útfrá eini frágreiðing hjá fiskimálaráðnum, sum landsstýrið tó ikki vildi geva almenninginum innlit í. Tað, sum vit fingu at vita, var bert, at avtalan stóð upp og niður. Men eingin fekk møguleikan at eftirkanna tað, eingi tøl vórðu løgd fram, og tískil hevur tað verið at kalla ógjørligt at hava eitt veruligt kjak um búskaparligu viðurskiftini í avtaluni. Við øðrum orðum: Vit tóku okkara týdningarmestu politisku avgerð í Føroyum í nýggjari tíð, uttan at føroyska fólkið slapp at kjakast um avgerðina útfrá einum upplýstum grundarlagi.

Sæð úr einum fólkaræðisligum sjónarmiði hevur hetta skeiklað grundarlagið. Tí øll kundu hava eina meining um moralsku atlitini, sum standast av fiskiveiðuavtaluni við Russland. Men tann fíggjarliga partin slapp ongin at vita nakað um.

Hetta er orsøkin til, at vit hava gjørt hesa frágreiðing. Skulu vit kunna taka støðu í hesum spurningi, er neyðugt at vita, hvat vit tosa um. Tað er neyðugt at vita, hvussu nógv avtalan er verd. Og at hava eina hóming av, hvat vit kundu fingið í staðin. Útrokningarnar, sum liggja til grunds fyri hesi frágreiðing, eru tískil settar soleiðis upp, at ein og hvør hevur møguleika at eftirkanna tær. Og at tað eisini ber til, at seta onnur tøl inn fyri okkara, um mett verður, at tølini eru skeiv.

Okkara niðurstøða er, at vit samfelagsliga kundu vunnið væl meira pening burtur úr at sjálvi fiska og virðisøkja tað, vit lata Russlandi og Noregi afturfyri botnfiskakvoturnar í Barentshavinum.

Um talið er hægri ella lægri enn tað, vit eru komin fram til, ber til at kjakast um. Men nú eru so ið hvussu er tøl á borðinum. Tað átti at latið upp fyri einum betri kjaki, sum fleiri enn higartil nú kunnu taka lut í.



# Notur

### NOTA 1

**BARENTSHAVS FISKISKAPUR**

| NØGD Í KG. | | | | AVREIÐINGARVIRÐIÐ | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Avhøvda** | **Flak** | **heilt** | | **Avhøvda** | **Flak** | **heilt** |
| Toskur | 5.219.607 | 14.441.800 | | Toskur | 99.532.261 | 270.730.435 | |
| Hýsa | 538.774 | 1.196.767 | | Hýsa | 8.584.102 | 19.787.317 | |
| Flatfiskur o.a. | 827.329 | 635.394 | | Flatfiskur o.a. | 9.818.687 | 4.609.281 | |
| Rækjur | | | 2.349.687 | Rækjur | | | 38.711.505 |
| Íalt | 6.585.709 | 16.273.961 | 2.349.687 | Íalt | 117.935.050 | 295.127.033 | 38.711.505 |
| | | **ÍALT** | **25.209.357** | | | **ÍALT** | **451.773.588** |

**UPPSJÓVAR SKIP**

| | **nøgd í kg.** | **á kr.** | **kr. íalt** |
|---|---|---|---|
| Makrelur | 21.100.000 | 7,00 | 147.700.000 |
| Sild | 10.000.000 | 5,29 | 52.900.000 |
| Svartkj. | 82.000.000 | 2,02 | 165.640.000 |
| **ÍALT** | **113.100.000** | **3,24** | **366.240.000** |

Nota 1 vísir, hvat ávikavist avhøvdaður fiskur og fiskur, sum er skorin til flak, er, tá ið vit umrokna hann til heilan fisk. Sí notu 5 fyri frágreiðing um, júst hvussu fiskurin er umroknaður. Vit minna á, at sjálvandi eru vansar við slíkari útrokning. Orsøkin til notu 1 er fyri at meira nágreiniliga kunna rokna út oljuforbrúk í notu 2.

Tað er ymiskt, hvat skipini í Barentshavinum fiska í nøgd per túr og per dag. Vit kunnu ganga út frá, at tey fiska áleið líka nógv um dagin. Men fyri hvønn túr skal meira av heilum fiski til fyri at fylla eina last við flaki. Sostatt fiska skipini meira heilan fisk per túr, sum so verður skorin til flak, har restin síðani fer burtur.

Vit umrokna til heilan fisk fyri at kunna standardisera metingina fyri fiskiskap per dag og sostatt hava sama útgangsstøði, tá vit rokna oljuforbrúk fyri skip, sum virka til flak, við skip, sum bert avhøvda.



## NOTA 2

Í niðanfyristandandi talvum eru ávís tøl, sum eru metingar hjá Árna, sum so nýtast til at útrokna oljuforbrúk. Í ovastu talvunum niðanfyri fyri bæði Barentshavið og uppsjóvarfiskin, eru settar metingar fyri hesi viðurskifti:

- Kilo av fiski fyri hvønn fiskitúr (t.e. ein meting fyri, hvussu nógv av ávísu fiskasløgunum kunnu vit vænta, at fiskiskipini fiska í miðal per túr)
- Kilo av fiski um dagin (t.e. ein meting fyri, hvussu nógv tey fiska um dagin)
- Dagar sigling fyri hvønn túr (hvussu langur er ein túrur eftir makreli t.d. í miðal)
- Oljunýtsla í litrum fyri hvønn dag undir sigling
- Oljunýtsla í litrum fyri hvønn dag undir fiskiskapi
- Liturprísurin fyri olju í 2021

Hesi tølini brúkast so sum grundarlag fyri at rokna út, hvat oljunýtslan var og hvat hon kostaði fyri fiskiskapin í Barentshavinum, og hvat hon hevði kostað fyri uppsjóvar-fiskiskapin. Gevið niðanfyristandandi gætur, áðrenn talv-urnar verða lisnar.

## OLJUFORBRÚK TIL SIGLING

- Túrar tilsamans = nøgd / fiskur pr túr
- Dagar sigling tilsamans = Dagar sigling pr túr * túrar tilsamans
- Olja sigling = Olja pr dag undir sigling * dagar sigling tilsamans
- Oljuforbrúk undir sigling = Oljanýtsla tilsamans undir sigling * við liturprísin fyri olju

## OLJUFORBRÚK UNDIR FISKISKAPI

- Fiskidagar tilsamans = Kvotumongd / fiskiskapur pr dag
- Oljunýtsla tilsamans undir fiskiskapin = Fiskidagar tilsamans * oljunýtsla per dag undir fiskiskapi
- Oljuforbrúk undir fiskiskapi = Oljunýtsla tilsamans undir fiskiskapi * liturprís fyri olju

**BARENTSHAV:**

| | Kg. Heilur fiskur pr. túr | pr. dag | Dagar Sigling | Olja pr. dag sigling | Olja pr. dag Fiskarí | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Avhøvda | 1,200,000 | 39,474 | 8 | 11,000 | 16,000 | | |
| Flak | 2,155,000 | 39,474 | 8 | 11,000 | 16,000 | | |
| **Sigling** | **nøgd** | **pr. túr** | **Túrar tils.** | **Dagar sigling tils.** | **Olja sigling tils.** | **kr. pr. litur** | **Oljuforbrúk tils.** |
| Avhøvd&rækjur | 8,935,395 | 1,200,000 | 7 | 60 | 655,262 | 5.00 | 3,276,312 |
| Flak | 16,273,961 | 2,155,000 | 8 | 60 | 664,552 | 5.00 | 3,322,758 |
| | | | | | | | **6,599,069** |
| **Fiskiskap** | **nøgd** | **pr. dag** | | **Fiskidagar** | **Olja til fiskarí** | **kr. pr. litur** | **kr. íalt** |
| Avhøvd&rækjur | 8,935,395 | 39,474 | | 226 | 3,621,814 | 5.00 | 18,109,068 |
| Flak | 16,273,961 | 39,474 | | 412 | 6,596,379 | 5.00 | 32,981,895 |
| | | | | | | | **51,090,963** |
| | | | | | | **OLJA Í ALT Í KR.** | **57,690,032** |

| UPPSJÓVARSKIP | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Kg. Heilur fiskur pr. túr | pr. dag | Dagar Sigling | Olja pr. dag sigling | Olja pr. dag Fiskarí | | |
| Makrelur | 1,200,000 | 300,000 | 2 | 10,000 | 20,000 | | |
| Sild | 1,500,000 | 300,000 | 3 | 10,000 | 20,000 | | |
| Svartkj. | 2,300,000 | 500,000 | 4 | 10,000 | 20,000 | | |
| **Sigling** | **nøgd** | **pr. túr** | **Túrar tils.** | **Dagar sigling tils.** | **Olja sigling tils.** | **kr. pr. litur** | **Oljuforbrúk tils.** |
| Makrelur | 21,100,000 | 1,200,000 | 18 | 35 | 351,667 | 5.00 | 1,758,333 |
| Sild | 10,000,000 | 1,500,000 | 7 | 27 | 266,667 | 5.00 | 1,333,333 |
| Svartkj. | 82,000,000 | 2,300,000 | 36 | 143 | 1,426,087 | 5.00 | 7,130,435 |
| | | | | | | | **10,222,101** |
| **Fiskiskap** | **nøgd** | **pr. dag** | | **Fiskidagar tils.** | **Olja til fiskarí** | **kr. pr. litur** | **Oljuforbrúk tils.** |
| Makrelur | 21,100,000 | 300,000 | | 70 | 1,406,667 | 5.00 | 7,033,333 |
| Sild | 10,000,000 | 300,000 | | 33 | 666,667 | 5.00 | 3,333,333 |
| Svartkj. | 82,000,000 | 500,000 | | 164 | 3,280,000 | 5.00 | 16,400,000 |
| | | | | | | **íalt** | **26,766,667** |
| | | | | | | **OLJA Í ALT Í KR.** | **36,988,768** |

- **Fiskiskapur pr dag og pr túr:**
  - Fyri at finna hesa meting hevur Árni Dam kannað tøl frá skipum í 2021.
  - Tá ið veitt verður eftir makreli og sild roynir mann ofta varðveita góða góðsku á fiskinum, og tískil veiður man ikki ov stórar nøgdir á hvørjum túri. Tó er tað ikki so fyri veiðu av svartkjafti, har omanfyri 3.000 – 3.500 tons ofta verða landað í senn. Árni Dam hevur so valt miðaltalið 2.300 fyri svartkjaft, sum, hóast vit ikki hava ítøkiliga miðaltalið, verður mett at vera á góðari leið.

- **Oljunýtsla pr dag fyri sigling og fyri fiskarí:**

  Havast skal í huga, at oljunýtsla hækkar munandi, meðan fiskað verður samanborið við, tá ið skipini bara sigla. Metingar fyri oljunýtslu pr dag til sigling og fiskarí eru metingar frá hjá Árna, har hann styðjar seg við kunnleika, hann hevur frá øðrum. Vit vita ikki um almenn tøl fyri hesa oljunýtslu. Hvørki fíggjarmálaráðið, Setrið ella Vørn siga seg hava tøl fyri hetta.

### NOTA 3 – PAKNINGUR

| | kg. íalt | kr. pr. kg. | íalt |
|---|---|---|---|
| **LANDA NØGD ÚR BARENTSHAVINUM** | 13,130,197 | 0.80 | 10,504,158 |

- **Landað nøgd:** Landað nøgd úr Barentshavinum stavar frá tølum frá Vørn fyri 2021. 0,8 krónur pr kilo fyri landaða vekt metir Árni Dam vera nøktandi boð uppá kostnað pr kilo til pakning.

### NOTA 4

| BARENTSHAVIÐ: | | | |
|---|---|---|---|
| | | **Úrslit áðrenn hýru** | **362.413.321** |
| % av netto | Hýra | 41,6% | 150.612.847 |
| % av lønuni | lønargjald* | 3,28% | 4.940.101 |

** Barsilskipanin + ALS + arbeiðsmarkanaðreftirlønargjald*

| UPPSJÓVARSKIP: | | | |
|---|---|---|---|
| | | avreiðingarvirðið | 366.240.000 |
| | | - tilfeingisgjald | 62.695.500 |
| | | **Netto at rokna hýru av** | **303.544.500** |
| % av netto | Hýra | 26,2% | 79.528.659 |
| % av lønuni | lønargjald* | 3,28% | **2.608.540** |

** Barsilskipanin + ALS + arbeiðsmarkanaðreftirlønargjald*

- **Hýrur til Barenthsavið og uppsjóvarfisk:** Úrslit áðrenn hýru fyri Barentshavið er úrslitið frá talvuni "Bruttoúrslit til reiðarí" longur uppi, sum vísir bruttoúrslit til reiðarí. Úrslit áðrenn hýru fyri Barentshavið er sostatt úrslitið, tá ið vit hava drigið oljuforbrúk, pakning umframt tilfeingisgjald frá. Sjálvur hýrusatsurin á 41,6% av restini av bruttoinntøkuni er grundaður á sáttmálar millum reiðarafelagið og manningarfeløgini, sambært Árna Dam. Fyri uppsjóvarskip skal hýruprosentið faldast við samlaða avreiðingarvirðinum minus tilfeingisgjald. Uppsjóvarskip draga ikki oljuforbrúk frá áðrenn. Hýrusatsurin á 26,2% er eisini grundaður á sáttmálar fyri nótaskip, sum fiska bróðurpartin av uppsjóvarfiskinum.

## NOTA 5: MIÐAL KILOPRÍSUR FYRI BARENTSHAVIÐ

Miðalprísurin fyri Barentshavið er eitt boð uppá miðalprís fyri heilan fisk. Hartil skal prísurin skiljast sum eitt miðaltal fyri allan fiskin úr Barentshavinum, og skal sjálvandi takast við fyrivarni. Av tí at skipini í Barentshavinum virka umborð er umrokningin til heilan fisk sjálvsagt bert ein meting. Mongdin av heilum fiski er funnin við at deila sølumongd í kilo sambært avreiðingarseðlum í 2021 við ávikavist 76% fyri tey skip, sum avhøvda, og við 36% fyri tey skip, sum skera til flak. Prosentið av fiski, sum fer burtur við avhøvding og av at verða skorið til flak, er ein meting hjá Árna Dam. Sølumongd í kilo og søluvirðið í 2021 finnast á hesari leinkju á heimasíðuni hjá Vørn (Hagtøl - Vørn (vorn.fo)). Gera vit útrokningina fyri øll fiskiskipini í Barentshavinum, fáa vit eina samlaða avreidda mongd á 25.209.357 kilo av rundum fiski. Deila vit síðani samlaða avreiðingarvirðið úr Barentshavinum við hetta talið, so fæst miðal kiloprísurin á 17,92 krónur.

Fyri gjøgnumskygni verða talvurnar frá Vørn vístar niðanfyri, umramt tann talvan, sum er nýtt til at umroknað til heilan fisk.

**TØL FRÁ VØRN FYRI BARENTSHAVIÐ Í 2021 SØLA Í KG. FYRI HVØRT SKIPIÐ**

| | Akraberg | Enniberg | Gadus | Sjúrðarberg | Jógvan I | Arctic Viking | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Toskur | 3.671.687 | 1.924.469 | 1.963.153 | 1.311.426 | 295.214 | | 9.165.949 |
| Hýsa | 323.091 | 200.054 | 144.607 | 86.175 | 86.377 | | 840.304 |
| Upsi | 124.826 | 23.107 | 104.767 | 16.164 | | | 268.864 |
| Kongafiskur | 69.081 | 98.628 | 64.899 | 58.760 | | | 291.368 |
| Longa | 802 | | | | | | 802 |
| Brosma | | | | | 225 | | 225 |
| Steinbítur | 1.457 | | | 1.404 | 911 | | 3.772 |
| Svartkalvi | 6.979 | 63.058 | 9.420 | 40.120 | 7.282 | | 126.859 |
| Reyðsprøka | 259 | 615 | 982 | 1.600 | | | 3.456 |
| Rækjur | 246.571 | 1.350.434 | | | | 674.817 | 2.271.822 |
| Annað | 54.809 | 31.003 | 42.115 | 11.586 | 17.263 | | 156.776 |
| **TILS.** | **4.510.857** | **3.693.392** | **2.329.942** | **1.527.235** | **407.272** | | **13.130.197** |

**Søla í Kr. fyri hvørt skipið**

| | Akraberg | Enniberg | Gadus | Sjúrðarberg | Jógvan I | Arctic Viking | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Toskur | 90.435.135 | 101.271.589 | 105.341.594 | 64.117.252 | 9.097.126 | | 370.262.696 |
| Hýsa | 6.201.929 | 9.372.382 | 6.387.434 | 4.027.501 | 2.382.173 | | 28.371.419 |
| Upsi | 1.312.907 | 535.011 | 2.198.223 | 347.397 | | | 4.393.538 |
| Kongafiskur | 586.316 | 1.596.785 | 1.024.141 | 788.251 | | | 3.995.493 |
| Longa | 8.018 | | | | | | 8.018 |
| Brosma | | | | | 2.475 | | 2.475 |
| Steinbítur | 10.196 | | | 21.945 | 10.776 | | 42.917 |
| Svartkalvi | 143.115 | 2.437.989 | 264.384 | 1.014.180 | 161.466 | | 4.021.134 |
| Reyðsprøka | 517 | 3730 | 7856 | 12.960 | | | 25.063 |
| Rækjur | 4.119.221 | 21.038.758 | | | | 13.553.526 | 38.711.505 |
| Annað | 310.504 | 684.938 | 744.317 | 99.395 | 100.176 | | 1.939.330 |
| **TILS.** | **103.357.202** | **136.941.182** | **115.967.949** | **70.428.881** | **11.754.192** | **13.553.526** | **451.773.588** |

Skipini í Barentshavinum antin avhøvda ella skera fiskin umborð til flak. Tvs. at landaða mongdin ikki er heilur fiskur. Niðanfyri verður sølumongdin í kilo umroknað til heilan fisk. Litirnir siga um fiskurin er avhøvdaður, frystur heilur ella skorin til flak. Umrokningarprosentini eru metingar hjá Árna Dam. Dømi: Fyri at finna, hvussu nógvan heilan tosk Akraberg fiskaði í 2021 t.d., so deila vit sølumongd í kilo í 2021, sum var áleið 3,7 túsund tons, við 76%, og fáa harvið 4,8 túsund tons. Sostatt meta vit, at áleið 24% av fiskinum fer burtur, tá ið fiskurin avhøvdast.

Miðalprísurin finst við at deila samlaðu mongdina av heilum fiski við samlaða avreiðingarvirðið fyri tann fiskin.

## ÚRTØKA

| | |
|---|---|
| Avhøvda | 76% |
| Fryst heilt | 100% |
| Flak | 36% |

**Umrokna til heilan fisk**

| | Akraberg | Enniberg | Gadus | Sjúrðarberg | Jógvan I | Arctic Viking | Tils. | miðalprísur |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Toskur | 4.831.167 | 5.345.747 | 5.453.203 | 3.642.850 | 388.439 | 0 | 19.661.407 | 18,83 |
| Hýsa | 425.120 | 555.706 | 401.686 | 239.375 | 113.654 | 0 | 1.735.540 | 16,35 |
| Upsi | 164.245 | 64.186 | 291.019 | 44.900 | 0 | 0 | 564.350 | 7,79 |
| Kongafiskur | 90.896 | 129.774 | 85.393 | 77.316 | 0 | 0 | 383.379 | 10,42 |
| Longa | 1.055 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1.055 | 7,60 |
| Brosma | 0 | 0 | 0 | 0 | 296 | 0 | 296 | 8,36 |
| Steinbítur | 1.917 | 0 | 0 | 4.011 | 1.199 | 0 | 7.127 | 6,02 |
| Svartkalvi | 9.183 | 82.971 | 12.395 | 52.789 | 9.582 | 0 | 166.920 | 24,09 |
| Reyðsprøka | 341 | 1.757 | 2.806 | 4.571 | 0 | 0 | 9.475 | 2,65 |
| Rækjur | 324.436 | 1.350.434 | 0 | 0 | 0 | 674.817 | 2.349.687 | 16,48 |
| Annað | 72.117 | 86.119 | 116.986 | 32.183 | 22.714 | 0 | 330.120 | 5,87 |
| | **5.920.476** | **7.616.694** | **6.363.488** | **4.097.996** | **535.884** | **674.817** | **25.209.357** | **17,92** |

## NOTA 6

Faktorar, sum eru tiknir við í útrokning fyri virðisøking á landi, eru:

- Úrslit hjá ávísum uppsjóvarvirkjum og Bakkafrost áðrenn skatt. Úrslitini hjá uppsjóvarvirkjum eru fráBusinessline.fo. Úrslitið hjá Bakkafrost fyri 2021 sæst á heimasíðu teirra.
- Starvsfólkakostnaður
- Ogn í umferð (ikki fyri Bakkafrost)
- % av fóðri hjá Havsbrún, sum stavar frá uppsjóvarfiski

Í útrokningunum niðanfyri ganga vit út frá, at allur landaði makrelurin og sildin fóru til tey virkir, sum standa í talvuni. Fyri virðisøking á svartkjafti brúka vit tøl frá Bakkafrost. Mongdin av fiski er landaða mongdin av fiskasløgunum hjá føroyskum skipum í 2021.

**VIRÐISØKING AV SILDI OG MAKRELI**

| | Varðin Pelagic 2021 | North Pelagos 2021 | Kollafj. Pelagic 2021 | Pelagic 2021 | virðisøking íalt í t. Kr. |
|---|---|---|---|---|---|
| Starvsfólkakost. | 62,806 | 41,029 | 3,616 | 20,448 | |
| Úrslit áðrenn skatt | 84,461 | 97,342 | 3,330 | -12,182 | |
| **íalt** | **147,267** | **138,371** | **6,946** | **8,266** | **300,850** |
| Ogn í umferð | 350,561 | 369,217 | 73,447 | 229,307 | |
| 10%** | 35,056 | 36,922 | 7,345 | 22,931 | 102,253 |
| | | | | **íalt** | **403,103** |

(Vertical label beside the lower rows: Ogn í umferð)

*** Við ósikrum framtíðarútlitum, verða goymslur vanliga niðurskrivaðar.*

*Av tí, at ein partur av "ogn í umferð" er skuldarar, so er bert 10% brúkt sum niðurskriving.*

**TONS LANDA AV FØROYSKUM SKIPUM AV SILD OG MAKRELI:**

| | **Íalt** | **- Norðborg** | **= Tangabátar** | |
|---|---|---|---|---|
| Sild | 99,944,272 | 10,166,578 | 89,777,694 | |
| Makrelur | 86,014,113 | 7,204,911 | 78,809,202 | |
| | | **Íalt sum ferð inn á virkini** | **168,586,896** | kg. |
| | | **Stytt til 1.000 kg.** | **168,587** | **t. Kg.** |

virðisvøkstur = virðisøking á virkjunum / kg. landað til virkini = **virðisvøkstur pr. kg. Landa**

virðisvøkstur pr. kg. landa av sild og makreli = 403,103 / 168,587 = **2.39**

| VIRÐISØKING AV SVARTKJAFTI | | |
|---|---|---|
| | **Bakkafrost 2021** | |
| Starvsfólkakost. | 728.423 | |
| Úrslit áðrenn skatt | 964.036 | |
| Íalt | 1.694.480 | t. Kr. |
| **40%*** ** | **677.792** | **virðisøking í alt av Svartkjafti** |

****Smb. Havsbrún, so fer uml. 40% av uppsjóvarfiski til hvørt kg. av fóðri*

| TONS LANDA AV FØROYSKUM SKIPUM AV SVARTKJAFTI: | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | **íalt** | **- Norðborg** | **= Tangabátar** | |
| Svartkjaftur | 181.555.167 | 9.952.641 | 171.602.526 | |
| Íalt sum ferð inn á virkini | | | 171.602.526 | kg. |
| | | **Stytt til 1.000 kg.** | **171.603** | **t. Kg.** |

virðisvøkstur pr. kg. Landa av svartkjafti = $\frac{677.792}{171.603}$ = **3,95 pr. kg.**

Viðmerkingar til virðisøking:

1. Tað er ikki viðroknað, at nakrir útlendskir trolarar hava landað í Føroyum. Hinveing er tað heldur ikki við, atnakrar lastir hjá føroyskum skipum eru landaðar aðrastaðni. Um hetta javnvigar er ikki greitt í skrivandi stund.

2. Virðisøking hjá øllum teimum fyritøkum, ið veita tænastur til omanfyristandandi uppsjóvarvirkir og Bakkafrost,er heldur ikki viðroknað.

3. Virðisvøksturin hjá Hiddenfjord, sum Havsbrún selur nakað av fóðri til, er heldur ikki tikin við.

Sostatt eru faktorar, ið eyðvitað høvdu gjørt virðiðsvøkst-urfaktorin størri, ikki tiknir við. Neyv tøl fyri hetta eru ikki tøk.

# KELDULISTI


**1. PARTUR**

Dagblaðið. (1986)

Dam, A. (1977). *Sosialurin*

Economist, T. (1988)

Ellefsen, P. (1977). *Dimmalætting*

Fiskur.fo. (2018). *Fyrrverandi skálaberg seldur til Russlands*

Hansen, A. v. (1987). *Dagblaðið.*

Information. (1977).

Jensen, B. (2004). *Færøerne under den kolde krig 1945-1991 s.125-126.*

Joensen, H. A. (1977). *Dagblaðið.*

Sosialurin. (1977).

Sosialurin. (1997)

Tidende, B. (2022).

Vágadal, J. (1977). *Dimmalætting.*

**3. PARTUR**

(31. 07 2022). *Морская доктрина Российской Федерации.* Moskva: Russiska stjórnin.

Belukhin, N. (2022). *«Непокорные острова». Гренландия и Фареры лелеют суверенные амбиции.* Moskva: RIAC - Russian International Affairs Council. From RIAC - Russian International Affairs Council.

Belukhin, N. (2022). *Больше не «рыбное место»? Будущее российско-фарерских связей под вопросом.* Moskva: RIAC - Russian International Affairs Council.

Belukhin, N. (2022). *Датское Содружество в прицеле великих держав.* Moskva: RIAC - Russian International Affairs Council.

Caprile, A., & Delivorias, A. (2023). *Briefing: EU Sanctions on Russia: Overview, impact, challenges.* Bruxelles: European Parliamentary Research Service.




(2022). Democracy Index 2021: *The China Challenge.* London: The Economist.

(2023). Democracy Index 2022: *Frontline Democracy and the Battle for Ukraine.* London: The Economist.

*EU response to Russia's invasion of Ukraine. (20. Apríl 2023).* From Council of the European Union: https://www.consilium.europa.eu/en/policies/eu-response-ukraine-invasion/#sanctions

Evensson, P. H. (07. 06 2022). *Mette F: Fongslið hevur einki samband við radaran.* From in.fo: https://www.in.fo/news-detail/mette-f-fongslid-hevur-einki-samband-vid-radaran

Fastrup, N., Quass, L., & Ledegaard, F. H. (2023). *Afsløring: Russiske spionskibe forbereder mulig sabotage mod havvindmøller, gasrør og strømkabler i Danmark og Norden.* dr.dk.

Feng, J. (05. 04 2023). *China Has 'Moral Duty' To Help Stop Russia's War in Ukraine: EU.* From Newsweek: https://www.newsweek.com/china-russia-ukraine-war-european-union-josep-borrell-1792708

Indizjev, A. (2010). *Битва за Арктику. Будет ли Север Русским?* Moskva: Eksmo.

Milov, V. (2023). *Beyond the Headlines: The Real Impact of Western Sanctions on Russia*. Bruxelles: Wilfried Martens Centre for European Studies.

Russel, M. (2022). *In-depth Analysis: Western Sanctions and Russia.* Bruxelles: European Parliamentary Research Service.

Snegovaja, M., Dolbaia, T., Fenton, N., & Bergmann, M. (2023). *Russian Sanctions at One Year: Learning from the Cases of South Africa and Iran*. Washington: Center for Strategic & International Relations.

Spliedsboel Hansen, F. (2016). R*ussisk hybridkrig: Fremtidens krig er i fuld gang.* Keypmannahavn: DIIS Policy Brief.




JAVNAÐARFLOKKURIN
á Fólkatingi